| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. september 2021 | Blað nr.: 811 |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 30. september 2021 **Kl**. 17:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 207/21 – 242/21**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Elsa Berg
Jón Kragesteen (fyri Jákup Dam)
Gunvør Balle
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Ruth Vang

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðfríð Jacobsen
Bogi Jacobsen

**LUTTÓKU IKKI:**
Jákup Dam

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 207/21 | 21/00012-1 | Mál beind í nevndir 2021 | 814 |
| 208/21 | 19/00083-1 | Bátahylur í Álakeri | 816 |
| 209/21 | 19/01357-35 | Lendi. Breiðkan av Marknagils og Landavegnum. | 825 |
| 210/21 | 21/01606-6 | Matr.nr. 138dq, Hoyvík. Afturkeyp/makaskifti. | 828 |
| 211/21 | 21/03148-2 | Víðarisøla matr.nr. 138y, Hoyvík. | 830 |
| 212/21 | 21/03699-3 | Víðarisøla matr.nr. 203m, Kollafjørður. | 832 |
| 213/21 | 21/03506-2 | PF Kemilux. Umsókn um keyp av lendi at leggja saman við grundstykki matr.nr. 1083r, Mykinesgøta 1. Tórshavn. | 834 |
| 214/21 | 21/03515-4 | Matr.nr. 255au, Kirkjubøur,Argir. Keyp av óbygdum grundstykki. | 836 |
| 215/21 | 20/04154-1 | Val av tveimum limum í nevndina fyri Barnamentanarheiðursløn Tórshavnar býráðs | 838 |
| 216/21 | 16/01316-10 | Vegna nevndina í Bridgehúsinum Pól E. Egholm : Umbøn um fund viðvíkjandi Brigdehúsinum í Gundadali | 839 |
| 217/21 | 21/03570-2 | Sjálvsognarstovnurin Bridgehúsið : Umsókn um stuðul til bygging av nýggjum bridgehúsi | 846 |
| 218/21 | 17/01326-2 | Umbøn um yvirtøku av Gundadalshøllini | 848 |
| 219/21 | 21/02200-1 | Tórshavnar Musikkskúli : Dagføring av tilmeldingargjøldum | 853 |
| 220/21 | 16/03313-8 | Klintrifelag Føroya | 855 |
| 221/21 | 16/04764-5 | Umsókn vegna Skatefelagið um stuðul til eina innandura skatepark | 859 |
| 222/21 | 21/03920-1 | Stórhøll | 867 |
| 223/21 | 21/01366-1 | Kirkjugarðsleiðin í Hoyvík | 870 |
| 224/21 | 21/01777-1 | Útstykking oman fyri Argjahamar | 873 |
| 225/21 | 17/03196-1 | Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum | 877 |
| 226/21 | 21/01660-3 | Uppskot frá eigarafelagnum Hoyvíkshædd um skipan av fríøkinum eystanfyri Dýrindalsgøtu | 888 |
| 227/21 | 17/03122-25 | Nýtt tyrvingarpláss : Samstarv við IRF | 891 |
| 228/21 | 19/04645-1 | Dagføring av vegnum Argjavegur/Argjaboðagøta | 898 |
| 229/21 | 20/04029-1 | Ferðslutrygd við Eysturskúlan | 903 |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. september 2021 | Blað nr.: 813<br>Formansins merki: |


| | | | |
|---|---|---|---|
| 230/21 | 20/03873-3 | Umsókn at yvirtaka vegastrekki Ryskigøta, matr. nr. 1347q, Tórshavn | 905 |
| 231/21 | 21/01433-1 | Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Dalavegin (Lagatrøð) | 907 |
| 232/21 | 21/01539-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini við Miðhorn, matr. nr. 1160a, Tórshavn | 910 |
| 233/21 | 21/01736-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt Millum Horna, matr. nr. 1121a, 1121g, 1121h, 1121i og 1121k, Tórshavn | 913 |
| 234/21 | 21/01258-2 | Broyting av byggisamtykt fyri Velbastað, matr. nr. 51a, í sambandi við sethúsaútstykking | 918 |
| 235/21 | 21/03382-1 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað | 921 |
| 236/21 | 20/03062-2 | Umsókn um at broyta matr. nr. 293b, Signabøur til A1 øki, so møguleiki er at byggja sethús á grundstykki | 925 |
| 237/21 | 21/03493-3 | Fíggjarætlan 2022, Tórshavnar kommuna | 927 |
| 238/21 | 17/01122-2 | Víðarimenning av Tórshavnar býarsavni | 932 |
| 239/21 | 18/04076-1 | Møgulig standmynd/minnismerki um Andreu Árting | 946 |
| 240/21 | 20/03974-1 | Frágreiðing um normering á dagstovnaøkinum | 952 |
| 241/21 | 19/01370-1 | Havnin sum súkklubýur | 956 |
| 242/21 | 21/00010-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2021 | 960 |

**Til viðgerðar**

## 207/21 Mál beind í nevndir 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.01.2021 | 38/21 | 21/00012-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 48/21 | 21/00012-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 74/21 | 21/00012-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.05.2021 | 138/21 | 21/00012-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 163/21 | 21/00012-1 |
| 6 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 207/21 | 21/00012-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>30. september 2021 | Blað nr.: 815 |
| | | Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 28. januar 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. mai 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

# 208/21 Bátahylur í Álakeri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 14.01.2019 | 3/19 | 19/00083-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.01.2019 | 4/19 | 19/00083-1 |
| 3 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 6/19 | 19/00083-1 |
| 4 Vinnunevndin | 06.06.2019 | 36/19 | 19/00083-1 |
| 5 Vinnunevndin | 27.06.2019 | 40/19 | 19/00083-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 03.07.2019 | 217/19 | 19/00083-1 |
| 7 Býráðsfundur | 04.07.2019 | 187/19 | 19/00083-1 |
| 8 Vinnunevndin | 13.01.2020 | 5/20 | 19/00083-1 |
| 9 Vinnunevndin | 10.02.2020 | 13/20 | 19/00083-1 |
| 10 Vinnunevndin | 26.02.2020 | 20/20 | 19/00083-1 |
| 11 Vinnunevndin | 11.05.2020 | 44/20 | 19/00083-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 111/20 | 19/00083-1 |
| 13 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 88/20 | 19/00083-1 |
| 14 Havnanevndin | 09.03.2021 | 11/21 | 19/00083-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 39/21 | 19/00083-1 |
| 16 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 77/21 | 19/00083-1 |
| 17 Havnanevndin | 11.05.2021 | 22/21 | 19/00083-1 |
| 18 Havnanevndin | 16.09.2021 | 30/21 | 19/00083-1 |
| 19 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 228/21 | 19/00083-1 |
| 20 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 208/21 | 19/00083-1 |

**Upprunin til málið: Upprunin til málið:**
Býráðið hevur í fíggjarætlanini fyri 2019 avsett 2 mió kr til at fyrireika bygging av bátahyli í Álakeri.
Tað hevur verið tørvur á fleiri bátaplássum í Tórshavn í nógv ár. Við ársenda 2018 vóru tað 200, sum stóðu á bíðilista til bátapláss, og sum øll hava goldið kr. 2.000 í depositum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í Tórshavn og á Argjum eru tilsamans 550 bátapláss. Tað hava ymiskar ætlanir verið frammi um at gera bátahavn, men ongin hevur borið á mál.
Síðani simuleringar vóru gjørdar av bátahyli í Álakeri í 2006, er havnarlagið nógv útbygt, og tann nýggi molin kemur nógv longur vestur. Simuleringar vísa, at havnaútbyggingin betrar um kyrruna í Álakeri.
Nýggj simulering eigur at verða gjørd, áðrenn farið verður víðari.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Í byggisamtyktini er økið lagt av til havnarøki.
Tá bygt verður út á sjógv, skal loyvi fáast frá friðingarmyndugleikunum.
Umhvørvisstovan tekur støðu til árins- og umhvørviskanning.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað er Tórshavnar kommuna, sum rindar fyri íløgur í smábátahavnir. Á fíggjarætlanini fyri 2019 eru avsettar 2 mió. til smábátahavn í Álakeri.
Metingar av einari bátahavn í Álakeri vísa, at tað verður pláss fyri millum 200- og 250 bátum, alt eftir bátastødd og hvussu havnin verður skipað við flótibrúgvum.

Eitt tað fyrsta, sum má gerast, er at gera simulering av Álakeri, fyri at vita um- og hvussu tað ber til at fáa tað kyrt.  Kostnaðurin fyri at gera eina simulering er kr. 200.000

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**
Loyvi má fáast frá friðingarnevndini.
Umhvørvisstovan tekur støðu til árins- og umhvørviskanning.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Mælt verður til at gera byggiprogram.
Eisini verður mælt til at gera simuleringar, at fíggja av íløgum fyri bátahyl í Álakeri.

**Vinnunevndin 14. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2019:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

**Simuleringar:**
DHI hevur gjørt simuleringar.
Longri brimgarðurin er, sum verjir bátahylin, kyrrari verður í bátahylinum. Royndir eru gjørdar við 3 ymiskum longdum.
Í fyrsta uppskotinum er innsiglingin til bátahylin 70 m, í næstu royndini er innsiglingin 50 m breið og í triðja uppskotinum er innsiglingin 30 m breið.
Smælari innsiglingin er, betur verður kyrran í bátahylinum, men munurin á kyrruni har innsiglingin er ávikavist 50- og 30 metur er lítil.
Simuleringar er gjørdar við at samanbera kyrruna av verandi bátaplássum í Havn, við bátaplássini í nýggju bátahavnini í Álakeri.
Um tann loysnin, har innsiglingin er 50 metur verður vald, sigur simuleringin, at kyrran verður eins góð og miðal kyrran er við bátaplássini á Skálatrøð.

Ein leinging av molanum upp á 20 metur er mett at kosta kr. 1,5 mió

**Byggiprogram (úrdrag):**
Umleið 230 bátapláss, sum øll eru við flótibrúgvar.

Brúgvar og bátabummar vera av sama slagi, sum nýggjasta brúgvin á Skálatrøð.

Økið á landi verður víðka við 2.000 m$^2$.

Fram við sjóvarmálanum verður gjørdur ein 120 m langur grótskrái upp til lendið omanfyri.

Neyðugt verður at dýpa eitt umleið 100 m stórt øki útfyri neystini á vestaru síðu á Álakersvík niður á 2 m dýpi.

210 m langt grótkast, sum er 4 m. høgt.

Nýggjur dráttur til kappróðrarbátar.

Streymúttøk og vatn til bátar, verður á øllum brúgvunum.

Arbeiðið verður boðið út í innbodnari licitatión.

Licitatión í februar 2020.

Arbeiðið liðugt í apríl 2022.

**Loyvir:**
Loyvi má fáast frá friðingarnevndini.
Byggisamtyktin má regulerast.
Byggiloyvi.

**Tilmæli:** Havnarmeistarin mælir til:
at taka undir við byggiskránni, dagfest 20-05-2019,
at projektera og bjóða arbeiðið út
at søkja um, og fáa neyðug loyvir.

**Vinnunevndin 06. juni 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tá projekteringin er liðug, er kanska rættast at leggja málið aftur fyri nevndina, har støða verður tikin til at bjóða arbeiðið út.

Kommunan hevur í fíggjarætlanini fyri 2019 avsett 2 mió til smábátahavn í Álakeri.

| | |
|---|---:|
| Avsett í fíggjarætlan 2019: | 2.000.000 |
| Brúkt til simuleringina | 112.000 |
| Flutt til bylgjubrótara í Kaldbaksbotni | 345.000 |
| Eftir til projektering og fyrireiking | 1.543.000 |

**Tilmæli:** Havnarmeistarin mælir til:
at taka undir við byggiskránni, dagfest 20-05-2019
at projektera
at søkja um, og fáa neyðug loyvir.
at játta í mesta lagi kr. 1.543.000 til projektering og fyrireiking

**Vinnunevndin 27. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 03. juli 2019:** Samtykt at taka undir við Vinnunevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juli 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í fíggjarætlanini hjá Tórshavnar kommunu fyri 2020, eru 10 mió avsettar til bygging av smábátahavn í Álakeri.

Projekteringin er komin so langt, at arbeiðið væntandi kann bjóðast út primo mars 2020.

Í fyrsta umfari er ætlanin at gera brimgarðin og økið fram við sjóvarmálanum.

**Tilmæli frá havnarmeistranum**: Mælt verður til at bjóða arbeiðið út í innbodnari licitatión.

**Vinnunevndin 13. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og málið kemur fyri aftur í vinnunevndini á fyrst komandi fundi til kunningar.

**Ískoyti:**
Tað fyrsta byggistigið, sum er at gera brimgarðin og økið fram við sjóvarmálanum krevur ikki nógv arbeiðsfólk. Tað merkir, at tað helst eru fleiri fyritøkur, sum kunnu útføra arbeiðið. Ein máti at fáa fleiri fyritøkur at bjóða, er at bjóða út í almennum útboði.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Í staðin fyri at bjóða út í innbodnari licitatión, verður mælt til at bjóða arbeiðið út í almennum útboði.

**Vinnunevndin 10. februar 2020:** Málið bleiv útsett.

**Vinnunevndin 26. februar 2020:** Samtykt at bjóða arbeiðið út í innbodnari licitatión.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er boðið út í innbodnari licitatión millum 7 arbeiðstakarar og licitatiónin varð hildin hin 28. apríl á Havnaskrivstovuni. Hesi tilboð komu inn (j.nr. 19/00083-16):

| **Arbeiðstakari** | **Tilboðsupphædd** | |
|---|---|---|
| SP/F Plan | kr. | 24.683.681,30 |
| SP/F Maskingrevstur | kr. | 26.119.645,00 |
| Andrias Berg SP/F | kr. | 17.604.145,00 |
| Sp/f Ian Rasmussen | kr. | 15.270.060,00 |
| SP/F Grettir | kr. | 17.494.690,00 |
| P/F Tórhall Hansen | kr. | 14.006.468,00 |
| Spf Konsax | kr. | 16.222.063,27 |
| Sp/f Ian Rasmussen, Alternativt boð | kr. | 14.007.863,00 |

Ráðgevin hevur eftirkannað tilboðini og mælir í skrivi dagfest 30/4, j.nr. 19/00083-17 til at taka av lægsta tilboð frá Tórhalli Hansen áljóðandi kr 14.006.468,00.

Tórshavnar Havn og ráðgevin hava havt innleiðandi samráðingar við P/F Tórhall Hansen um ymisk viðurskifti, m.a. tíðarætlanina. Tíðarætlanin fyri arbeiðstøkuna var upprunaliga sett til 8 mánaðir frá 1. mai 2020 og árið út. Vit eru farin framvið 1. mai 2020 og tí er ikki realistiskt at fáa arbeiðið liðugt til 31/12-2020. Tað tekur eisini tíð at starta arbeiðið upp, og summarfrítíðin stendur fyri framman. Mett verður tí, at ein tíðarætlan á 10 mánaðar frá 1. juli er meiri realistisk. Arbeiðið verður tá liðugt 30/4-2021.

Sum nevnt í málslýsingini umfatar útbodna arbeiðið at gera brimgarð og økið fram við landi, t.e. grótskrái, trappur, gongubreyt, kantsteinar, fundament til ljóssteyrar og festir til bátabrúgvar.
Tað sum síðani er eftir at gera, er at útvega sjálvar bátabrúgvarnar, tekniskar installatiónir (el og vatn) umframt liðugtgerð av økinum á landi, so sum avrætting og regulering av lendi, avvatning, asfaltering v.m.

**Fíggjarlig viðurskifti:**

| **Kostnaður** | |
|---|---|
| Tilboð Arbeiðstøka P/F Tórhall Hansen | 14.006.468 kr |
| Ókent (8%), fyrireiking og projektering, fakeftirlit og byggileiðsla | 2.068.500 kr |
| Aldusimulering | 112.000 kr |
| **Kostnaður í Alt** | **16.187.000 kr** |
| | |
| **Fígging** | |
| Avsett á FÆ 2019 til bátahyl í Álakeri | 2.000.000 kr |
| Flutt til bylgjubrótara í Kaldbaksbotni | -345.000 kr |
| Flutt til bátadrátt í Nólsoy | -600.000 kr |
| Avsett á FÆ 2020 til bátahyl | 10.000.000 kr |
| **Tøk fígging í alt í 2020** | **11.055.000 kr** |
| | |
| **Írestandi fígging** | **5.132.000 kr** |
| | |

Á langtíðaríløguætlanini eru í 2021 avsettar 15 mió. kr. til bátahyl í Álakeri.

**Tilmæli**
Havnameistarin mælir til:
- At taka av tilboðnum frá P/F Tórhalli Hansen áljóðandi kr. 14.006.467,00 og gera sáttmála um arbeiðið
- At játta kr 10.000.000 av løgukarminum í 2020 deild 7476 smábátahavnir.
  At avseta og játta kr 5.132.000 til arbeiðið av íløguætlanini fyri 2021.

**Vinnunevndin 11. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Tróndur Sigurðsson legði fram broytingaruppskot um at fara í samráðingar við arbeiðstakaran um møguleikan at flyta grótið til bátahylin við báti av Glyvursnesi.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við tveimum atkvøðum fyri og trimum ímóti.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um tilmæli frá vinnunevndini, ið varð samtykt við trimum atkvøðum fyri, ongari ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

Málið beint í býráðið umvegis náttúru- og umhvørvisnevndina og byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Viðvíkjandi byggiloyvi til bátahylin í Álakeri, so hevur kommunan fingið eina umsókn frá Tórshavnar Havn, j.nr. 20/01445. Hendan umsókn verður viðgjørd, lýst og løgd fyri byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevnd og náttúru- og umhvørvisnevndina.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot frá Tróndi Sigurðsson um at beina málið í avvarandi nevndir áðrenn endaliga støðutakan, ið fall við 5 atkvøðum fyri og ongari blankari og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunnvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Annfinn Brekstein.

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

Ískoyti:
**Dýping við bátabrúgv**
Við tað innastu bátabrúnna, sum skal leggjast út í Álakeri, verða umleið 34 bátapláss, alt bátastøddini.
Í einum parti av bátabrúnni er tað so grunt, at 7 bátapláss fella burtur, sum merkir at tað ikki verða meira enn 27 pláss.

**Dýping framman fyri neyst:**
Framman fyri tey sunnastu neystini koma fleiri kneysar undan á fjøru, soleiðis at tað er trupult at fóta bátin, seliga á fjøru.
Tað er eitt ynski frá neystamonnunum at fáa dýpt.

Áðrenn arbeiðið bleiv boðið út, var møguleikin at dýpa við spreinging umrøddur, men gingið var burtur frá hesum, tí tryggingar treytirnar vóru so strangar, tí oljutangarnir vóru so tætt uppat.

Ein annar møguleiki er at brekka við einari stórari maskinu, men tað er trupult at geva eitt tilboð upp á hetta.

P/F Tórhall Hansen, sum stendur fyri arbeiðinum at gera brimgarðin, metur at arbeiðið kann gerast fyri kr. 250.000.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at játta kr.250.000 til arbeiðið, sum verða fíggjaðar av konto 7476 smábátahavnir, L00001 løgukarmar fyri árið.

**Havnanevndin 09. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Samtykt at taka undir við Havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera grótkast, verður væntandi liðugt seint í summar.

Næsta byggistigið er liðugtgerð av økinum á landi, so sum avrætting og regulering av lendi, avvatning, asfaltering, ljós og tekniskar installatiónir v.m.

Hetta arbeiðið er um at verða klárt at bjóða út.

**Tilmæli frá havnameistaranum**: Mælt verður til at arbeiðið, at gera bátaøkið á landi í Álakeri, verður boðið út í innbodnari licitatión.

**Havnanevndin 11. mai 2021:** Nevndin mælir til at samráðast víðari við entreprinørin um avtalu um liðugtgerð av arbeiðinum.

**Ískoyti:**.

| | | | |
|---|---|---|---|
| Verandi støða í játtan: | | | |
| Avsett fyri árini 2019, 2020 og 2021: | | | 27.000.000 |
| Játtað: | | | |
| Fyrireiking projektering | 1.431.000 | | |
| Simulering | | 112.000 | |
| Arbeiðstøka P/FTórhall Hansen | 15.132.000 | | |
| Dýping | | 250.000 | |
| Flutt til bylgjubrótara í Kaldbaksbotni | | 345.000 | |
| Flutt til bátadrátt í Nólsoy | | 600.000 | |
| Flutt til víðkan av sølutorginum í Vágsb. | 2.076.000 | 19.946.000 | |
| Eftir av áður avsett. | | | 7.054.000 |

Liðugtgerð av arbeiðinum sum er eftir er deilt upp í trý:

- Avrætting og regulering av lendi, avvatning og asfaltering.
- Ljós og tekniskar instalatiónir
- Bátabrúgvar og bummar.

**Avrætting og regulering av lendi, avvatning, reinsiverk og asfaltering v.m:**
Samráðingar hava verið við entreprenørin, P/F Tórhall Hansen, sum ger fyrsta byggistigið, at gera brimgarðin.
P/F Tórhall Hansen kann gera arbeiðið fyri kr.8.626.455,-

*Róðrarfelagið Knørrur:* Í nógv ár hevur Róðrarfelagið Knørrur havt ynski um, at fáa ávíst eitt hóskandi øki til bygging av neysti.
Í sambandi við útbyggingina av bátahylinum í Álakeri, hava fleiri royndir verið gjørdar, fyri at finna eina hóskandi staðseting.
Róðrarfelagið eru nøgdir við eina staðseting oman móti sjónum í tí sunnara horninum út móti brimgarðinum, skrátt niðan fyri neystið hjá Havnar Róðrarfelag.
Her er pláss fyri einum grundstykki upp á umleið 750 $m^2$.
Um semja er um at hetta er tann rætta staðsetingin, eigur fyrireikingin til byggingina at verða gjørd í somu entreprisu. Her í liggur, at tað má gerast ein betongveggur móti jarðarmuninum, sum so eisini kann brúkast sum grund til nýggja neystið.
Hendan broytingin viðførir ein meirkostna, í mun til tilboðið frá P/F Tórhalli Hansen, upp á kr. 500.000,-

**Ljós og tekniska instalatiónir:**
Entreprisan umfatar ljós á økið og bátabrúgvarnar, umframt landstreym til bátabrúgvarnar.
Verandi elveiting til smábátar hevur roynst væl, og verða el-standararnir tí av tí sama slagnum.
Bæði LM og Install kenna til verandi el-standarar, og hevur arbeiðið tí verið boðið út millum teir.
Tilboðið frá LM var upp á kr 2.434.811,27 og tilboðið frá Install var upp á kr 1.763.024

**Bátabrúgvar, bummar og dráttur til róðrarfeløgini**
Tað eru fleiri nýggjar brúgvar komnar seinnu árini, eins og stórur partur av bátabummunum eru nýggir. Hvørki bátabrúgvar ella bummar verða gjørdir í Føroyum. Nógv at teimum bummunum, sum eru keyptir til Føroyar seinnu árini, hava ikki havt tann ynskta kvalitetin, sum krevst til tað føroyska veðurlagið, tí hevur Tórshavnar havn, saman við einum svenskum ráðgevara, tillagað teir bummarnar, sum vit nú hava og hava havt góðar royndir av. Saman við tí svenska rágevaranum, hava vit fingið prís upp á 430 metrar av bátabrúgvum og bátabummar til umleið 200- 220 bátar og bátadrátt til róðrarfeløgini.

Brúgvarnar eru av merkinum Rixø, meðan bummarnir og bátadrátturin verða gjørdir av Wilen Marin AB.

Um so er, at kursurin er tann sami tá vit gjalda, sum hann er nú, kosta bátabrúgvar og bummar, bátadráttur og útlegging íroknað ketur og festir kr. 11.800.000.

Hesin prísurin er treytaður av, at vit lata ordran inn í september í ár, tí tá kann framleiðslan fara fram í vetur, tá tað ikki er so stórt trýst á framleiðsluni.
Um vit lata ordran inn í september 2021, og rinda eitt gjald upp á kr. 2,5 millión, kunna brúgvar og bummar latast okkum í apríl- mai 2022.
Um vit bíleggja fyrst í 2022, kunnu vit ikki vanta át fáa brúgvar o.a, fyrr enn oktober-november 2022, og helst til ein hægri prís

Mælt verður til at taka av tilboðunum frá Rixø og Wielen Marin AB.

Áðrenn brúgvarnar koma, skulu ketur og botnfestir gerast, og síðani skulu brúgvarnar fáast upp á pláss og bummar leggjast út.
Starvsfólk hjá Tórshavnar havn hava royndir við hesum arbeiðinum, og er ætlanin at teir skulu standa fyri hesum arbeiðinum, og leiga útgerð og fólk uttanífrá eftir tørvi.

**Byggilleiðsla og óvantað:**
Óvantað eftirlit og byggileiðsla er mett til kr.2.250.000

Samlaður kostnaður:

| | |
|---|---|
| Lendisarbeiði | 8.623.455 |
| Grundøki Knørrafelagið | 500.000 |
| El- og instalatiónir | 1.763.000 |
| Brúgvar og bummar | 11.800.000 |
| Byggileiðsla og óvantað | 2.250.000 |
| Samlaður kostnaður | 24.936.455 |

| | | |
|---|---|---|
| Eftir av játtan upp á 27 mió eru | kr | 7.054.000 |
| Samlaður kostnaður fyri 2. byggistig | kr | 24.936.455 |
| Manglandi játtan | kr | 17.882.455 |

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at játta kr 24.936.455 til liðugtgerð av bátahylinum í Álakeri.

At liðugtgerðin verður fíggjað við kr. 7.054.000 í 2021 deild 7476 smábátahavnir,
og at avseta kr 17.882.455 til arbeiðið av íløguætlanini fyri 2022.

At seta bátabrúgvar og bátabummar í ordra í sept/okt 2021, og samstundis rinda 2,5 mió. í depositum.

**Havnanevndin 16. september 2021:**

**Ein meiriluti:** Kári Johansen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Birgir Nielsen samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Ein minniluti:** Elsa Berg tekur undir at bíleggja bátabrúgvarnar, men at arbeiðið til lendið skal bjóðast út eftirsum tíð er til tað og møgulig sparing er í hesum.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í Havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Elsu Berg:
Mælt verður til at taka undir við at bíleggja bátabrúgvarnar, men at arbeiðið til lendið skal bjóðast út eftirsum tíð er til tað og møgulig sparing er í hesum
Broiytingaruppskotið fall við 5 akvøðum fyri, 7 ímóti og 1 blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jón Kragesteen, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Blankt atkvødd: Birgir Nielsen.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari blankari atkvøðu og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jón Kragesteen, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Elsa Berg.

# 209/21 Lendi. Breiðkan av Marknagils og Landavegnum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 3/20 | 19/01357-35 |
| 2 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 8/20 | 19/01357-35 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 194/21 | 19/01357-35 |
| 4 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 209/21 | 19/01357-35 |

**Upprunin til málið:** Verkætlan. Breiðkan av Marknagils og Landavegnum.

**Lýsing av málinum – samandráttur.** Kommunan hevur tørv á at ogna sær lendi framvið Marknagils og Landavegnum. Sí yvirlit. Skjal nr. 19/01357-78

Umsitingin hevur havt samráðingar við eigararnar, men er enn ikki komið á mál við øllum eigarunum. Ráð, ráðgevandi verkfrøðingar, virðismetir lendið til kr. 1.250 fermeturin. Onkrir av eigarunum meta at virðismetingin er ov lág, og vísa til at ógrivin grundstykkir á uml. 500m2, verða lýst til sølu fyri ein prís umleið milliónina svarandi til ein fermeturprís á kanska omanfyri 2.000 kr.m2.

Kommunan keypir lendið fyri 2.000 kr.m2.

Arbeiðið inni á økinum verður gjørt í samráð við eigararnar, og er útgangstøðið, at kommunan sum minimum endurskapar økini á sama støðið sum frammanundan, men við nýggjum tilfari. Í tveimum førum er harumframt talan um ampaendurgjald, tí neyðugt verður at rinda fyri endurskipan av grundøkjum.

Í tveimum førum verður talan um at geva eigaranum annað lendið ístaðin fyri tað lendi sum hann missir. Hetta verður gjørt við marknaðarumskipan.

| Matr.nr. | | Vídd m2. | Keyp/ampar. kr. | |
|---|---|---|---|---|
| 1173c | Marknagilsvegur. ( Føroya Landstýri ) | 86 | 172.000,- | |
| 919 b | Landavegur 98 | 160 | 0,- | m.u |
| 1097a | Hornið Landavegur Marknagilsv. | 61 | 122.000,- | |
| 1094d | Marknagilsvegur uml. | 154 | 308.000,- | |
| 918c | Landavegur 90. uml. | 22 | 74.000,- | |
| 918d | Landavegur 88. uml. | 25 | 102.500,- | |
| 918f | Landavegur 86. uml. | 24 | 0,- | m.u |
| Upphædd tls. | | 532 m2. | **778.500,-** | |

Kommunan hevur enn ikki fingið endaligt svar frá øllum eigarunum, og kunnu broytingar tí koma ímun til verandi. Tað hevur stóran skund at fáa játtan til avtalurnar viðvíkjandi matriklunum 918c, d og f.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. september 2021 | Blað nr.: 826 |
| | Formansins merki: |

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl. Avtalur. 19/01357 – 66 – 67 – 68 – 69 – 70 - 71 – 77. Yvirlit 78 ) og kortyvirlit. 19/011357 – 1.**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at taka undir við fyriliggjandi avtalum um keyp av lendi v.m. fíggjað av L81036 Liðugtgerð av Hans Andriasargøtu.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Samtykt at taka undir við málinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**

Viðvíkjandi matr.nr. 918c, Landavegur 90. uml.

Arbeiðið við vegi og gongubreyt er gjørt, men manglar at stoypa garðin, sum verður lagdur innanfyri lyktasteyrarnar. Mett verður at tørvur verður á at keypa meir lendi uml. 12 – 15 fermetrar, avtalaði fermeturprísurin er 2.000,- kr. = mettur meirkostnaður uml. 30.000,00 kr.

Sí uppskot til nýggja avtalu skjal nr. 19/01357–120.

**Tilmæli.**

Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at taka undir við broyttari avtalu nr. 19/01357–120, um keyp av lendi v.m. fíggjað av L81036 Liðugtgerð av Hans Andriasargøtu.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

# 210/21 Matr.nr. 138dq, Hoyvík. Afturkeyp/makaskifti.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 195/21 | 21/01606-6 |
| 2 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 210/21 | 21/01606-6 |

**Upprunin til málið.** Kommunan hevur tørv á at keypa matrikkul 138dq. Til felagshús. Skipan av økinum kring Hoyvíksvøll.

**Lýsing av málinum.**

Kommunan arbeiðir við at gera eina heildarætlan fyri Karlamagnussarbreyt, sí mál 20/00622 og umfatar ein partur av heildarætlanini, at skipa økið kring Hoyvíksvøll, sí mál 20/00040 og viðheft kortskjal skjal 21/01606-8

Framtíðarskýlið v/felagshølum ætlast at verða staðsett á vestursíðuni, men verður framhaldandi stórur partur av brúkarunum/áskoðarunum at koma til vøllin frá eystursíðuni, tvs. Karlamagnusarbreyt.

Í uppskotinum er felagshús sett á matrikkulin. Frammanfyri ber eisini til at gera skráa við tribunum. Í mun til vøllin og nýtsluna har, verður tí tørvur á fasilitetum, sum kundi staðið á teimum báðum matrikklunum, sum hoyra til útstykkingina á Karlamagnussarbreyt – tað veri seg goymsla, almenn vesi ella eitthvørt borgaravent endamál í Hoyvík.

Kommunan hevur havt samráðingar við eigaran av matr.nr. 138dq, um keyp, og er nú semja um, at arbeiða fyri einum leisti um makaskifti.

Í hesum sambandi hevur Meklarafelagið Skyn, gjørt virðismetingar av grundstykkinum og tveimum møguligum makaskiftis grundstykkjum.

| Matr. nr. | Vídd m2. | Mest loyvda bygging. | Mett virði |
|---|---|---|---|
| 138dq | 135 + 97 = 232 | 405 | 2.300.000,00 |
| 135nn | 427 | 252,6 | 1.400.000,00 |
| 135pt | 318 | 254,4 | 1.400.000,00 |

Eigarar eru sinnaðir til at fremja makaskifti millum matr.nr. 138dq og 135pt, og at fáa munin í virði 0,9 mill. kr.

Eitt møguligt makaskifti krevur loyvi frá Kommunala eftirlitinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Kunngerð um alment útboð av kommunalari fastogn

Við heimild í § 44, stk. 1, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin) verður ásett:

**§ 1.** Um ikki annað er ásett í lóggávuni, skal fastogn hjá kommununi verða boðin út alment, áðrenn ognin verður seld, sbr. tó § 2.

**§ 2.** Fastogn nýtist tó ikki at verða boðin alment út, um talan er um

*Stk. 2.* Við góðkenning frá landsstýrismanninum kann verða vikið frá kravinum um alment útboð í sambandi við makaskifti og tá tað annars eru serlig viðurskifti, ið tala fyri, at fastognin kann verða seld uttan alment útboð.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.**
Virðismetingar, matr.nr. 138dq, 135nn, 135pt.
Málsviðgerð 20/00622 Heildarætlan fyri Karlamagnussarbreyt.
Málsviðgerð 20/00040 Skipan av økinum kring fótbóltsvøllin.
Kort skipan av økinum kring fótbóltsvøllin.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:** Kommunustjórin mælir býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at gera eina avtalu við verandi eigarar av matr.nr. 138dq, um møguligt makaskifti.

Avtalan umfatar, at kommunan keypir matr.nr. 138dq, fyri 2,3 mill. kr. og keypa eigarar av matr.nr. 138dq óbygda grundstykkið matr.nr. 135pt frá Tórshavnar kommunu fyri 1,4 mill. kr. Munurin í virði 0,9 mill. kr. verður rindaður eigarum.

Avtalan er treytað av góðkenning frá kommunala eftirlitinum.

Fígging av keyp/sølu konto 6175.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

## 211/21 Víðarisøla matr.nr. 138y, Hoyvík.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 192/21 | 21/03148-2 |
| 2 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 211/21 | 21/03148-2 |

**Upprunin til málið.**
Umsókn frá eigara.

**Lýsing av málinum.**
Matr.nr. 138y, Hoyvík. ( Karlamagnussarbreyt )
Byggifelt 267m2. Søluprísur kr. 473.258,65

Eigari søkir um heimild til at flyta grundstykkið í nýtt sjálvstøðugt smápartafelag, undir stovnan, og sum núverandi eigarin skal eiga, evt. saman við øðrum.

Nýggja felagið byggir ætlandi nýggjan íbúðar/vinnubygning á grundstykkið. Byggiloyvi dagfest 14.07.2021 ( skjal 21/00216-16 ) fyriliggur til verkætlanina.

Søluprísurin í víðarisøluskeytinum verður samsvarandi upprunaprísin kr. 473.258,65 og vísir til verandi tinglýsar servituttir.

**Lógir, ásetingar o.a.** Skeytisásetingar.

**Upplýsingar frá umsitingini.**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl:**
19/00503-5. Byggiloyvi til arbeiðskúrar 2019. ( Verandi nýtsla av stykkinum )
21/00216-14. Byggiloyvi til vinnu/íbúðarbygning. Dagfest 22.06.2021
21/03148-3. Kortskjal.
21/03148-1. Umsókn um víðarisølu.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla til at geva umsøkjara heimild til at selja grundstykkið til nýtt felag. Ein treyt fyri heimildini er at viðarisølan verður til sama prís sum upprunaskeytið kr. 473.258,65 og vísir til verandi tinglýstar servituttir.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

# 212/21 Víðarisøla matr.nr. 203m, Kollafjørður.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 193/21 | 21/03699-3 |
| 2 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 212/21 | 21/03699-3 |

**Upprunin til málið**: Umsókn frá eigara, um víðarisølu av óbygdum grundstykki.

**Lýsing av málinum.**

Matr.nr. 203m, Kollafjørður er til víddar 566m2, og er partvís útgrivið og planerað.

Talan er um eitt grundstykkið í eini útstykking hjá Kollafjarðar kommunu frá uml. 1990.

Ymiskir eigarar hava átt stykkið, sum kommunan keypti aftur frá táverandi eigara í 2017.

Kommunan lýsti grundstykkið til sølu hjá ognarmeklara, har verandi eigarar høvdu hægsta boð og keyptu stykkið við skeyti sum er tinglýst í november 2017. Keypsprísur tkr. 500.

Kommunan hevur útskrivað byggiloyvi til sethús 10.08.2020.

Verandi eigarar ynskja at selja teirra grundstykki til teirra dóttur við maka, sum ætlandi beinanvegin fara undir bygging av sethúsum , sí teirra byggiloyvi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Tinglýstir servituttir, millum annað eru álagdar treytir um bygging v.m. og hevur kommunan tinglýstan keypsrætt um nevndu ásetingar ikki verða hildnar.

Tað er ikki tinglýstur servituttur um at tað er ein treyt fyri víðarisølu at eigari skal búgva í húsunum eitt áramál, áðrenn sølu.

Í prinsippinum kann verandi eigari standa fyri bygging av húsunum, fyri síðani at selja liðugt bygdu húsini, uttan at tað tá er neyðugt, at søkja kommununa um loyvi.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.** Líknandi viðgerð í málum 19/03004 – 19/04251 og 21/00637

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl:** Umsókn um loyvi til víðarisølu. Kortskjal. Servituttskjøl v.m.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. september 2021 | Blað nr.: 833<br><br>Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☒**

**Tilmæli:** Vísandi til at stykkið er selt í fríðari sølu til marknaðarvirði, mæla kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni til at loyva víðarisølu av grundstykkinum.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>30. september 2021 | Blað nr.: 834<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 213/21 PF Kemilux. Umsókn um keyp av lendi at leggja saman við grundstykki matr.nr. 1083r, Mykinesgøta 1. Tórshavn.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 196/21 | 21/03506-2 |
| 2 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 213/21 | 21/03506-2 |

**Upprunin til málið.**
Umsókn um keyp av lendi. dagfest 11.08.2021.

**Lýsing av málinum:**
P/F Kemilux hevur sent kommununi umsókn um keyp av 299,5 fermetrum av lendi, at leggja saman við teirra verandi ogn matr.nr. 1083r, Mykinesgøta 1, Tórshavn.

Felagið vísir á, at vegna økta framleiðslu er bráfeingistørvur á at útbyggja virki.

**Lógir, ásetingar o.a. Kommunustýrislógin. Kunngerð um alment útboð.**

**Upplýsingar frá umsitingini.**

Tekniska umsiting hevur lati gjørt eitt uppskot til nýggja vegaloysn. Sum er liggja tveir vegir lið um lið. Vegaloysnin umfatar at talan framyvir ætlandi verður um ein veg, sum liggur lægri í lendinum, og verður økið sum P/F Kemilux søkir um, tá ikki partur av vegnum longur. S kortskjal 21/000676-1.

Býráðið hin samtykti 23. Juni 2021, at heimila umsitingini at bjóða arbeiði út í innbodnari lisitatión. J. nr. 21/00676.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Umsókn frá Kemilux.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla til at beina málið í teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at selja lendið tá ið endalig vegalinja er løgd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>30. september 2021 | Blað nr.: 836<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

## 214/21 Matr.nr. 255au, Kirkjubøur,Argir. Keyp av óbygdum grundstykki.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 197/21 | 21/03515-4 |
| 2 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 214/21 | 21/03515-4 |

**Upprunin til málið**. Kommunan hevur rykt uppá byggifreist.

**Lýsing av málinum.**

Matr.nr. 255au, Kirkjubøur, Argir. ( Útstykking Klingurstjørn 1 ) Skeytið er tinglýst 28.02.2018. Søluprísur 595.886,00

Kommunan hevur rykt uppá byggifreist. Eigari ætlar sær ikki at byggja, og er sinnaður til at selja kommununi grundstykkið aftur

At fremja eina nýggja útlutan av grundstykkjunum so hvørt sum tey koma innaftur, verður mett trupult og umsitingarliga krevjandi.

Mett verður at stykkini so hvørt tey koma innaftur, í fyrsta lagið kunnu bjóðast møguligum umsøkjarum við bráfeingis tørvi, og í øðrum lagi verða seld í fríðari sølu, til ásettan minsta prís, sum verður samsvarandi meting frá meklara, tó ongantíð fyri lægri prís enn afturkeyps prís.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin. Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari ogn. Tinglýstir servituttir. Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl. Skeyti. Kortskjal.**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at keypa grundstykkið frá eigara, og at afturrinda eigara kr. 595.886,00
Seljari rindar tinglýsingarútreiðslur.

Tá ið kommunan er tinglýstur eigari av grundstykkinum, verður grundstykkið í fyrsta lagið bjóða møguligum umsøkjara við bráfeingis tørvi, og í øðrum lagi lýst til sølu hjá ognarmeklara.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at keypa stykki aftur og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari**.**

Fyri atkvøddu: Heðin Mortense, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristiannu Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jón Kragesten, Gunvør Balle, Annika Olsen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddi: Ruth Vang.

## 215/21 Val av tveimum limum í nevndina fyri Barnamentanarheiðursløn Tórshavnar býráðs

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.01.2021 | 13/21 | 20/04154-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 215/21 | 20/04154-1 |

**Málslýsing:**
Sambært reglugerðini fyri Barnamentanarheiðursløn Tórshavnar býráðs eru fimm limir í nevndini. Barnabókavørðurin á Býarbókasavninum er fastur limur, skúlabókavørðirnir við kommunalu skúlarnar í kommununi velja ein lim og Tórshavnar býráð velur tveir limir. Harafturat er formaðurin í mentamálanevnd Tórshavnar býráðs fastur limur og er formaður í nevndini.

Í nevndini sita: Anna Malan Jógvansdóttir, Bjørg Dam vald av Tórshavnar býráð.

Sostatt skal býráðið velja tveir limir í nevndina.

Lutfalsval

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 2 limir í nevndina.

**Býráðsfundur 14. januar 2021:** Vald vórðu Bogi Andreasen og Rigmor Dam.

**Ískoyti:**
Bogi Andreasen hevur boða frá at hann tekur seg úr nevndini.

**Tilmæli:**
Mælt verður býráðnum til at velja nýggjan lim í nevndina.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt at velja Jóhannu Andreasen sum lim í nevndina.

## 216/21 Vegna nevndina í Bridgehúsinum Pól E. Egholm : Umbøn um fund viðvíkjandi Brigdehúsinum í Gundadali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 17/18 | 16/01316-10 |
| 2 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 161/18 | 16/01316-10 |
| 3 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 268/20 | 16/01316-10 |
| 4 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 257/20 | 16/01316-10 |
| 5 Mentamálanevndin | 27.04.2021 | 107/21 | 16/01316-10 |
| 6 Fíggjarnevndin | 28.04.2021 | 101/21 | 16/01316-10 |
| 7 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 117/21 | 16/01316-10 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2021 | 104/21 | 16/01316-10 |
| 9 Mentamálanevndin | 09.06.2021 | 158/21 | 16/01316-10 |
| 10 Mentamálanevndin | 22.06.2021 | 186/21 | 16/01316-10 |
| 11 Fíggjarnevndin | 23.06.2021 | 173/21 | 16/01316-10 |
| 12 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 175/21 | 16/01316-10 |
| 13 Mentamálanevndin | 15.09.2021 | 219/21 | 16/01316-10 |
| 14 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 203/21 | 16/01316-10 |
| 15 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 216/21 | 16/01316-10 |

**Upprunin til málið:**
Brigdehúsið hevur vent sær til kommununa fyri at fáa avklára framtíðina hjá húsi felagsins, ið stendur á kommunalari grund.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í 2016 lat nevndin fyri Brigdehúsið skriv til kommununa viðv. verandi loysn fyri Brigdehúsinum í Gundadali. Húsið fevnir um virksemi hjá teimum 3 brigdefeløgunum í Havn. Sí hjálagt skriv.

Felagið hevur 3 uppskot til loysn:

1. At Tórshavnar kommuna veitir Brigdefeløgunum nýggj og egnaði høli. (sí hjálagt skriv við kravfesting).
2. At Tórshavnar kommuna yvirtekur Brigdehúsið í Gundadali nú og fremur tær neyðugu ábøturnar og bridgefeløgini fáa framíhjárætt at nýta húsið.
3. At Tórshavnar kommuna leingir verandi leiguavtalu í minst 10 ár, og hjálpir bridgefeløgunum at fíggja neyðugar íløgur.

Síðani skrivið hevur umsitingin samskift við brigdehúsnevndina við atliti at pkt. 1 uttan at hetta hevur ført við sær nakað sum felagið tekur undir við.

Felagið keypti húsið í 1992 frá Havnar Bóltfelag (sí hjálagt skjal) og fekk leigusáttmála við kommununa

sama ár (sí hjálagt skjal). Í grein 2 er ásett at leigumálið ikki kann vera uppsagt fyrrenn til 1. Februar 2017, uttan so at leigarin í aðrar mátar ikki hevur hildið sáttmálan.

Á fundinum fer umsitingin at gjøgnumganga málið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/læmttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin vendur aftur til nevndina við ítøkiligum tilmæli til ein komandi fund.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Málið umrøtt.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti**
17. Januar 2018 var ástaðarfundur millum umsitingina og nevndina í Brigdehúsinum og limafeløgunum. Myndir eru tiknar, ið eru tøkar í hjáløgdum skjali. Sí eisini avrit av virðismeting, ið Sp/f Protek gjørdi í 2011.

Eftir fundin fær kommunan skriv har feløgini siga:
*"At bridgefeløgini ikki hava nakað serstakt ynski um at eiga hølir ella hús til sítt virksemi. At tað snýr seg um at hava føst, góð og væl egnaði høli til virksemi, við so lítið stríð og so lítlan kostnað sum gjørligt – uppá langt sikt. At Tórshavnar kommuna (TK) kanska skal nýta øki har vit eru, og at TK ynskir at skapa góðar karmar fyri ítrótt og frítíðarvirksemi í kommununi, eigur tí at kunna loysast skjótt, trygt og gott.*

*Hóast húsini treingja til ábøtur, so hava tey eitt virði á t.d. 2 - 3 mió kr, og tí ynskja bridgefeløgini, at ein avtala við TK avspeglar tann veruleikan, at TK við keyp og yvirtøku av húsinum fáa eitt stórt virði sum feløgini hava skapt.*

*Møguleiki 1 omanfyri kann bera til, og Frúutrøð bleiv nevnt. Ímóti talar, at TK ynskir at selja ognir ið "leypa av"og at bridgefeløgini trívast væl í Gundadali.*
*Møguleiki 3 omanfyri hevur ein avmarking í, at TK bert kann stuðla við 33%, og at bridgefeløgini ikki ynskja at verða byggiharri í slíkari verkætlan, og ei heldur at taka upp lán.*

*Við at tillaga møguleiki 2 ynskja vit tí fylgjandi:*
*At TK keypir bridgehúsið fyri kr 1,00, pluss møgulig skuld og aðrar skyldur. Afturfyri fáa feløgini ein 30 ára leiguavtala fyri kr 0,00 um árið, og soleiðis at bert rakstrarútreiðslurnar verða goldnar av feløgunum. (alternativt keypir TK nú, men yvirtaka dispositiónsrættin um 30 ár). (alternativt keypir TK fyri kr 3 mió, og feløgini leiga frá TK fyri 100.000 p.a. í 30 ár – men tað gevur tað sama). Langtíðar viðlíkahald og umvælingar verða framdar av TK eftir avtalu við feløgini. Innibera umvælingar av húsinum, at virksemi má flytast út úr húsinum, skal TK fáa til vega líknandi og hóskandi hølir í tíðarskeiðinum. TK kann siga upp leiguavtaluna, um so er, at TK skal nýta húsini til annað endamál ella at tey skulu takast niður. Hetta tó bert, um TK kann bjóða feløgini hóskandi og samsvarandi hølir aðrastaðni.*

*Feløgini eru sinnaði at samstarva um hóskandi loysnir, og eisini um talan skal verða um, at byggja út og deila hølini við t.d. talvfelagið."*

Økið húsini standa á, innganga í heildarætlanina fyri Tórsvøll/Gundadal. Tí er mest upplagt at húsini vera tikin burtur innan ávísa áramál. Eisini er upplagt at vita um felagið kann innganga í eina loysn saman við t.d. Telvingarfelagnum. Sí eisini mál 17/00846 Hølisviðurskifti o.a. – Havnar Telvingafelag.

**Tilmæli**
Trivnaðastjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at samráðast víðari við felagið um møguleikan at hýsa felagnum á øðrum stað og um møguligt saman við øðrum felag.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Víst verður til viðgerð í máli 18/01969 Tøkir skúlabygningar, umframt til mál 16/01194 Herluf Jakobsen: Áheitan vegna Bragdið um útvegan av hølum til felagið.

Av tí at felagið rykkir eftir eini avkláring og av tí at tað ikki longur er serliga sannlíkt, at tað verður rúm í komandi tøku skúlabygningunum til virksemi hjá Brigdehúsfelagnum verður mett hóskandi at geva felagnum afturboðan um tað og at fara undir tilgongd viðv. yvirtøku av bygninginum og endurgjald fyri tí.

Byrjað verður við samráðingum og roynt at fáa eina semju. Um tað ikki ber á mál verður er skipan í galdandi leigusáttmála um at partarnir biðja tveir óheftar metingarmenn um at áseta eitt hóskandi endurgjald fyri ognina á leigaðum lendi.

Á fundinum greiðir umsitingin frá metingum viðv. endurgjaldi og kostnaði av niðurtøku.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til:

a). um farast skal undir samráðingar við Brigdehúsfelagið um yvirtøku av ognini í 2021 ella 2022.
b). um samráðingar ikki bera á mál so at heimila umsitingini at fáa tilnevnt metingarmenn um at áseta endurgjaldið.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam samtykti at taka undir við a og b og beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Helena Dam á Neystabø, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við Mentamálanevndini.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Samskifti hevur aftur verið við Bridgehúsfelagið um yvirtøku av bridgehúsinum og endurgjald í tí sambandi, nú torgverkætlanin er farin í gongd.

Ynski teirra er, at framtíðar staðsetingin av bridgehúsinum verður í ítróttaøkinum, og at talan er um teirra egnu høli, sum ikki eru minni enn verandi, tvs. uml. 250 m2. Kommunan hevur ikki slík høli at bjóða til leigu, so tí verður mest sannlíkt talan um nýbygging.
Felagið leigar grundøkið, sum bygningurin stendur á, frá kommununi.

Mett verður, at ein semja um endurgjald skal hava sum fortreyt, at felagið sjálvt byggir sær nýtt felagshús, og at kommunan endurrindar felagnum í mesta lagi kr. 2.500.000 fyri gamla Bridgehúsið. Grundøkið kann skipast í nýggjum langtíðarsáttmála.

Byggi- og býarskipanarnevndin skal viðgera staðsetingina.

Mett verður, at fígging til endurgjaldið kann játtast av kontu 5775 Ítróttaranlegg L57015 Langhylur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild at samráðast og gera avtalu um endurgjald fyri bridgehúsið í mesta lagi kr. 2.500.000 fíggjað av kontu 5775 Ítróttaranlegg L57015 Langhylur.

Mælt verður harumframt til at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at staðseta nýggja bridgehúsið, og at møguligur leigusáttmáli um grundøkið verður at viðgera og samtykkja eftirfylgjandi.

**Mentamálanevndin 27. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Málið viðv. heimild at gera avtalu um endurgjald verður beint í býráðið um fíggjarnevndina, og málið um staðseting av nýggjum bridgehúsi verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. apríl 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið viðv. heimild at gera avtalu um endurgjald í býráðið.

Málið um staðseting av nýggjum bridgehúsi verður beint í byggi- og býarskipanarnevndini.

Ein minniluti, Annika Olsen, atkvøður ímóti vísandi til, at eingin óheft meting fyriliggur av bridgehúsinum, ið kann verða grundarlag undir einari avtalu við felagið um endurgjald. Ynski er tó, at ein loysn verður funnin á hølisviðurskiftunum hjá felagnum.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Kristian M. Skála, Birgir Nielsen og Ruth Vang.
Blankt atkvøddi: Elsa Berg.

**Ískoyti:**
Bridgefelagið hevur virkað í Gundadali í umleið 30 ár. Fólkini handan felagið hava eitt stórt ynski um, at verða verandi í Gundadali, hóast felagshúsið nú eftir ætlan verður tikið niður í sambandi við at økið skal brúkast sum partur av býartorginum í Gundadali, mál nr. 20/04581, Tórsvøllur Torg.

Ymiskar staðsetingar hava verið umrøddar í sambandi við at finna felagnum eina nýggja staðseting. Niðanfyri eru 4 staðsetingar í Gundadalsøkinum lýstar yvirskipað:

1. Býarskipanarliga er Gundadalur eitt øki, sum er um at verða fult útbygt. Heildarætlanin fyri Gundadali vísir tó á møguligar útbyggingarmøguleikar. Í heildarætlanini verður víst á økið millum HB- og B36-húsið. Hetta er eitt øki, sum í dag stendur óbygt, og sum partvíst kundi hóska seg til eitt bridgehús. Um byggjast skal á hesum stað, so skal alt økið byggjast, og hevði tað verið upplagt, at bygt tað við møguleika fyri áskoðaraplássum út móti ovara vølli, umframt at kjallarahæddin verður nýtt til okkurt hóskandi. Kjallahæddin skal helst brúkast av virksemi, sum partvíst kann húsast í myrkri, av tí at stórur partur av bygninginum verður undir jørð. Virksemið hjá Bridgefelagnum vildi helst hóska seg betri í ovaru hæddini, har inniklimaði kann gerast gott til kortspæl.
   Økið liggur í D2 í Almennu byggisamtyktini, har umráðisparturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum, umframt at økið liggur í C3 í serstøku byggisamtykt nr. 3 og verður kannað ítróttum og tílíkum.

   Fyrimunur við staðsetingini er, at tað er rættiliga lætt at fara undir bygging á hesum stað.
   Vansar við staðsetingini er, at her skulu byggjast rættiliga nógvir fermetrar, sum møguliga ikki er hóskandi til Bridgefelagið, umframt at fótbólsfeløgini í fleiri umførum hava havt ymisk ynskir til økið.

2. Ein onnur staðseting, sum hevði hóskað seg væl til virksemið og teirra ynskir um at verða í Gundadalsøkinum, er í økinum við Tórsbreyt. Kring Tórsbreyt er møguligt at byggja rættiliga nógvar fermetrar, og eigur hendan loysnin at verða umhugsað sum ein framtíðar útbyggingarmøguleiki, bæði til at húsa ymiskum ítróttarligum virksemi, men so sanniliga eisini fyri at betra um veður og hølis avbjóðingarnar, sum virkandi ítróttarfeløgini á Tórsbreyt stríðast við. Við at staðseta bridgefelagið í hesum økinum, so kundi skjøtil verið settur á enn ein ítróttarmiðdepil, sum vildi gagnað fleiri enn bara Bridgefelagnum, tí tørvur er støðugt á fleiri hølum til ymisku ítróttagreinarnar, sum virka í høvuðsstaðnum.
   Økið liggur í D2 í Almennu byggisamtyktini, har umráðispartarturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.
   Fyrimunir við staðsetingini er, at skjøtil verður settur á arbeiðið at menna Tórsbreyt til eina veruliga kappingarbreyt, umframt at møguleiki er fyri at staðseta fleirir ítróttargreinar á økið, sum í dag tørva fermetrar.
   Vansar við staðsetingini er, at kommunan má luttaka við í planleggingini av økinum, umframt at tað møguliga verður ein longri tíðarhorisontur, tá Bridgefelagið einans hevur tørv á fáum fermetrum í økinum.

3. Ein triðja staðseting, sum hevur verið umrødd í sambandi við at vísa á eina staðseting til Bridgefelagið, er á matr. nr. 1268b, sum er økið beint yvir av verandi Bridgehúsi. Leigusáttmáli er galdandi fyri part av økinum, har ein privatur vinnubygningur stendur á leigaðum lendi hjá kommununi. Hóast leigusáttmálan, so eigur ikki at verða nøkur forðing í at byggja á hesum økinum. Í sambandi við at Tórsvøllur er bygdur, so er eitt parkeringskrav upp á 150 parkeringspláss, har 75 pláss skulu skipast inni á sjálvum byggiøkinum og kann restin teljast millum tey, sum longu eru í

Gundadalsøkinum. Sum liður í at skipa Tórsvallar torgið verður økið aftan fyri Gundadalshøllina og økið sunnan fyri Gundadalsvegin skipað sum grøn parkeringspláss fyri at nøkta parkeringskravið frá UEFA, og verður vøkstur við til at skipa innrættingina og skapa eitt grønt umhvørvi.
Økið liggur í C1 øki í serstøku byggisamtykt nr. 3, sum er lagt til miðstaðarbygging. Mest loyvda byggistig er 0,4 og mest loyvda nýtslustig er 0,8. Grundstykkið er 1250 $m^2$, og um bygt verður í einari hædd, kunnu í alt uml. 500 $m^2$ byggjast (inkl. aðrir bygningar á stykkinum).
Fyrimunir við staðsetingini erfjór, at økið er lætt at fara til.
Vansar við staðsetingini er, at ætlanirnar at innrætta parkeringsøkið og fríðka um í økinum tá ikki kunnu gerast og verður parkeringstørvurin helst óneyðuga stórur í hesum partinum at Gundadali.

4. Fjórða staðsetingin, sum hevur verið umrødd, er partur av matr. nr. 1292n, sum er á Oknarvegi, á vegnum til nýggja høvuðssæti hjá Bank Nordik. Matrikulin er 2000 $m^2$ til støddar, og rúmast Bridgefelagið væl á hesum økinum, og tískil kann hugsast, at bert ein partur av økinum skal setast av til Bridgefelagið.
Økið liggur í umráðispartinum A í serstøku byggisamtyktini nr. 3 og er ætlað til sethúsabygging. Hóast økið liggur í sethúsaøki, so verður mett, at tað er grundarlag fyri at broyta ásetingarnar fyri økið, tí matrikulin er í beinleiðis sambandi við hotel- og bankavirksemið, sum annars í økinum.
Fyrimunir við staðsetingini er, at økið er rímiliga lætt at fara til.
Vansar við staðsetingini er, at byggisamtyktin skal broytast fyri at virksemið kann verða staðsett í hesum økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at heimila umsitingini at fara í samráðingar við felagið um part av økinum á matr. nr. 1292n, Oknarvegur – staðseting 4.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2021:** Samtykt at fara víðari við staðseting 3.

**Mentamálanevndin 09. juni 2021:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Bridgehúsfelagið tekur undir við staðsetingini til nýggja Brigdehúsið á matr.nr. 1268b, sum byggi- og býarskipanarnevndin hevur samtykt.

Uppskot til semju fyriliggur, sum Bridgehúsfelagið tekur undir við. Upphæddin, sum kommunan skal endurgjalda felagnum fyri verandi Bridgehús, verður kr. 2,5 mió, ið er tann upphæddin, sum býráðið samtykti 29. apríl 2021. Møguligur yvirtøkudagur av húsinum verður at avtala nærri.

Aftrat skal kommunan játta íløgustuðul (konta 5370 stuðul til íløgur) til byggingina í mesta lagi kr. 1,5 mió svarandi til uml. triðingin av metta byggikostnaðinum. Henda játtan verður at rinda í tveimum líka stórum pørtum árni 2022 og 2023.

Endalig bygging er treytað av byggiloyvi, og herundir viðgerð hjá friðingarmyndug-leikunum av tí at talan er um bygging tætt uppat viðarlundini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka støðu til uppskotið um semju.

Um samtykt, mæla trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin til at gera keypssáttmála fyri kr. 2,5 mió sbrt. hjálagda skeyti. Harumframt verður mælt til at fíggja íløgustuðul til nýtt Bridgehús á fíggjarætlanini fyri 2022 við upphædd kr. 750.000 og fyri árið 2023 kr. 750.000.

Mælt verður eisini til at gera leigusáttmála við Bridgehúsfelagið um part av lendinum matr.nr. 1268b, tá neyvari avmarking av grundøkinum er gjørd.

**Mentamálanevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2021:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Leigusáttmáli um lendi til nýggja húsið (kemur mánadagin 13. september 2021)

Umsitingin hevur verið í samráðingum við Brigdehúsfelagið um staðseting og eru komin ásamt um hjálagda uppskot til leigusáttmála.

Yvirtøkudagur gamla húsið
Ætlandi verður yvirtøkudagurin 2. november 2021. Hareftir húsið ætlandi verður tikið niður á várið 2022.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin, býararkiteturin mæla nevndini til at innganga hjálagda leigusáttmála um lendi í 30 ár. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 15. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ruth Vang var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen, tekur ikki undir við málinum.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, 4 blonkum atkvøðum og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jón Kragesteen, Gunvør Balle, Annika Olsen.

# 217/21 Sjálvsognarstovnurin Bridgehúsið : Umsókn um stuðul til bygging av nýggjum bridgehúsi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.09.2021 | 220/21 | 21/03570-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 204/21 | 21/03570-2 |
| 3 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 217/21 | 21/03570-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá Brigdehúsfelagnum.

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við mál 16/01316 Vegna nevndina í Bridgehúsinum Pól E. Egholm : Umbøn um fund viðvíkjandi Brigdehúsinum í Gundadali hevur felagið søkt um stuðul til íløgur á 1.500 tkr.

Mælt verður til at játta stuðulin við 750 tkr. í 2022 og 750 tkr. í 2023. Hetta inniber at felagið má lánifíggja upphæddina fyri 2023 í nakrar mánaðir. Felagið ætlar at byrja bygging her í oktober 2021 og at húsið stendur liðugt á sumri 2022. Talan er um skjóta sonevnda elementbygging, og sum verður framd í heildararbeiðstøku.

Sbrt. uppskoti til fíggjarætlan fyri 2022 verða væntandi 800 tkr. tøkar á kontu 5370 Stuðul til íløgur.

Høvuðsreglan í leiðreglunum um stuðul til íløgur § 3, stk. 3 er at veita 30% í stuðli. Í hesum føri er upphæddin beint forbí markið og tískil skal málið sbrt. § 5, stk. 1 í leiðreglunum leggjast fyri býráðið. Harumframt um tilmæli um stuðul er hægri enn 300 tkr. skal málið eisini leggjast fyri býráðið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| | Býráðsfundur<br>30. september 2021 | Blað nr.: 847<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at játta 750 tkr. í 2022 og í 2023 av kontu 5370 Stuðul til íløgur til nýtt brigdehús. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 15. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ruth Vang var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býraðið.

Ein minniluti, Annika Olsen, tekur ikki undir við málinum.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, trimum blonkum atkvøðum og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jón Kragesteen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Gunvør Balle og Annika Olsen.

# 218/21 Umbøn um yvirtøku av Gundadalshøllini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 104/17 | 17/01326-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 31.05.2017 | 147/17 | 17/01326-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 242/17 | 17/01326-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 191/18 | 17/01326-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 276/18 | 17/01326-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 07.06.2019 | 181/19 | 17/01326-2 |
| 7 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 271/20 | 17/01326-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 28.10.2020 | 283/20 | 17/01326-2 |
| 9 Mentamálanevndin | 16.11.2020 | 311/20 | 17/01326-2 |
| 10 Mentamálanevndin | 02.12.2020 | 317/20 | 17/01326-2 |
| 11 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 332/20 | 17/01326-2 |
| 12 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 303/20 | 17/01326-2 |
| 13 Mentamálanevndin | 15.09.2021 | 222/21 | 17/01326-2 |
| 14 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 205/21 | 17/01326-2 |
| 15 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 218/21 | 17/01326-2 |

**Málslýsing:**
13. mars 2017 fekk kommunan skriv frá ítróttafeløgunum Neistin, Kyndil og Fleyr viðv. samráðingunum um avhendan av Gundadalshøllini, umframt uppskot um eina loysn við felagshølum í Høllini á Hálsi til Neistan og Kyndil, men Fleyr verður eftir í verandi felagshølum og fær tey.

Kommunan hevur áður verið í samráðingum við feløgini um Gundadalshøllina, men bar tá ikki á mál. Uppleggið tá var at kommunan yvirtók høllina uttan viðurlag. Hetta m.a. tí mett verður at høllin hevur ein rímiliga týðandi tørv á høvuðsumvæling innan nøkur ár. Tá var ikki undirtøka í tí eina felagnum fyri avtaluni.

Viðv. møguligum felagshølum í Høllini á Hálsi, so uppskotið hjá feløgunum ikki so upplagt og vil innbera skerdar møguleikar í aðrar mátar. Hartil kemur at meginreglan viðv. hølum er sonevnt shared use og tískil ikki upplagt at hølir vera løgd burturav til ávís feløg, men heldur spurningurin at skapa karmar soleiðis at fleirtáttað nýtsla kann fáast burturúr hølum v.m.

Hartil er spurningurin um hvat kostnaðurin vil vera. Áður hevur verið viðgjørd ein útbygging suður úr verandi høll. Tann útbyggingin vildi kunna inniborið fleiri hentleikar til feløgini.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:

a). Principielt at umrøða um ein yvirtøka er áhugaverd og í sofall at heimila umsitingini at fara undir realitetssamráðingar við feløgini við støði í yvirtøku uttan viðurlag eins og undanfarnar hallaryvirtøkur.
b). At umrøða ynski um møgulig felagshølir til Neistan og Kyndil í Høllini á Hálsi og vil umsitingin koma við nærri tilráðing til komandi fund.

**Mentamálanevndin 03. mai 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 31. mai 2017:** Nevndin tekur undir við a og hevur umrøtt b.

**Ískoyti**
Í samráð við eigaran er gjørd støðulýsing av bygninginum. Á fundinum kemur umsitingin at greiða frá. Sí hjáløgdu frágreiðing. Í næstum verður ástaðarfundur og vera víðari samráðingar so ætlandi í heyst.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Samtykt at taka kunningina til eftirtektar.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti**:
Umsitingin hevur verið á fundi við nevndina í L/F Venjingarhøllin (Gundadalshøllin).

Greitt verður frá gongdini í samráðingunum og verður upplegg til yvirtøkuavtalu gjøgnumgingið (sí hjálagt skjal).

Ætlanin er at halda fram við tingingunum í juni og koma aftur í nevnd í  august.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Kunningin tikin til eftirtektar og samtykt at kanna um møguleikar eru til felagsvirksemi í økinum.

**Ískoyti**
Samráðingar hava verið við L/F Venjingarhøllina (Gundadalshøllina). Umsitingin greiðir frá status í samráðingunum og umrøða av hvussu hesar møguliga kunnu koma á mál.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka kunningina til eftirtektar.

Heðin Mortensen og Turið Horn vóru ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í víðari samráðingum við L/F Venjingarhøllin. Felagið heldur fast við eitt gjald á 900 tkr. fyri yvirtøkuna av høllini (300 tkr. til hvørt felagið), vísandi til innskotspeningin tey hava latið upprunaliga í verkætlanina. Alternativt fer felagið at royna at fáa rakstur í høllina og herundir tillagað gjøld v.m. Eisini ynskir felagið at fáa endurnýggja leigusáttmálan frá 1983 (sí hjálagt skjal). Hetta skuldi tó ikki verið alneyðugt av tí, at onki evstamark tykist vera ásett í sáttmálanum, annað enn at hann ikki kundi uppsigast áðrenn 2015. Í leigusáttmálanum er annars í pkt. 5 ásett at um kommunan ynskir at ogna sær hana tá leigutíðin er farin skal eigarin verða endurgoldin ein peningaupphædd, sum ásett av tveimum av sorinskrivaranum útnevndum monnum, um ikki býráðið og hesi semjast um endurgjaldið.

Tað sum talar ímóti at taka av slíkum tilboði er fyrst og fremst at aðrar hallir eru yvirtiknar uttan viðurlag (tó í sambandi við Badmintonhøllina var skuld við og í sambandi við høllina á Stórheyggi fekk felagið eina langtíðarleiguavtalu við ymiskum framíhjárættindum til høllina fram til 2024. Tað sum talar fyri er, at TK við høllini fær eina høll, ið hevur eitt mio. virði, sjálvt um tørvur er á týðandi ábótum á høllina.

Avbjóðingin við at leingja leiguavtaluna er at felagið tá mest sannlíkt kemur at søkja um týðandi stuðul til umvælingar frá TK og sum heild eru vánaligt útlit fyri raksturin hjá høllini kann bera útreiðslurnar av eini umvæling.

Í sambandi við mál 18/03453 Skipan av Gundadali, sum kemur fyri á komandi fundi í mentamálanevndini er gjørd ein heildarætlan fyri alt Gundadali. Við støði í teirri viðgerðini er upplagt at um leigusáttmálin verður longdur at avmarka leigumálið til umleið helvtina av verandi lendi t.v.s. at lendið millum høllina og Dansifrøi ikki skal vera partur av leigumálinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til annaðhvørt:
a. um farast skal undir endaligar samráðingar um yvirtøku av høllini ella
b. um leiguavtalan skal leingjast ella ikki leingjast og í sofall minkast við økinum millum Gundadalshøllina og Dansifrøi.

**Mentamálanevndin 07. juni 2019:** Samtykt at taka undir við b í tilmælinum.

**Ískoyti**:
Nevndin í Í/F Venjingarhølini hevur verið á fundi við kommununa og rykt eftir avkláring viðv. framtíðini hjá høllini. Eisini hevur felagið latið avrit av seinasta ársroknskapinum hjá felagnum.

Greitt er at í verandi støðu forfellir hølin og hevur tørv á høvuðsumvæling og tykist ikki vera fíggjarligt grundarlag fyri tí í verandi skipan. Tó so at skipanin hjá TK fyri stuðul til íløgur er møgulig, men hevur hon vanliga als ikki upphæddir, ið eru nøktandi í hesum høpi. Sí hjálagt áður gjørd støðulýsing.

Hartil kemur, at felagið ynskir at kommunan yvirtøkur høllini – vísandi til uppskot til semju frá 2019.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja um antin:

a). um farast skal í tilgongd við felagið um, hvussu felagið undir verandi skipan, kann fara undir eina stigvísa ætlan fyri umvæling av høllin ella

b). um farast skal í samráðingar um yvirtøku av høllini.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við b og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 16. november 2020:** Útsett.

**Ískoyti**:

**Keyp og ískoytisavtala**
Umsitingin hevur verið í samráðingum við L/F Venjingarhøllin og er treytað komin ásamt um fylgjandi skeyti og ískoytissáttmála. Hetta inniber at TK skal rinda feløgunum 900 tkr. fyri at yvirtaka bygningin og samstundis geva feløgunum ein nærri tilskilaðan brúksrætt v.m. næstu 15 árini. Eisini er lagt upp til at yvirtaka verandi hallarvørð í høllini.

**Fígging**
Býráðið samtykti 26. november 2021 í máli 20/03416 Fíggjarætlan 2021, Tórshavnar kommuna, at játta 1.000 tkr. til yvirtøku av Gundadalshøllini. 900 tkr. eru ætlaðar til keypið og restin til tinglýsing v.m.

**Góðkenningartilgongd í feløgunum handan L/F Venjingarhølin**
Í hesum føri er talan um eitt lutafelag, sum tey trý ítróttafeløgini Kyndil, Neistin og Fleyr eiga og tí vil keypið av ognini og ískoytisavtalan vera treytað av endaligari góðkenning á nevndar- og aðalfundum í 2 førum. Tískil kann koma uppá tal at eitt ískoyti kemur til málið áðrenn endaligu viðgerðina.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:

a). at taka undir við at rinda L/F Gundadalshøllini 900 tkr. fyri at yvirtaka Gundadals-høllina at fíggja av kontu 6175 Umsiting og røkt av fastari ogn.

b). at innganga hjá lagda ískoytisáttmála um brúksrætt v.m. ísv. yvirtøku av høllini.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Tikið av skrá**.**

**Ískoyti**:
Viðgerðin í desember 2021 kom ikki á mál. Feløgini í L/F Venjingarhøllin tóku ikki øll undir við uppskotnum,

ið nevndin í lutafelagnum hevði samráðst um. Nýggjar samráðingar hava verið og fyriliggur nú hjálagda uppskot til ískoytisavtalu og skeyti.

Avtalan inniber at TK miðjar ímóti at betra um hallarkapasitetin í Gundadali og hentleikarnar hjá feløgum til styrkivenjing og felagsvirksemi, tó onki áramál sett á. Feløgini viðgera enn uppskotið og fyriliggur endaligt svar væntandi 13/9-2021.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at:

a). at taka undir við at rinda L/F Gundadalshøllini 900 tkr. fyri at yvirtaka Gundadals-høllina at fíggja av kontu 6175 Umsiting og røkt av fastari ogn.

b). at innganga hjálagda ískoytisáttmála um brúksrætt v.m. ísv. yvirtøku av høllini.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 15. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmæli a) um at yvirtaka Gundaldalshøllina fíggjað av kontu 6175 Umsiting og røkt av fastari ogn, og tilmæli b) at innganga ískoytissáttmála tó við hesari broyting: §2, stk. 2 Tk hevur í hyggju komandi árini at útbyggja Gundadalshøllina fyri at økja um hallarkapasitetin í Gundadali.

Ruth Vang og Súna Mørk vóru ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

Súna Mørk bað um at sleppa av fundi, tí hon metti seg vera ógegniga at luttaka í viðgerðini av málinum, og tók býráðið hesa áheitan til eftirtektar.

# 219/21 Tórshavnar Musikkskúli : Dagføring av tilmeldingargjøldum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.09.2021 | 215/21 | 21/02200-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 209/21 | 21/02200-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 219/21 | 21/02200-1 |

**Upprunin til málið**
Umsitingin.

**Lýsing av málinum**
Partur av virkseminum hjá Tórshavnar musikkskúla er inntøkufíggjaður við tilmeldingargjøldum. Seinast gjøld vóru stillaði var í 2018. Býráðssamtykt 24. mai 2018 í máli 16/01125 Tórshavnar musikkskúli: Nýggjar upptøkureglur)

Musikkskúlin hevur júst stovnað eitt nýtt bólkatilboð við spælistovu, ið er fyri eitt heilt ár og er tí neyðugt at áseta eina kostna fyri tað. Er ikki dekkað av verandi skipan.

Seinni í ár kemur møguligt tilmæli um dagføring av øðrum gjøldum til skúlaárið 2022/23.

Í verandi støðu eru gjøldini:
- Árligi kostnaðurin fyri einkultundirvísing 2.250 kr. pr. ár
- Árligi kostnaðurin fyri Litir í leiki og Ljóð í leiki 5.000 kr. pr. ár
- Árligi kostnaðurin fyri barna- og ungdómskór er kr. 1000.-
- Árligi kostnaðurin fyri Musikkskúla Miðnám og PO er kr. 2.400.-
- Árligi kostnaðurin fyri undanskeið til Musikkskúla Miðnám er kr. 1000.-
- Kostnaðurin fyri musikkspælistovur og klaverspælistovur er kr. 600.- (hálvt ár)
- Kostnaðurin fyri versktovur/undirvísing er 250 kr. (ársfjórðing)

Mælt verður til at broyta at fáa fylgjandi gjald afturat:

1000 kr. pr. ár (musikkspælistovur o.l.)(bólkafrálæra)

Broytingin er treytað av góðkenning hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ll. nr. 83 frá 29. Mai 2017 um musikkskúlaskipan (Musikkskúlalógin) § 3, stk. 3, nr. 3.

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

Tilmeldingargjald pr. 1. august 2021:
1000 kr. pr. ár (musikkspælistovur o.l.)(bólkafrálæra)

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 15. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ruth Vang var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

## 220/21 Klintrifelag Føroya

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 222/17 | 16/03313-8 |
| 2 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 238/17 | 16/03313-8 |
| 3 Mentamálanevndin | 08.11.2017 | 271/17 | 16/03313-8 |
| 4 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 312/17 | 16/03313-8 |
| 5 Mentamálanevndin | 06.02.2018 | 59/18 | 16/03313-8 |
| 6 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 118/18 | 16/03313-8 |
| 7 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 266/18 | 16/03313-8 |
| 8 Mentamálanevndin | 08.10.2018 | 308/18 | 16/03313-8 |
| 9 Mentamálanevndin | 07.11.2018 | 328/18 | 16/03313-8 |
| 10 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 24/19 | 16/03313-8 |
| 11 Fíggjarnevndin | 23.01.2019 | 16/19 | 16/03313-8 |
| 12 Fíggjarnevndin | 31.01.2019 | 28/19 | 16/03313-8 |
| 13 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 13/19 | 16/03313-8 |
| 14 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 29/19 | 16/03313-8 |
| 15 Mentamálanevndin | 03.04.2019 | 121/19 | 16/03313-8 |
| 16 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 181/20 | 16/03313-8 |
| 17 Mentamálanevndin | 09.06.2021 | 165/21 | 16/03313-8 |
| 18 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 150/21 | 16/03313-8 |
| 19 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 220/21 | 16/03313-8 |
| 20 Mentamálanevndin | 06.10.2021 | 246/21 | 16/03313-8 |

**Málslýsing:**
Klintrifelag Føroya er frítíðarfelag hjá klintrarum í Føroyum. Felagið hevur ein klintrivegg (hávegg) í Norðradali. Harumframt er ein innandura klintriháveggur á x metrar í Skúlanum við Løgmannabreyt, ið felagið eisini brúkar. Felagið hevur eisini verið aktivt innan at menna klintring í bjørgum v.m. kring oyggjarnar. Veitarar innan ferðavinnu veita eisini í ávísan mun tilboð innan klintring við línu t.d. á Skanasanum og við ferjuleguna á Gomlurætt, har eisini frítíðarklintrarar ofta eru.

Klintring er ein ítrótt, sum tekur seg alsamt meiri fram í grannalondunum innan at kalla allar aldursbólkar og kyn. Innan økið eru mentar mannagongdir og trygdarfyriskipanir, ið gera at talan er um eitt lutfalsliga trygt frítíðarítriv.

Felagið ynskir fegin at samstarva við Tórshavnar kommunu um at menna betri innandura klintrimøguleikar. Her verður skilt í millum sonevndar buldriveggir, ið eru upp til 4 metrar, har klintrað verður uttan línu og har mátta liggur undir sum stoytverja. Umframt sonevndar háveggir, ið t.d. ganga upp til 12-14 metrar og har trygdarlína verður brúkt.

Felagið er komið við ymiskum uppskotum til møgulig støð har ein klintridepil kundi verið gjørdur. Felagið leggur áherðslu á at tey sjálvi vilja vera ein aktivur partur í at menna anleggini bæði við arbeiðsmegi, serkunnleika v.m.

Á fundinum fer umsitingin at greiða frá nøkrum av uppskotunum hjá felagnum. Harumframt ynskir felagið fegin at fáa onnur uppskot frá kommununi.

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti at umsitingin fyrireikar málið víðari og kemur við einum tilmæli til fund í nevndini í heyst.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Umrøtt.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti 8. november 2017**:
Umsitingin hevur verið í innleiðandi samskifti við Tórshavnar havn um møguleikar fyri hesum virksemi í Bacalao. Umsitingin kemur á fundinum á vísa fram tekningar og møguligar hugsandi loysnir. Mest upplagt er at kombinera hetta virksemi við annað frítíðarvirksemi.

Hartil kemur spurningurin um fígging av leigukostnaði.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fara víðari við samskiftinum við Klintrifelagið um loysn í Bacalao og venda aftur til nevndina við einum úrsliti.

**Mentamálanevndin 08. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Felagið hevur gjørt skitsuuppskot til anleggið. Á fundinum verður greitt nærri frá hjálagda uppskotið og fyribils metingum kostnað.

Samstundis er samskifti í gongd við Skatefelagið og Veiði- og skjótifelagið. Til fundin í januar er væntandi at ein samlað disponering av virkseminum fyriliggur.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotið.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Í januar hevur umsitingn verið á ástaðarfundi í Bacalao saman við umboðum fyri Tórshavnar havn og Byggi- og umhvørvisdeildina. Talan var um ein innleiðandi dialog fyri at fáa yvirskipaða fatan av teimum treytum og krøvum, ið eru hugsandi í sambandi við møguligt frítíðarvirksemi í bygningunum og tí ikki í hesum umfari at rokna sum myndugleikaviðgerð ella líknandi. Ítøkiliga ætlanin er í bygninginum á Vestara bryggju 13.

Um frítíðarvirksemi sum t.d. klintring og skateing skal ein fyrireikandi greining gerast soleiðis at ein formlig umsókn kann sendast til byggivaldið. Stóra avbjóðingin í slíkari viðgerð er, í hvønn mun ásetingar í kunngerð nr. 72 frá 27. Juni 2017 um bygningskunngerð 2017 gera seg galdandi. Her kann serliga nevnast møgulig krøv í mun til brunatrygd, bjálving, atkomu, el-skipanir o.a.m. Samstundis er avgerandi, í hvønn mun tað ber til at fáa góðkenning til møgulig frávik, í mun til bygningskunngerðina.

Mett verður hóskandi at fáa ráðgeva at fyrireika uppskot til umsókn til byggivaldið um loysn í nevndu hølum til frítíðarvirksemi innan klintring, skateing og evt. annað. Tá vil dentur verða lagdur á at gera eina loysn, ið er so einføld sum tilber, og sostatt ikki er til óneyðug órógv fyri møguligar framtíðarætlanir hjá Tórshavnar havn fyri bygninginum. Alt hetta verður gjørd í samstarvi og við góðkenning frá Tórshavnar havn sum eigara og rakstrarharra í bygninginum. Mettur kostnaður er 35 tkr.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini til at fáa ráðgeva at fyrireika loysn og umsókn til byggivaldið saman við Tórshavnar havn til byggivaldið og í fyrsta umfari fíggjað nevnda ráðgevarakostnaðin av konto 5366 stuðul til ítrótt.

**Mentamálanevndin 06. februar 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal og Halla Samuelsen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, tekur støðu á seinni fundi.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/04764.

**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Samtykt at arbeiðast skal víðari við verkætlanini.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Víst verður til samtykt í máli 16/04764.

**Mentamálanevndin 08. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini.

**Mentamálanevndin 07. november 2018:** Útsett.

**Ískoyti**:
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/04764 Ólavur S. T. Thorsteinsson: Umsókn vegna Skatefelagið um stuðul til eina innandura.

**Mentamálanevndin 16. januar 2019:** Víst verður til samtyktina í máli 16/04764.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2019:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 31. januar 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Víst verður til samtyktina í málinum 16/04764.

Marin Katrin Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni og tók Tráin Nónklett sæti í hennara stað.

**Ískoyti**
Viðv. Klintrifelag Føroya – nú Havnar Klintrifelag
Við tí endamáli at gerast menningarsamband í ÍSF, er felagið umskipað við atliti til at gerast eitt landssersamband, meðan virksemi í Tórshavn er lagt í felag nevnt Havnar Klintrifelag.

Umsitingin hevur verið í endaligum samráði við felagið og eru samd um hjálagda uppskot til samstarvsavtalu millum TK og Havnar Klintrifelag. Avtalan inniber, at Havnar Klintrifelag fær 360 tkr. í stuðli til at byggja klintrianleggið, umframt at felagið skal rinda 1667 kr./mánaðin fyri hallarleigu, umframt fyri ljós. Felagið verður at samstarva við Skatefelagið um praktisk viðurskifti í hølunum, reingerð v.m.

Stuðulin til anleggið verður rindaður av konto L57029 Smærri ítróttaanlegg, sí mál 18/03320, har markað er upphædd til endamálið av játtanini 2018. Stuðul til ókeypis hallarleigu verður rindað av konto 5365 Stuðul til Ítrótt. Roknað verður við at anleggið kemur í rakstur í heyst.

Ítróttaanlegg kemur at hava umsjón við virkseminum og kemur at standa fyri leigumálinum í mun til Tórshavnar havn og standa fyri brúksleigumálinum í mun til Havnar Klintrifelag og Skatefelagið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at innganga hjáløgdu avtalu við Havnar Klintrifelag og játta 360 tkr. í stuðli til anleggið av konto L57029 Smærri ítróttaranlegg (2018).

**Mentamálanevndin 03. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Verkætlanin nærkast nú endanum og uppgerð av byggiverkætlanini verður gjørd so skjótt sum alt arbeiðið er liðugt. Sum støðan er nú, vísir tað seg, at felagið fer at hava tørv á ávísari upphædd til ymiskt tilfar fyri at gera klintrihøllina lidna. Felagið hevur og fer framhaldandi at gera ein týðandi egininnsats við sjálvbodnari arbeiðsmegi fyri at røkka á mál. Metti meirkostnaðurin av verkætlanini er kr. 34.598,59 sum er til tilfar so sum plátur, skrúvur og hald (greb). Tøka játtanin av teimum samtyktu kr. 360.000,- er kr. 4.517,60.

Samlað fíggjaryvirlit við útgreinaðari lýsing av meirkostnaði og nýtslu annars er hjálagt.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta kr. 31.000,- av konto 5365 Stuðul til ítrótt

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Víst verður til ískoyti og tilmæli í máli 16/04764 Umsókn vegna Skatefelagið um stuðul til eina innandura skatepark.

**Mentamálanevndin 09. juni 2021:** Samtykt at loka málið, sí mál 16/04764.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini at loka málið og beina málið í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Kunnað varð um málið.

| | **Býráðsfundur**<br>30. september 2021 | Blað nr.: 859<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

## 221/21 Umsókn vegna Skatefelagið um stuðul til eina innandura skatepark

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 249/17 | 16/04764-5 |
| 2 Mentamálanevndin | 08.11.2017 | 273/17 | 16/04764-5 |
| 3 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 315/17 | 16/04764-5 |
| 4 Mentamálanevndin | 06.02.2018 | 60/18 | 16/04764-5 |
| 5 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 112/18 | 16/04764-5 |
| 6 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 119/18 | 16/04764-5 |
| 7 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 267/18 | 16/04764-5 |
| 8 Mentamálanevndin | 08.10.2018 | 309/18 | 16/04764-5 |
| 9 Vinnunevndin | 01.10.2018 | 39/18 | 16/04764-5 |
| 10 Mentamálanevndin | 07.11.2018 | 327/18 | 16/04764-5 |
| 11 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 23/19 | 16/04764-5 |
| 12 Fíggjarnevndin | 23.01.2019 | 15/19 | 16/04764-5 |
| 13 Fíggjarnevndin | 31.01.2019 | 27/19 | 16/04764-5 |
| 14 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 12/19 | 16/04764-5 |
| 15 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 30/19 | 16/04764-5 |
| 16 Mentamálanevndin | 03.04.2019 | 122/19 | 16/04764-5 |
| 17 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 86/20 | 16/04764-5 |
| 18 Fíggjarnevndin | 01.04.2020 | 79/20 | 16/04764-5 |
| 19 Mentamálanevndin | 09.06.2021 | 166/21 | 16/04764-5 |
| 20 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 151/21 | 16/04764-5 |
| 21 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 221/21 | 16/04764-5 |
| 22 Mentamálanevndin | 06.10.2021 | 247/21 | 16/04764-5 |

**Málslýsing:**
Kommunan hevur fingið umsókn um frá Skatefelagnum um stuðul til eina innandura skatepark. Í verandi støðu hevur kommunan eitt uttandura skateanlegg sunnanfyri grasfløtuna á Frælsinum. Hetta er í hampiligum standi. Sí hjálagda mynd.

Kommunan hevur eisini í 2016 fingið áheitan (mál 16/03692) frá nøkrum dreingum um at fáa ein innandura skateboardbana.

Skatefelagið hevur gjørt eitt uppskot til møguligar loysnir. Sí hjálagt. Felagið hugsar at hetta eitt nú kundi verið gjørt í onkrum verandi bygningi, ið er egnaður til endamálið. Eisini hevur verið umrøtt at slíkt anlegg kundi verið undir eini uttandura takloysn har sum økið so eisini kundi verið brúkt til onnur endamál. Sí dømi hjálagt.

Á fundinum fer umsitingin við støði í uppskotinum at greiða frá møguligum hugsandi staðsetingum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotið og síðani at beina málið til ummælis í byggi- og býarskipanarnevndini við atliti til møguligar staðsetingar og hvørt ein staðseting í býarrúminum er áhugaverd.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Samtykt at arbeiða víðari við málinum.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti 8. november 2017**
Umsitingin hevur verið í innleiðandi samskifti við Tórshavnar havn um møguleikar fyri skate-virksemi í Bacalao. Umsitingin kemur á fundinum á vísa fram tekningar og møguligar hugsandi loysnir. Mest upplagt er at kombinera hetta virksemi við annað frítíðarvirksemi.

Hartil kemur spurningurin um fígging av leigukostnaði.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fara víðari víðari við samskiftinum við Skatefelagið um loysn í Bacalao og venda aftur til nevndina við einum úrsliti.

**Mentamálanevndin 08. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Skatefelagið er í holt við at gera uppskot til skateanlegg í hølunum. Til fundin kemur eitt skitsuuppskot.

Samstundis er samskifti við Klintrifelagið og Veiði- og skjótifelagið. Til fundin í januar er væntandi at ein samlað disponering av virkseminum fyriliggur.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotið.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 06. februar 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal og Halla Samuelsen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, tekur støðu á seinni fundi.

**Ískoyti:**
Umsitingin saman við Tórshavnar havn er saman við ráðgeva í holt við samskifti við byggivaldið um loyvi til at brúka hølini í Bacalao og avklára tilhoyrandi projektviðurskifti. Sí hjálagt skitsu v.m.

Ætlandi fyriliggur avkláring við byggivaldið í næstum, saman við kostnaðarmeting, tíðarætlan v.m.

Umsitingin kunnar um málið á fundinum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Fingin er nú til vega tekning, byggiloyvi og kostnaðarmeting fyri gerð av verkætlan til skating og klintring í Bacalao (sí hjáløgd skjøl).
Harumframt hevur Tórshavnar havn gjørt kostnaðarmeting fyri ymiskt í sambandi við elskipanina.

Sbrt. metingum hjá ráðgeva eru hondverkaraútreiðslurnar fyri verkætlanina mettar til 1.115 t. Tórshavnar havn hevur fingið mett el-arbeiðið til 219 tkr. Hartil skal leggjast afturat 10-15% til ókent, 6,25% til kommunalt MVG, umframt eini 6% til ráðgeving í sambandi við útbjóðing og eftirlit.

Støða er ikki tikin til møguligt býtið millum Tórshavnar havn og Tórshavnar kommunu. Hetta krevur eina nærri samráðing í sambandi við møguliga leigumálið.

Hartil kemur møguligur stuðul til skateanleggið og klintrianleggið inni í høllini. Tilfarskostnaðurin fyri klintrianleggið er mett til 418 tkr. og skateanleggið mett til 250 tkr.

Tá er roknað við, at feløgini standa fyri tí mesta av handverkaraarbeiðinum. Harumframt er tá ikki tikin hædd fyri hvussu nógva fígging feløgini sjálvi kunnu fáa til vega.

Á fundinum kemur umsitingin at gjøgnumganga tilfarið í málinum. Játtan er ikki tøk til verkætlanina.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, um arbeiðast skal víðari við verkætlanini.

**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Samtykt at arbeiðast skal víðari við verkætlanini.

**Ískoyti**
Feløgini hava nú latið TK dagførd uppskot til fíggjarætlan fyri bygging av sjálvum anleggunum til ávikavist skateing og klintring í Bacalao. Teirra fíggjartørvur, tá íroknað nógv sjálvboðið arbeiðið er á.v.v.:

Skateanleggið: 258 tkr. íroknað MVG.
Klintrianleggið: 340 tkr. íroknað MVG.

Hartil kemur klárgerð av høllini sbrt. áður gjørdu meting t.e. umleið 1408 tkr. til umbyggingar og umvælingar av høllini og uttanfyri høllina (íroknað ókent, ráðgeving&eftirlit og kommunalt MVG).

Tórshavnar havn kemur ætlandi at gera el-arbiðið fyri egna rokning mett til umleið 200 tkr. Ætlanin er nú at fara í eina endaliga tilgongd við Tórshavnar havn at avklára markamót og um Tórshavnar havn skal standa fyri umvælingini av høllini.

Rakstur
Í næstum er ætlanin at gera endaliga rakstarætlan og avtalu fyri anleggið, herundir leigugjaldið til Tórshavnar havn. Mett verður hóskandi, at feløgini fáa ávíst endurgjald fyri hallarleigu. Kann samanberast við skipanina fyri ókeypis hallarleigu, ið er galdandi part av árinum.

Samanumtikið er ein fíggjartørvur á umleið 2.000 tkr fyri samlaðu verkætlanina. Arbeiðið at gera høllina klára kann ætlandi fara í gongd í endanum av árinum ella fyrst í komandi ári.

Skotið verður upp at fíggja verkætlanina av kontuni til smærri ítróttaanlegg (sí mál 18/03320 Játtan til smærri ítróttaanlegg v.m.). Har eru væntandi umleið ¼ av fíggingini til hesa verkætlan tøkar í 2018 og má so restin raðfestast í fíggjarætlanini fyri 2019, antin kontan til smærri ítróttaanlegeg ella kontu 5370 Stuðul til íløgur.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at umsitingin fer undir at gera endaliga samstarvs- og rakstraravtalu við Skatefelagið og Klintrifelagið um menning og samstarv um klintri- og skatehøll í Bacalao.
b). At umsitingin fer undir at gera endaliga avtalu við Tórshavnar havn um umbygging og umvæling av ætlaðu hølini í Bacalao til frítíðarendamál og venda aftur í nevnd til endaliga viðgerð av málinum.

**Mentamálanevndin 12. september 2018**: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Uppskot er gjørt til leiguavtalu millum Tórshavnar havn og kommununa um 400 $m^2$ á 2. Hædd í Bacalao bygninginum.
Leiguupphæddin er 120 tkr um árið. Tórshavnar havn ger tillagingar í elveitingini fyri góðar 200 tkr, sum verður fíggjað av rakstri.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til at taka undir við uppskoti til leigusáttmála j.nr 16/04764-24.

**Vinnunevndin 01. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í mentamálanevndina.

**Ískoyti**
Tórshavnar havn ynskir at TK stendur fyri leigusáttmálanum við Tórshavnar havn og at TK síðani letur Skatefelagnum og Klintrifelagnum rætt til at innrætta hølini við sínum anleggum og rætti til at brúka hølini. Hugsanin er at Ítróttanlegg formliga kemur at standa fyri viðurskiftunum við feløgini. Til komandi fund verða klárir endaligar samstarvsavtalur um brúksrætt og um stuðul til gerð av anleggunum hjá feløgunum, umframt taka støðu til møguligan stuðul til hallarleigu. Næsta stig er at fáa fyrireika miðhøllina so at hon kann vera klár til virksemi hjá feløgnum sbrt. byggiloyvinum. Arkitektavirkið Ove Mortensen kemur at standa fyri fyrireiking av verkætlanini, at heinta inn tilboð, umframt hava eftirlit við arbeiðinum. Tá tað endaliga tilboðið fyriliggur ber til at gera endaliga kostnaðarætlan. Tá ber til at siga nærri um, hvat er neyðugt av fígging til samlaðu verkætlanina.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at heinta inn tilboð uppá klárgerð av miðhøllini á aðru hædd á Bacalao og at venda aftur í nevnd við endaligari kostnaðarætlan.

**Mentamálanevndin 08. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 07. november 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
Ráðgevin hevur nú fingið innheintað tilboð uppá klárgerð av høllini o.a. Hondverkaraútreiðslurnar eru mettar til 1.125.980 kr, umframt ráðgeving, ókent og kommunalt MVG samanlagt 1.412 tkr. Á løgukontu L57029 Smærri ítróttaanlegg v.m. eru 520 tkr. tøkar til verkætlanina og restin verður at fíggjað av kontuni 5575 Smærri ítróttaanlegg í 2019. Sí mál 19/00144 Játtan í 2019 til smærri ítróttaranlegg v.m.

Til komandi fund verður tøk endalig samstarvsavtala við Skatefelagið um uppbygging, menning og rakstur av skateanleggi í Bacalao og samstarvsavtala við Klintrifelag Føroya um uppbygging, menning og rakstur av klintrianleggi í Bacalao.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at innganga avtalu við Timburmeistara Rúni Brandur Dam um gerð av arbeiðinum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 16. januar 2019:** Samtykt at innganga arbeiðstøkusáttmála við Rúna Brandur Dam og játta 1.412 tkr. av íløgukontu 5775 L57029 smærri ítróttaanlegg og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Marin Katrina Frýdal var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2019:** Málið útsett.

**Ískoyti:**
Víst verður til ískoytið omanfyri, ið her verður nærri útgreinað.

Viðv. arbeiðstakarasáttmálanum
Arbeiðstakarasáttmálin (sí hjálagt skjal íroknað nøgdarlista og tekning) við Timburmeistara Rúna Brandur Dam (er nú umskipað frá ÍVF til Sp/f North built) er áljóðandi 773.500 kr, meðan positiónirnar 11, 13 og 14 í nøgdarlistanum eru rokningararbeiði, mett av ráðgevanum til umleið 350 tkr. Hetta vegna ávísar óvissur viðv. brunaklæðingararbeiði í høgari hædd.

Samlaður kostnaður at gera hølini klár íroknað ókent, mvg og ráðgeving er 1.412 tkr.

Í uppskoti er at fíggja arbeiðið av kontu 5775 smærri ítróttaranlegg, sí mál 19/00144 av játtanini fyri 2019.

Arbeiðið fevnir um eina røð av átøkum fyri at liva upp til galdandi krøv til brunatrygd í høllini og í gongini uttanfyri høllina, og sum eru trygdir fyri byggiloyvinum. Høllin verður ein høll uttan serliga upphiting og kann sambært byggiloyvinum heldur ikki upphitast.

Viðv. stuðli til anleggini
Til komandi fund í mentamálanevndini koma endaligu avtalurnar við Kintrifelagið og Skatefelagið til viðgerðar í mentamálanevndini, herundir stuðul til feløgini at byggja upp teirra anlegg, sum er klintriveggur og skatebreyt/-rampur. um mett til á.v.v. 340 tkr. og 258 tkr., t.e. 598 kr.

Hesin parturin verður fíggjaður at av kontu 5775 L57029 smærri ítróttaranlegg fyri 2018, sí mál 18/03320.
Samlaður fíggjartørvur til at gera hølini klár og at seta upp klintri- og skateanlegg er sostatt 2.010 tkr.

Stuðul til raksur
Vinnunevndin samtykti 1. oktober 2019, at leigusáttmálin við Tórshavnar havn um hølini skal ganga umvegis Tk/Ítróttaanlegg, og at kommunan so ger leiguavtalu við feløgini.
Leigan er 120 tkr. um árið. Feløgini hava latið inn uppskot til rakstarætlan, har søkt er um stuðul til hallarleigu.
Mett er hóskandi, at feløgini fáa ávíst endurgjald líknandi leistinum fyri ókeypis hallarleigu (sí samtykt 12. september 2018 í mentamálanevndini). Eftir teirri skipanini er ókeypis hallarleiga umleið átta og ein hálvan mánað av árinum. Sostatt skuldu feløgini fingið stuðul til umleið 2/3 av kostnaðinum t.e. 5.000 tkr./mán. í leigu hvørt felagið, og so 3.300 kr./mán. í stuðli hvør.
Hetta verður ætlandi mælt til at játta av kontu 5365 stuðul til ítrótt. Hædd má takast fyri hesum økta fíggjartørvi á nevndu kontu.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin vísa til tilmælið til fund í mentamálanevndini 16. januar 2019 og fígging í málinum 19/00144.

**Fíggjarnevndin 31. januar 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Útsett.

Býráðsfundur 28. februar 2019: Tróndur Sigurðsson setti fram soljóðandi broytingaruppskot: Mælt verður til at finna aðra staðseting.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið, ið fall við 5 atkvøðum fyri, 7 atkvøðum móti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø og Bjørg Dam

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Tráin Nónklett, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið var samtykt við 8 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 4 blonkum.

Fyri atkvøddu : Annika Olsen, Gunvør Balle,Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Tráin Nónklett og Odd Færø.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, og Bjørg Dam.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni, og tók Tráin Nónklett sæti í hennara stað.

**Ískoyti**
**Viðv. Skatefelagnum**
Umsitingin hevur verið í endaligum samráði við felagið og eru samd um hjálagda uppskot til samstarvsavtalu millum TK og Skatefelagið. Avtalan inniber at Skatefelagið fær upp til 240 tkr. í stuðli til

at byggja skateanleggið, umframt at felagið skal rinda 1.667 kr./mánaðin fyri hallarleigu, umframt ljós. Felagið verður at samstarva við Havnar Klintrifelag um praktisk viðurskifti í hølunum, reingerð v.m. Stuðulin til anleggið verður rindaður av konto L57029 Smærri ítróttaanlegg, har fígging er markað av til endamálið av játtanini fyri 2018, sí mál 18/03320. Stuðul til ókeypis hallarleigu verður rindað av konto 5365 Stuðul til Ítrótt. Roknað verður við at anleggið kemur í rakstur í heyst.

Ítróttaanlegg kemur at hava umsjón og kemur at standa fyri leigumálinum í mun til Tórshavnar havn og standa fyri brúksleigumálinum í mun til Skatefelagið og Havnar Klintrifelag.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at innganga hjáløgdu avtalu við Skatefelagið og játta 240 tkr. í stuðli til anleggið av konto L57029 (2018).

**Mentamálanevndin 03. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Í viðgerðini seinast var ikki greitt tilskilað, at TK ger leiguavtalu við Tórshavnar havn um hølini í Bacalao-bygningum. Vinnunevndin hevur áður samtykt at gera leiguavtalu, men skal nú formliga góðkennast í fíggjarnevndini at gera leiguavtalu fyri hølini. Ítróttanlegg kemur at standa fyri leigumálinum og sendir so rokning fyri part av leiguni til feløgini sbrt. samtyktu samstarvsavtalunum við Skatefelagið og Havnar Klintrifelag (mál 16/03313 Havnar klintrifelag). Leigumálið við Tórshavnar havn tekur við pr. 1. nov. 2019 tá hølini vóru klár at taka í nýtslu.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heita á fíggjarnevndina um at samtykkja at inngang hjáløgdu leiguavtalu. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við fyriliggjandi leiguavtalu.

**Ískoyti:**
Verkætlanirnar í skatehøllini og í klintrihøllini í Bacalao (mál 16/03313) verða eftirmettar undir einum. (Avhending av høvuðsarbeiðstøkuni í Bacalao var í juli 2019).

Sum heild verður mett at arbeiðið er væl frágingið og sbrt. ætlan. Stórur partur av byggingini av sjálvum anleggunum hevur verið við sjálvbodnari arbeiðsmegi sbrt. samstarvsavtalunum við feløgini.

Nú verkætlanirnar vera lokaðar kann staðfestast, at játtanin til báðar verkætlanir hevur so gott sum hildið. Endaúrslitið er ein meirnýtsla á 5.897 kr., ið verður at taka av løgukarminum 5775, ítróttur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at loka verkætlanirnar í Bacalao viðv. skate og klintring við eini meirnýtslu á 5.897 kr., og at henda upphædd verður fíggjað av løgukarminum 5775. Málið verður beint í fíggjarnevndina og síðani býráðið til kunningar.

**Mentamálanevndin 09. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

## 222/21 Stórhøll

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.09.2021 | 238/21 | 21/03920-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 222/21 | 21/03920-1 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kommuna saman við handils- og vinnulívi vilja taka stig til at byggja altjóða stórhøll.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Endamál við stórhøllini er at skapa bestu karmar til stór føroysk og altjóða tiltøk innan ítrótt, mentan, ráðstevnur, keypsstevnur, samkomumøtir v.m., umframt at vera karmur sum ítróttahøll til flestu innandura ítróttagreinir.

Kommunan hevur havt ætlan um stórhøll í høvuðsstaðnum í fleiri ár, og kommunan hevur áður sett sett fígging á íløgujáttanina til fyrireikingar.

Í eina tíð hevur samskifti verið við partar úr handils- og vinnulívinum við tí endamáli saman at fáa bygt eina stórhøll, sum mett verður Føroyar hava stóran tørv á. Í uppskoti er at byggja stórhøll við eini brutto gólvvídd uppá 8.350 m2 og planerað lendi uppá 23.000 m2, harímillum 650 parkeringspláss. Kostnaðarmeting er kr. 217,8 mió u/mvg.

Stórhøllin er ætlað eisini at verða partur av føroysku tilbúgvingini við egnari streym- og hitaveiting; høllin kann herberga stórari mannfjøld, skuldi kreppustøða gjørt tað neyðugt.

Sjálv stórhøllin kann skipast alt eftir tiltøkunum. Til ein hondbóltsdyst kunnu vera eini 2.700 áskoðarar, og til eina konsert, har áskoðararnir standa, kunnu vera 4.600. Sita áskoðararnir, er pláss fyri uml. 3.600. Aftrat høllini eru umklæðingarrúm, fundarhøli, veitingarrúm, goymsla v.m.

Mett verður, at byggitíðin er 20 mðr.

Sambært ætlanini skal sjálvsognarfelag standa fyri byggingini og eiga stórhøllina, og rakstrarfelag skal standa fyri dagliga rakstrinum av høllini. Hesi feløg eru ikki stovnað enn.

Í uppskoti er, at Tórshavnar kommuna ber 50% av samlaða byggikostnaðinum, meðan restfíggingin skal koma frá stuðli frá fyritøkum og úr ymsum grunnum heima og uttanlands. Við støði í kostnaðarmetingini er kommununnar lutur at fíggja kr. 108,9 mió u/mvg.

Kommuna kann sambært kommunustýrislógini grein 50 einans taka lut í vinnuligum virksemi, um so er, at virksemið tænir einum almannagagnligum endamáli og ikki hevur vinning fyri eyga. Eisini er ásett, at kommuna kann seta almenn tiltøk í verk, um so er, at hetta er til frama fyri vinnulívið á staðnum, men stuðul til einstaklingar ella einstakt virki má ikki latast uttan so, at serligar orsøkir eru.

Stórhøllin sum karmur hevur í sær mangar møguleikar bæði av almannagagnligum og vinnuligum slag, sum ikki eru til í Føroyum frammanundan, men sum stórur tørvur er á serliga innan ávísar ítróttagreinir og events.

Tórshavnar kommununa hevur harumframt sum mál at gera Tórshavn til altjóða ráðstevnubý, sum handils- og vinnulívið og stovnar annars fyriskipa, og sum er við til at stuðla undir menningina av ferðavinnuni og tænastuvinnuni í kommununi.

Leikluturin hjá kommununi at fíggja part av byggingini, so at stórhøll í høvuðsstaðarøkinum kann realiserast, er fyrst og fremst tann at fáa til vega serstakar karmar til almannagagnlig endamál innan ítrótt, mentan og almennar upplivingar annars, umframt at handils- og vinnulívið eins væl og tað almenna kann fáa atgongd til nútímans høli og hentleikar, sum kunnu draga til býin og landið stór tiltøk. Ein stórhøll skapar nýggjar forteytir fyri samfelagsmenningini eisini í kappingini við okkara grannalond.

Til tess at seta sjøtul á verkætlanini er neyðugt, at kommunan gevur tilsøgn um hennara part av fíggingini soleiðis, at fyrireikingararbeiðið kann gerast meira ítøkiligt, harundir eisini at fáa til vega alla fíggingina, og at skipa formligu viðurskiftini viðvíkjandi bygging, lendisútvegan, ognarviðurskifti v.m.

Kommunan eigur at seta sum treyt fyri tilsøgn um fígging, at játtanin verður ikki goldin uttan so, at kommunan eins væl og sjálvsognarfelagið undir stovnan hava fingið øll myndugleikaloyvi til vega, og at játtan er sett av á fíggjarætlanini.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla býráðnum til at taka støðu til, um kommunan skal veita sjálvsognarfelagnum undir stovnan tilsøgn uppá 50% ella í mesta lagi kr. 108,9 mió í fígging til byggingina av stórhøllini treytað av, at øll loyvi fyriliggja, og um játtað, at seta neyðugu fíggingina til vega í fíggjarætlanini.

**Fíggjarnevndin 28. september 2021:** Annika Olsen og Elsa Berg seta fram soljóðandi broytingaruppskot: Tórshavnar kommuna fer undir arbeiðið at byggja eina stórhøll í samráð við ítróttarfeløg í kommununi og privatum aktørum. Kommunan stuðlar byggingini við at lata lendi og gera lendisarbeiðið. Fíggingin til hallarbyggingina skal fáast til vega frá privatum aktørum. Setast skal sum treyt, at kommunan yvirtekur ognarrættin og raksturin av høllini, tá høllin er liðug.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Anniku Olsen og Elsu Berg, ið fall við tveimum atkvøðum fyri og trimum ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen og Elsa Berg.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá kommunustjóranum og trivnaðarstjóranum, og samtykti ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðson og Annfinn Brekkstein, at kommunan veitir sjálvsognarfelagnum undir stovnan tilsøgn uppá 50% av samlaða kostnaðinum ella í mesta lagi kr. 108,9 mió í fígging til byggingina av stórhøllini treytað av, at øll loyvi fyriliggja og at sjálvsognarfelagið sjálvt útvegar restina av fíggingini. Fíggingin verður at seta á fíggjarætlanina, tá ið verkætlanin fer í gongd.

Annika Olsen og Elsa Berg atkvøddu blankt.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot frá Gunvør Balle um at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina og mentamálanevndina, ið fall við fimm atkvøðum fyri, sjey ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jón Kragesteen, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Blankt atkvøddi: Birgir Nielsen.

Síðani varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Anniku Olsen:

Tórshavnar kommuna fer undir arbeiðið at byggja eina stórhøll í samráð við ítróttarfeløg í kommununi og privatum aktørum. Kommunan stuðlar byggingini við at lata lendi og gera lendisarbeiðið. Fíggingin til hallarbyggingina skal fáast til vega frá privatum aktørum. Setast skal sum treyt, at kommunan yvirtekur ognarrættin og raksturin av høllini, tá høllin er liðug. Og at heita á landið um at vera við í fíggingini.

Broytingaruppskotið fall við seks atkvøðum fyri, seks ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkøddu: Elsa Berg, Jón Kragesteen, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, fýra blonkum og ongari ímóti.

Fyri atkvødddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jón Kragesteen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

## 223/21 Kirkjugarðsleiðin í Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2021 | 64/21 | 21/01366-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 90/21 | 21/01366-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 122/21 | 21/01366-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 144/21 | 21/01366-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 215/21 | 21/01366-1 |
| 6 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 223/21 | 21/01366-1 |

**Upprunin til málið**
Hoyvíkar kirkja umframt borgarar í Hoyvík hava í fleiri umførum víst á ynski um at fáa betra um kirkjugarðsleiðina, soleiðis at líkbilurin við fylginum kann fara umvegis Dalin Langa niðan í kirkjugarðin.

**Lýsing av málinum**
Hoyvíkar kirkja varð bygd í 2007, og liggur sunnan fyri miðstaðargøtuna Karlamagnusarbreyt. Kirkjugarðurin er staðsettur norðan fyri Klingruna.

Í dag koyrir líkbilurin eftir Løgmannabreyt, tá líkfylgið fer seinastu ferðina úr kirkjuni niðan í kirkjugarðin. Hetta verður ikki mett sum ein serliga virðilig leið, umframt at leiðin tykist rættiliga long.

Enn eru ikki nógvar gravir í brúk í kirkjugarðinum, men ynskiligt hevur verið, at seinasta leiðin úr kirkjuni niðan í kirkjugarðin verður betra og gjørd meiri virðilig.

Heildarætlanin fyri Karlamagnusarbreyt vísir á, at kirkjutorgið, sum er norðan fyri kirkjuna og gongur yvir til skúlan eystaneftir og parkeringsøkið vestaneftir skal gerast til eitt kirkjutorg, sum kann brúkast av borgarum í Hoyvík til hátíðarhald, umframt at skúlin kann brúka økið í gerandisdegnum. Torgið skal somuleiðis gerast við eini av- og á skipan, soleiðis at møguligt verður at seta fólk og børn trygt av, tá tey antin skulu í skúla ella kirkju. Harumframt vísir heildarætlanin á eina leið frá hesum torginum yvir til verandi gøtu í Dalinum Langa, sum síðani skal bindast í kirkjugarðin, soleiðis at líkfylgið kann fara beina leið niðan í kirkjugarðin umvegis Dalin Langa.

Loysn skal finnast á, hvussu leiðin kann gerast í økinum millum Hoyvíkar skúla og bústaðarøkið Myllutjørn, umframt at ein loysn má finnast á, hvussu leiðin fer tvørtur um Klingruna. Harumframt skal gøtan betrast, soleiðis at líkbilurin kann koyra á gøtuni.

Tað er ikki ætlanin, at aðrir bilar enn líkbilurin skulu kunna koyra hesa leiðina, so neyðugt verður við eini forðing í báðum endunum á leiðini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
A3 í 3. Grundumráði í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu - Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.

D1 í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu - Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggisamtykt fyri økið.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tekniska deild upplýsir, at neyðugt verður at taka hædd fyri áarløki, sum gongur frá Mylnutjørn oman í ítróttar/skúlaøkið.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
Kirkjugarðsleiðin_yvirlitstekning_j. nr. 21/01366-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at farið verður undir at skipa kirkjugarðsleiðina frá kirkjutorginum niðan í kirkjugarðin,
- at umsitingin setir arbeiðið í gongd,
- at játta 250.000 kr. av konto 6275, Fríðkan av kommununi, L00001, Løgukarmur fyri árið, til nýggja íløgu "Kirkjugarðsleiðin í Hoyvík" á konto 6275, Fríðkan av býnum, at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kirkjugarðsleiðin varð grundað á skipanaruppskot boðin út til 2 veitarar, og komu 2 tilboð inn.
Maskingkoyring við Karl Paturson bjóðaði 1.358.040,00
Sp/f Berghestar bjóðaði 1.255.332,29

Útboðið varð skipað í 3 høvuðspunkt umframt byggipláss.

0. Byggipláss
1. Nýggj og tillagað gøta millum kirkjuna og parkeringsøkið við Hoyvíkar skúla
2. Nýggj gøta millum verandi gøtu til Klingruna við innkoyring til kirkjugarðin
3. Breiðkan og umvæling av verandi gøtu millum nýggja gøtu 1 við Hoyvíkar skúla og nýggja gøtu 2 við kirkjugarðin

Til ber at seta arbeiðið í verk grundað á játtanina á 250.000,-, men játtanin røkkur einans til partvís at seta pkt. 3 í gongd.
Av tí at verkætlanin varð boðin út grundað á yvirskipað skipanaruppskot, eru størri sannlíkindi fyri at eykaarbeiði verða.
Neyðugt er við meirjáttan fyri at seta samlaðu verkætlanina í verk.

**Skjøl:**
21/01366-8 kirkjugarðsleiðin útbjóðing 2021

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at
- Játta kr. 1.250.000 á konto 6275, L62047, Kirkjugarðsleiðin í Hoyvík, fíggjað við at játta kr. 950.000 av LK62046, Løgukarmur fyri fríðkan av býnum og kr. 300.000 av LK62035, Løgukarmur fyri vetrarfriðing.

  og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

## 224/21 Útstykking oman fyri Argjahamar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.05.2021 | 102/21 | 21/01777-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.05.2021 | 115/21 | 21/01777-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 162/21 | 21/01777-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 180/21 | 21/01777-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 143/21 | 21/01777-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 13.09.2021 | 52/21 | 21/01777-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 216/21 | 21/01777-1 |
| 8 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 224/21 | 21/01777-1 |

**Upprunin til málið**
Stóri bústaðartørvurin í Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum**
Tórshavn eins og aðrir høvuðsstaðir er í teirri støðu, at tey flestu vilja búgva her. Sum høvuðsstaðarkommuna mugu vit ganga á odda til tess at finna loysnir á bústaðarøkinum. Í hesari tilgongd vilja vit skapa eina burðardygga býarmenning, har rúm er fyri øllum, har vit tætta býin og har vit gagnnýta býin skynsamari. Harumframt er tað týdningarmikið, at vit sum kommuna standa á odda fyri at veita fjølbroyttar bústaðir, bæði eigara- og leigubústaðir.

Stórur fólkavøkstur er, umframt at húskini minka alsamt. Kommunuætlanin frá 2020 vísir á, at tørvur verður á íalt 10200 bústøðum í 2032 roknað frá 2018.

Tískil er tað týdningarmikið, at kommunan eisini sjálv stendur á odda fyri at veita borgarum bústaðir, samstundis sum hon samstarvar við virkandi innan privatu vinnuna um partar av hesi uppgávuni.

Bústaðarsløgini eru vanliga býtt upp í sethús, tvíhús/raðhús og íbúðir. Tað eru nógv sum ynskja at búgva í sethúsum, umframt at vit síggja ein størri og størri áhuga fyri íbúðum. Enn manglar kommunan eitt útboð av leigubústøðum, meðan vit hava seinastu árini havt nógvar útstykkingar við íbúðum.

Kommunuætlanin vísir á ymisk lendi til býarvøkstur, har Stóratjørn stendur at verða best egnaða lendið til býarvøkstur og økið Klingurstjørn er næstbesta staðseting. Arbeitt verður við ætlanunum á Stórutjørn, og er ætlanin nú at fara í gongd við eina ætlan oman fyri Argjahamri, sí kortskjal nr. 21/01777-3, Uppskot til útstykking oman fyri Argjahamri.

Viðlagda kortskjal er ein skitsa av hvussu økið kann verða skipað við bústøðum, bæði set- , raðhúsum og íbúðum, umframt at øki verður lagt av til møguliga stovnsbygging. Neyðugt verður at umsitingin tillagar uppskotið, soleiðis at skipanin av økinum verður nøktandi, umframt at hetta kortskjalið er ikki heilt í samsvar við tað, sum er avtalað við festaran á økinum. Ymisku byggistigini síðani skulu projekterast.

Lendið, matr. nr. 4a, sum ætlanin er at fara undir at skipa til bústaðarbygging og stovnsbygging, er ogn hjá Búnaðarstovuni, har Poul Müller er festari á lendinum. Samlaða økisvíddin, sum er avtalað við festaran at fara undir at skipa sæst á kortskjalinum nr. 21/01777-6, Lendi at keypa frá Búnaðarstovuni til nýggja útstykking, er sambært kortskjalinum uml. 128.000 fermetrar til støddar.
Uppskot til ætlanaravtalu við festaran er gjørd og viðheft, sí skjal nr. 21/01777-4, Uppskot til ætlanaravtalu millum Tórshavnar kommunu og Poul Müller.

Ætlanaravtalan fevnir bæði um lendið til útstykking, umframt lendið til Viðarlund, matr. nr. 4a og matr. nr. 43a, sí kortskjal nr. 21/01777-5, Argjahamri_Viðarlund.

Samanlagt er talan um á leið 163.000 m$^2$, ið Tórshavnar kommuna skal keypa og frábýta frá Búnaðarstovuni til ætlaðu útstykkingar- og frílendisendamál.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Lóg um landsjørð

**Upplýsingar frá umsitingini**
Støða skal takast til, hvat slag av bústøðum økið skal skipast til, hvussu stór grundstykkini skulu vera og hvussu fríøkini í útstykkingini verða skipaði og tryggjaði. Harumframt er týdningarmikið, at útstykkingin í størstan mun tillagar seg lendið og at eitt nú leiðin niðan á Kongavarða verður varðveitt.
Ein umhvørvis árinismeting eigur at verða gjørd av lendinum, áðrenn farið verður undir at skipa tað endaligt, soleiðis at atlit kunnu verða tikin til serlig viðurskiftir í økinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
21/01777-3, Uppskot til útstykking oman fyri Argjahamri
21/01777-4, Uppskot til ætlanaravtalu millum Tórshavnar kommunu og Poul Müller
21/01777-5, Argjahamri_Viðarlund
21/01777-6, Lendi at keypa frá Búnaðarstovuni til nýggja útstykking

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At lendið, sambært kortskjali 21/01777-6, verður lagt av til nýggja útstykking í kommununi, og at umsitingin fer undir at skipa økið neyvari.
- At heimila umsitingini at bjóða projekteringina út.
- At ætlanaravtalan, skjal nr. 21/01777-4, verður samtykt.
- At heimila umsitingini at søkja Búnaðarstovuna um at keypa lendið sambært kortskjali 21/01777-5 og 21/01777-6.
- At málið verður beint aftur í nevnd, tá samlaði lendiskostnaðurin er kendur.
- Og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. mai 2021:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Tórshavnar kommuna hevur fingið tilsøgn frá Búnaðarstovuni um keyp av lendi til ætlaðu útstykkingina á Argjahamri. Umsóknin hevur verið til ummælis hjá festaranum, sum ikki hevur viðmerkingar til ætlanirnar hjá kommununi. Kommunan skal rinda umleið 15 mió. kr. fyri at ogna sær lendið v.m., og kemur hesin peningur heilt ella lutvíst inn aftur, tá ið grundøkini í útstykkingini verða seld. Mælt verður til at fíggja keypið av tøkum peningi.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at játta kr. 15 mió. av tøkum peningi til keyp av lendi til nýggja útstykking omanfyri Argjahamar og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Í tilsøgn dagfest 16. juni 2021 hevur Búnaðarstovan útgreinað samlaða kostnaðin, ið Tórshavnar kommuna skal rinda fyri útvegan av lendi til ætlaðu útstykkingina omanfyri Argjahamar. Samlaðu útreiðslurnar fyri kommununa verða umleið 13 mió. kr., ið mælt verður til at játtað av tøkum peningi.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tá Tórshavnar kommuna hevur fingið til vega lendið oman fyri Argjahamar og Klingurstjørn, og lendið sunnan fyri verandi útstykking á Hamrinum, er neyðugt við eini tilgongd at fyrireika økið til byggibúning.

Lendið oman fyri Argjahamar og Klingurstjørn og lendið uttan fyri Argjahamar er soleiðis háttað, at tað er av størsta týdningi, at greiða fyrst fæst á, hvussu infrakervið í økinum verður skipað fyri á optimalan hátt at knýta saman byggilendi. Eisini er neyðugt út frá hesum at gera skipanaruppskot fyri byggingina, grøn øki, parkering o.s.fr. Til hetta krevst ein projektering av vegum, leiðingum og møguligum byggiøkjum í 3D.

Mett verður, at hetta projekteringsarbeiðið til skipanaruppskot í fyrstu syftu kann gerast av uttanhýsis ráðgeva innan fyri eina rammuupphædd á kr. 200.000,-. Málið verður lagt aftur fyri nevnd, tá innleiðandi projekteringsarbeiðið er komið á mál uml. einar 4 vikur eftir at peingurin er játtaður.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin, og býarverkfrøðingurin mæla til, at játtaðar verða kr. 200.000,- av konto 8175, LK81042, Vegaverkætlanir á nýggja verkætlan, "Útstykking oman fyri Argjahamar" undir kt. 6475, Byggibúning bústaðir, og at málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og bárskipanarnevndini og teknisku nevnd við teirri broyting, at peningurin verður játtaður av kto 6475 og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

## 225/21 Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 02.10.2017 | 20/17 | 17/03196-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 227/17 | 17/03196-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 240/17 | 17/03196-1 |
| 4 Eldranevndin | 21.08.2018 | 4/18 | 17/03196-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 232/18 | 17/03196-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.01.2019 | 3/19 | 17/03196-1 |
| 7 Eldranevndin | 14.02.2019 | 20/19 | 17/03196-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 50/19 | 17/03196-1 |
| 9 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 35/19 | 17/03196-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2019 | 110/19 | 17/03196-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 165/19 | 17/03196-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 232/19 | 17/03196-1 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2020 | 35/20 | 17/03196-1 |
| 14 Eldranevndin | 06.02.2020 | 31/20 | 17/03196-1 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.09.2020 | 181/20 | 17/03196-1 |
| 16 Eldranevndin | 10.09.2020 | 12/20 | 17/03196-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 213/20 | 17/03196-1 |
| 18 Eldranevndin | 15.09.2020 | 15/20 | 17/03196-1 |
| 19 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 188/20 | 17/03196-1 |
| 20 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 146/21 | 17/03196-1 |
| 21 Heilsu- og eldranevndin | 14.09.2021 | 24/21 | 17/03196-1 |
| 22 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 217/21 | 17/03196-1 |
| 23 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 225/21 | 17/03196-1 |

**Málslýsing:**
Víst verður til virkisætlan og tilmæli latin eldranevndini 11. september 2017 (j.nr. 17/00586), har tað m.a. verður mælt til at byggja nýtt røktarheim umfrant atknýttar røktaríbúðum í høvuðsstaðarøkinum. Tilmælið verður nærri útgreinað niðanfyri.

Í lógini um heimatænastu, eldraøkt v.m. frá 2014 er í grein 13 ásett, at kommunur kunnu seta á stovn bústaðir til fólkapensjónistar eftir hesi lóg. Bústaðir kunnu sbrt. stk. 2 fevna um 1) røktarheim, 2) eldrasambýli, 3) eldraíbúðir, 4) umlættingarpláss og 5) samdøgursendurvenjingarpláss.

Viðmerkingarnar til lógina útgreina ikki hesar bústaðarloysnir nærri, ella hvussu tær skulu koma til vega. Ásetingin er ásannandi breiða politiska ynskið um, at bústaðarmarknaðurin eisini til eldri verður meira fjøltáttaður. Eftir stendur tó, at kommunur hava heimild og initiativ til at fáa til vega aðrar bústaðarloysnir enn røktarheim.

Tórshavnar kommuna hevur í dag 203 røktarbúpláss, harav eru 145 búpláss til røktarkrevjandi og 58 búpláss til fólk við demenssjúku. Harafturat eru 11 umlættingarpláss og 5 samdøgurs-rehabiliteringspláss.

Umleið 50 av teimum 145 búplássunum eru Ellisheim/sambýlispláss, sum eru roknað til lættari røktarkrevjandi umframt til onnur, sum eitt nú ikki kunnu búgva einsamøll.

Heilsu- og umsorganartænastan stendur fyri hesum búplássum, men hevur ikki onnur bústaðarsløg at bjóða.

Tá um hesi bústaðarsløg ræður, eins og í mun til onnur nýggj sløg, sum kommunan og heilsu- og umsorganartænastan í dag ikki kunnu bjóða, er týdningarmikið at hava greitt, hvat meint verður við, og til hvønn tørv hjá teimum eldru, ið loysnin er ætlað til. Hetta verður lýst nærri niðanfyri.

Búpláss:

- Búpláss til røktarkrevjandi á røktarheimi er ætlað eldri fólki, sum eru illa fyri, vanliga tí tey eru sjúk og tí hava tørv á at búgva á búplássi við røktarstarvsfólki um tey alt samdøgrið. Fast búpláss er síðsta loysnin, ið brúkt verður, sum fólk gerast verri fyri. Røktarheimini hýsa borgarum, sum krevja røkt og hjáveru alt samdøgrið.

- Ellisheimið og sambýlini hýsa borgarum, sum eru lættari røktarkrevjandi og/ella sum ikki kunnu búgva einsamøll. Tvs., at húsfólk á Ellisheiminum og sambýlinum eru betur fyri, tá tey flyta inn enn tey, sum flyta inn á røktarheim at búgva.

- Eisini demensbúpláss eru røktarbúpláss, har røktarstarvsfólk eru til staðar alt samdøgrið, men hesi búpláss eru á stovnum ella deildum, sum einans eru ætlað eldri fólki við demenssjúku. Fólk við demenssjúku hava aðrar avbjóðingar enn eldri fólk við øðrum røktarkrevjandi sjúkum, og tí tørvar teimum at sleppa á búpláss, sum serliga eru ætlað fólki við demenssjúku.

Íbúðir:
Við støði í lógarásetingini, sum nevnd er omanfyri, so eru eldraíbúðir eisini bústaðarloysn, ið kommunur kunnu stovna. Ymiskt kann leggjast í fatan av, hvat ein eldaríbúð er, tí talan er um felagsheiti fyri ymsar bústaðarloysnir.

Niðanfyri verður felagsheitið eldraíbúð brotið upp í tvær ymiskar bústaðarloysnir – røktaríbúð og eldravinarliga íbúðir. Hesar kunnu aftur býtast sundur alt eftir, hvørt talan eru leiguíbúð ella eigaraíbúð.

Felags fyri allar eldraíbúðir er tó, at tær skulu vera innrættaðar hóskandi við breiðum hurðum, ongum gáttum, egnum vesi og rúmligum baðirúmi, so tað er pláss fyri koyristóli og hjálparfólki. Íbúðirnar skulu ikki hava trappu til høvuðsinngond, og um íbúðin er ikki í veghædd, skal lyft vera til íbúðina.

Eitt annað, ið eisini er øðrvísi við eldraíbúðum í mun til búpláss á røktarheimi er, at í íbúðunum kunnu búgva hjún/sambúgvandi.

- Røktaríbúð vil vanliga vera næstsíðsti bústaðurin, áðrenn upptøku til fast røktarheimspláss. Hetta vilja vera borgarar, sum heimatænastan hevur veitt tænastur til, men har mett verður, at borgarin og evt. saman við makanum høvdu fingið betri umstøður við at flyta í røktaríbúð, har røktarstarvsfólk eisini er knýtt at alt samdøgrið. Málbólkurin vildi eisini verið borgarar, sum í dag vera visiteraðir til ellisheim/sambýli.

  Røktaríbúðir kunnu við tí største fyrimuni byggjast saman við einum røktarheimi, har borgarin fær ágóða av øllum felagsfasilitetunum eitt nú venjingarumstøðum og trivnaðartilboðum annars. Eru røktaríbúðir knýttar at røktarheimi, verða tað starvsfólk á røktarheiminum, sum veita ta heimatænastu, ið borgarin annars vildi fingið sum heimabúgvandi. Hetta lættir sostatt um hjá heimatænastuni, men krevur ávísa tillaging av røktarnormeringini á heiminum.

Kommunan hevur heimild byggja og reka røktaríbúðir, har heilsu- og umsorganartænastan hevur visitatiónina um hendi. Til ber tó eisini, at aðrir partar byggja og reka røktarleiguíbúðirnar, og har kommunan gjøgnum avtalu hevur visitatiónsrætt til allar røktaríbúðirnar.

- Eldravinarliga íbúð er íbúð, sum er innrættað hóskandi sum omanfyri lýst við breiðum hurðum, ongum gáttum, egnum vesi og bað o.s.fr. Onnur krøv eru sum so ikki, og íbúðin kann eins væl nýtast av øðrum yngri borgarum.

  Eldravinarlig íbúð kann tí byggjast sum einstakar íbúðir í størri íbúðarbygningi ella sum eldraíbúðardepil, tvs. nógvar eldravinarligar íbúðir í sama kompleksi. Alt eftir, hvussu nógvar eldravinarligar íbúðir vildi verið í slíkum kompleksi, har tað eisini mest sannlíkt er ávíst tal av borgarum, sum hava tørv á heimatænatuni, kundi hølisumstøður til heimatænastu verið knýttar at staðnum.

  Kommunan hevur heimild at byggja og reka eldravinarligar íbúðir, har heilsu- og umsorganartænastan hevur visitatiónsrætt. Til ber tó eisini, at aðrir partar, t.d. Bústaðir ella íleggjarar, byggja og reka eldravinarliga leiguíbúðirnar, og har kommunan gjøgnum avtalu eisini hevur visitatiónsrætt til nakrar ella allar teirra.

  Har tað í mun til røktaríbúðir vilja verða borgarar, sum frammanundan fáa heimatænastu og aðrar tænastur frá heilsu- og umsorganartænastuni, ið verða visiterað til røktaríbúð, so nýtist ikki sama at verða galdandi fyri eldravinarligu íbúðirnar. Talið av pensjónistum økist í stórum, og nógv av hesum eru vegna góða heilsustøðu als ikki í skipanini hjá heilsu- og umsorganartænastuni.

  Skal heilsu- og umsorganartænastan visiterað til eldravinarligar íbúðir, má gerast ein skipan, har ávís metingarkriteriu eru ásett, eisini fyri at ikki at hava fleiri bíðilistar til somu íbúðir (at fólk skriva seg upp bæði hjá kommununi og t.d. Bústøðum).

Út frá omanfyri standandi verður mett skilabest í mun til tey bútilboð, ið heilsu- og umsorganartænastan skal veita, at røktaríbúðir og røktarheim verða bygd í somu bygging ella beint upp at.

Røktaríbúðir er í føroyskum samanhangi nýtt konsept, ið skal mennast, eitt nú í mun til samstarv við aðrar áhugapartar – eitt nú Bústaðir, byggivinnuna, fíggjarstovnar v.m. Røktaríbúðirnar, hóast bygdar saman við ella upp at einum røktarheimi, eru leiguíbúðir, og kunnu tí byggjast og umsitast við støði í tí, men har kommunan tryggjar sær fullan visitatiónsrætt.

Júst hvussu hetta kann gerast ella hvørjir samstarvshættir eru møguligir, eigur henda verkætlanartilgongdin at koma til niðurstøðu um.

Í virkisætlanini er víst á ein endurnýggjanartørv, tvs. antin dagføra ella niðurleggja verandi ótíðarhóskandi pláss. Víst er eitt nú á Ellisheimið, sum krevur umfevnandi dagføringar, ið illa loysa seg fíggjarliga. Verkætlanartilgongdin eigur eisini at fyrihalda seg til henda spurning m.a. við atliti at, hvussu hesi 27 búplássini kunnu endurnýggjast møguliga sum eitt lutfall millum føst røktarbúpláss og røktaríbúðir aftrat tí tørvi, sum røktarheimið annars skal røkka.

Í sambandi við bygging av nýggjum røktarheimi skal vælferðartøkni og sniIdtøkni (samskiftisútgerð, trygdar- og ávaringarskipanir) integrerast.

Til tess at seta hol á bygging av nýtt røktarheim, verður mett skilabest at seta bygginevnd við støði í mannagongdini fyri verkætlanir, har býráðið velur tveir nevndarlimir og borgarstjórin tilnevndi eitt umboð fyri ávikavist teknisku fyrisiting, miðfyrisitingin og trivnaðarfyrisitingina.

Bygginevndin skal sum tað fyrsta útvega byggiskrá og definera byggingina nærri í mun til støddir, luftfall røktarbúpláss, harundir eisini demensbúpláss, og røktaríbúðir, eins og at bygginevndin saman við politisku

skipanini annars mennir ein samstarvsháttt við aðrar áhugapartar í sambandi við bygging og umsiting av røktaríbúðum.

Til endamálið er neyðugt við játtan til fyrireikingar, ráðgeving v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at seta bygginevnd til sum tað fyrsta at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum, og í hesum sambandi játta kr. 1 mió til fyrireikingar, ráðgeving v.m. av tøkum løgukarmi konta 2775 eldrarøkt.

**Eldranevndin 02. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:**
Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini og at velja Bjørghild Djurhuus og Bergunn Kass í bygginevndina.

**Ískoyti:**
26 okt. 2017 samtykti býráðið at seta bygginevnd sum tað fyrsta at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum, og í hesum sambandi at játta kr. 1. mió til fyrireiking, ráðgeving v.m. av tøkum løgukarmi konta 2775 eldrarøkt.
Bygginevnd bleiv sett fyrst í hesum árinum og hevur havt tveir fundir. Bygginevndin metir, at arbeiðssetningurin er ikki nóg neyvur og ynskir tí at fáa ein greiðari arbeiðssetning, áðrenn nevndin kann fara víðari við arbeiðinum. Serliga verður hugsað um at fáa nágreinað, hvussu nógv húsfólk røktarheimið skal byggjast til.

Sambært nýggjastu framrokningunum hjá Hagstovuni verður mett, at tað vera 1.124 fólk eldri enn 80+ ár í Tórshavnar kommunu í 2025. Í 2018 er hetta tal 811 fólk. Fyri at nøkta vaksandi tørvin á røktarheimsplássum til ta tíð, er neyðugt at økja um búplássini.

Umframt at byggja til vaksandi tørv á búplássum, er – sum lýst í virkisætlanini (j.nr. 17/00586) og málslýsingini frammanfyri- ætlanin, at nýggja røktarheimsbyggingin skal vera við til at endurnýggja verandi pláss, sum eru ótíðarhóskandi, fyrst og fremst Ellisheimið.

Sum kunnugt verður umbyggingin av Tjarnargarði í løtuni projekterað, har pláss verður fyri 7 nýggjum umlættingarplássum til fólk við demenssjúku – arbeiðið verður eftir ætlan boðið út um stutta tíð. Harafturat verður umlættingar- og rehabiliteringsdepil við 28 plássum fyrireikaður. Tá hesar ætlanir eru komnar á mál, verða 9 av verandi plássum umløgd til føst búpláss.

Umframt omanfyri nevndu átøk, so verður mett neyðugt, at nýggja røktarheimið hevur 48 búpláss, t.e. tríggjar deildir við 16 húsfólkum á hvørjari deild eins og Lágargarður, umframt 8 røktaríbúðir. Hetta gevur í alt 56 pláss. Av hesum 56 plássum er ætlanin, at 25 av hesum er endurnýggjan av plássunum á Ellisheiminum, ið soleiðis kann niðurleggjast sum ellisheim.

Hesar ætlarnir tilsamans geva í 2025 eitt dekningsstig á 26,5% , sí talvu niðanfyri, og sum er eitt vet hægri enn dekningsstigið í dag.

| TÓRSHAVNAR KOMMUNA | Ár 2000 | | Ár 2010 | | Ár 2019 | | Ár 2020 | | Ár 2025 | | Ár 2030 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólkatal, 80+ ár | 457 | | 669 | | 850 | | 906 | | 1.124 | | 1.415 | |
| **Pláss/Fólkatal 80+ ár (dekningsstig)** | | | | | | | | | | | | |
| **Pláss/Dekningsstig** | 97 | 21,2% | 155 | 23,2% | 222 | 26,1% | 251 | 27,7% | 298 | 26,5% | 298 | 21,1% |
| *har av røktarbúpláss* | 87 | 19,0% | 145 | 21,7% | 204 | 24,0% | 213 | 23,5% | 252 | 22,4% | 252 | 17,8% |
| *har av stutttíðarpláss* | 10 | 2,2% | 10 | 1,5% | 18 | 2,1% | 38 | 4,2% | 38 | 3,4% | 38 | 2,7% |
| *har av røktaríbúðir* | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 8 | 0,7% | 8 | 0,6% |

**Fólkatalsframrokning 80+ ár pr. 06.06.2018, hagstovan.fo*

**íroknað nýggjum Umlættingar- og rehabiliteringsdepli og útbyggingini av Tjarnargarði til demensdepil*

*Nýtt røktarheimi + endurnýggja plássini á Ellis-heiminum.*
*(+) 48 (-) 25 = 23 nýggj*
*(+) røktaríbúðir = 8 stk.*
*(+) eina lon afturat á 16 stk.*

Eitt nýtt røktarheim við 48 búplássum og 8 røktaríbúðum verður mett at vera skilagóð stødd, eisini sum rakstrareind. Búeindir á 16, sum ofta verður koyrt í 2, tvs. 8 og 8 á somu eind er eisini skilagóð stødd í mun til at fólk búgva saman.

Mett verður harafturat skilabest, at staðseting og byggingin er soleiðis háttað, at til ber at byggja røktarheimið út seinni.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og eindarleiðararnir í H og U mæla til at samtykkja fylgjandi arbeiðssetning fyri ætlanina:

At fáa til vega byggiskrá fyri bygging av nýggjum røktarheimi við 48 búplássum og 8 atknýttum røktaríbúðum, at staðsetingin og byggingin kann skipast soleiðis at tað lættliga ber til at útbyggja røktarheimið við einari ella tveimum deildum eftir tørvi.

**Eldranevndin 21. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og staðsetingina í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Samtykt at mæla býráðnum til at broyta byggiskránna fyri bygging av nýggjum røktarheimi til at fevna um 64 búpláss og 16 røktaríbúðir og at beina málið í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina viðvíkjandi staðseting.

**Ískoyti:**
Í sambandi við byggiverkætlanina at byggja nýtt røktarheim við røktaríbúðum verður mett, at tørvur er á einum bygningi samsvarandi 6600 $m^2$ í byggistigi. Her er sum heild talan um ein bygning í tveimum hæddum, sum tó verður tilevnaður eftir tørvi og ynskjum, sniðgeving, innrætting og ikki minst hvussu bygningurin verður staðsettur í landslagnum. Tørvur er tískil á einum øki á í minsta lagi 11.000 $m^2$. Og verður hugsað um møguligar framtíðar útbyggingar, er talan um eitt samsvarandi størri øki.

Umsitingin hevur umrøtt spurningin um øki til eitt nýtt røktarheim við røktaríbúðum í tráð við býarplanleggingina, og vísir umsitingin á eitt øki úti í Marknagili í Tórshavn, sí kortskjalið “*Nýtt røktarheim við røktaríbúðum_kort*”.

Um hugt verður eftir Marknagili sum býarparti, so er økið nógv broytt seinastu tíðina við stórum byggiverkætlanum, sum somuleiðis skapa nógv virksemi í økinum. Sambært kommunuætlanini er Marknagil ein býarpartsdepil, har býarvøkstur verður skipaður við at miðsavna ymiskt virksemi á einum

stað. Í býarpartsdeplinum skal fram um alt vera virksemi sum handlar við gerandisvørum, stovnar, skúlar, útbúgving, býlingshús og mentanarligt virksemi.

Økið, sum umsitingin vísir á, er partur av ávegis heildarætlanini fyri økið við og omanfyri býlingin undir Fjalli. Skipanaruppskotið í heildarætlanini fevnir um infrakervi, bústaðarbygging og almennar stovnar, og er økið millum Dánjalstrøð og íbúðarbyggingina MARK lagt út til stovnsbygging. Eitt ellisheim hóskar væl inn í býarskipanina í økinum, og hóast økið liggur upp at einum høvuðsvegi, so verður bygt burtur frá ferðsluni í sera náttúruvøkrum umhvørvi, har byggingin somuleiðis tekur atlit til verandi lendið.

Í sambandi við skipanaruppskotið skal infrakervið í økinum víðkast. Dánjalstrøð gerst høvuðsvegur til nýggja útstykking, og í sambandi við eitt nýtt ellisheim er neyðugt at gera fyrsta strekkið av vegnum, sum er áleið 220 metrar. Ein yvirskipaður kostnaður er kr. 25.000 + mvg pr./m.

Økið er partur av Húsahaga, matr. 1160a, umframt matriklunum 1172a og 1176. Eitt hóskandi øki skal frámatrikulerast til endamálið, og er neyðugt við eini marknaumskipan, sum verður send Umhvørvisstovuni til avgreiðslu.

Økið liggur í økispartunum D1 og D3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum eru øki ætlað til almenning, náttúrufriðingar- og mentanar endamál, umframt stórum almennum stovnum til umsiting, skúlaskap og heilsurøkt. Neyðugt er sostatt at broyta almennu byggisamtyktini til endamálið, umframt at serstøk byggisamtykt skal gerast fyri nýggju útstykkingina.

**Onnur mál, ið hava týdning fyri málið:**
Skipan av økinum oman fyri Marknagilsvegin og undir Fjalli, journal nr. 18/01811.

**Skjøl:**
Nýtt røktarheim við røktaríbúðum_kort, journal nr. 17/03196-15

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til prinsipielt at góðkenna staðsetingina, at umsitingin arbeiðir víðari við staðsetingini og myndugleikaviðgerð, at beina málið í eldranevndina til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Bjørg Dam, mælir til at finna aðra staðseting nærri sjónum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Eldranevndin 14. februar 2019:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Atkvøtt varð um uppskot frá borgarstjóranum um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø og Bjørg Dam.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

**Ískoyti:**

Í sambandi við ætlanina at staðseta nýtt røktarheim og gera nýggja vegaføring úti í Marknagili, hevur eigarafelagið á Dánjalstrøð sent kommununi mótmæli, har sjónarmiðini í høvuðsheitum eru:

- at neyðugt er at broyta byggisamtyktina til endamálið, tí økið liggur í økispartunum D1 og D3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Í hesum sambandi verður harðliga mælt ímóti, at býráðið ætlar at strika økið sum D1 øki, tí tey seinastu 30 árini hava tey innrættað seg eftir, at økið er lagt út til almenning, náttúrufriðingar- og mentanar endamál.
- at eigarafelagið í áravís hevur mótmælt, at ein av mest trafikeraðu vegum í landinum verður lagdur 2-3 metrar frá sethúsabyggingini á trøðni. At leggja ein somikið trafikeraðan veg á hetta D1 økið er so langt burtur frá hesum endamáli, sum til ber at hugsa sær, sí annars mótmælið.

Yvirskipaða ætlanin fyri økið undir Fjalli er samtykt, og verður mett, at staðsetingin til eitt nýtt røktarheim hóskar seg væl í hesum náttúruvakra økinum. Tá tosað verður um býarskipan, typologi og staðsetingar av hesum, verður í dag stórur dentur lagdur á at staðseta heim til eldri í einum nærumhvørvi við nógvum aktiviteti. Her verður serliga hugsað um dagstovnar, skúlar, handil við gerandisvørum eins og bústaðir. Ynski hevur verið frammi um at staðseta eitt røktarheim nærri sjónum, har dentur verður lagdur á eina hugsan um friðsælu. Í veruleikanum verður eitt heim nærri sjónum meiri avbyrgt, bæði í mun til ta fysisku planleggingina og nærveruna í sambandi við gerandislívið. Granskað hevur somuleiðis verið í einsemi hjá búfólki, og vísir granskingin, at nærveran við onnur menniskju hevur sera stóran týdning.

Talan er framvegis um eitt D1 øki, sum framhaldandi verður fríøki, fyri uttan tað økið, sum verður lagt av til sjálvt røktarheimið. Økið, har røktarheimið verður staðsett, verður í tilgongdini broytt til ásetingina D3, sum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er lagt av til miðstaendamál, umframt skúlar, almennar stovnar og íbúðir.

Arbeitt hevur verið við nýggju vegaføringini, sum er ein liður í eini størri ætlan fyri infrakervið kring Havnina. Leingi hevur ligið í kortunum og tað er somuleiðis av stórum týdningi og neyðugt, at eitt vegasamband millum komandi innkomuveg og Marknagil verður gjørt gjøgnum hetta grøna økið. Her er talan um ein kommunalan veg, og er ætlanin, at niðasti parturin av vegnum verður fyrsta stigið í ætlanini, sum somuleiðis verður atkomuvegur til nýggja røktarheimið. Vegurin verður í størst møguligan mun fluttur yvir ímóti grøna økinum fyri at skapa rúm ímillum veg og verandi bygging, og verða harumframt báðar áirnar varðveittar, sum tær eru í dag. Eftir ætlan leggur vegurin seg niður í lendið, og kemur hann soleiðis ikki at ávirka røktarheimið nakað serligt, umframt at tað verður møguligt at planta á økinum millum veg og útstykkingina, sum eigarafelagið umboðar.

Fyri røktarheims verkætlanina er tað av stórum týdningi, at staðsetingin fyri røktarheimið verður staðfest og samtykt, soleiðis at fyrireikingararbeiðið kann halda áfram. Somuleiðis skal kunnast um, at verður neyðugt at finna aðra staðseting og um hetta dregur út, so kemur hetta at ávirka upprunaligu tíðarætlanina fyri bygging av røktarheiminum. Mælt verður tískil til, at støða verður tikin til um ynski er at halda fast í staðsetingini úti í Marknagili ella um onnur staðseting skal finnast til røktarheimið.

**Skjøl:**
Eigarafelagið á Dánjalstrøð - mótmæli, journal nr. 17/03196-24.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á býarskipanardeildini mæla til, at nevndin tekur støðu til, um ynski er at halda fast í staðsetingini úti í Marknagili ella um onnur staðseting skal finnast til røktarheimið, og um verandi staðseting verður samtykt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2019:** Samtykt at halda fast við verandi staðseting og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, beinir málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina við atliti til at viðgera staðseting og vegatkomu.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt nýtt uppskot til staðseting av byggingini, soleiðis at byggingin verður flutt út í D3 øki, sum í mun til byggisamtyktina er lagt út til almennar stovnar.
Staðsetingin er tillagað vegaprosjekt, sum fyriliggja sum fyribils ætlanir. Tillagingar kunnu koma fyri, og má roknast við at tað verða tillagingar í mun til endaliga verkætlan.
Byggjast skulu uml. 6600 fermetrar, og er tørvur á einum byggiøki á 11000 fermetrar.
Íbindingarvegurin verður umskipaður, og vegaprosjekt skal gerast ísv. fyrireikingar av Røktarheiminum, soleiðis at linjuføringin er so skynsom sum til ber.

**Skjøl:**
17-031196-29 uppskot til staðseting januar 2020

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:
- at tikið verður undir við uppskotinum til staðseting í D3 økinum
- at skipanaruppskot verður gjørt fyri økið,við vegalinjum og byggiøkjum.
- at farið verður undir lýsa hvussu vit skulu byggja røktarheim í framtíðini.
- at ein byggiskrá til nýtt røktarheim við røktaríbúðum verður gjørd.
- at upp til kr. 700.000 verða játtaðar til omanfyri nevnda arbeiði.

Umframt at beina málið í eldranevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2020:** Tikið av skrá.

**Eldranevndin 06. februar 2020:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Hugt hevur verið eftir nýggjum staðsetingum til at byggja nýtt røktarheim og røktaríbúðir í Tórshavn, Hoyvík og Argjum. Tørvur er á einum øki á uml. 20.000 $m^2$ til at byggja nýtt røktarheim við røktaríbúðum. Harafturat skal øki leggjast av til møguliga víðkan/útbygging av røktarheiminum og møguliga fleiri røktaríbúðum. Enn er óvist hvussu stórur tørvurin er á til víðkan/útbygging, men skal hetta nágreinast nærri í tilgongdini.

Høvuðsstaðurin er vaksin nógv, og torført er at finna hóskandi stór økir til endamálið. Neyðugt er tí at hyggja eftir økjum í útjaðaranum á býnum, sum eru partur av býartættingini og býarvakstrarøkjum, umframt teimum møguleikum, sum liggja inni í býnum.

Økið við Stórutjørn er sambært Kommunuætlanini fyrsta býarvakstrarøki, sum skal skipast til ein nýggjan býling í Tórshavn. Hoyvíkin er vaksin nógv seinastu árini, og við mongu íbúgvunum hevði eisini verið hóskandi at bygt eitt nýtt røktarheim í Hoyvík, tí einki er í økinum í dag. Kirkjugarður er skipaður í økinum, og við teimum alsamt fleiri vaksandi hentleikunum, hevði eisini ligið væl fyri at skipað bústaðir til eldru borgararnar í økinum.

Arkitektakapping var í vár um skipan av Stórutjørn, og skal endaliga skipanin og projekteringin setast í verk so skjótt játtan er tøk til hetta. Tá arbeiðið verður raðfest, eigur eitt hóskandi øki at verða sett av til nýtt røktarheim við  røktaríbúðum.

Skjal nr. 17/03196-33 lýsir Stórutjørn og hvat krevst fyri at fara inn á økið við einum røktarheimi.

**Skjøl:**
Staðseting_Stóratjørn, journal nr. 17/03196-33

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, Heilsu- og umsorganarstjórin og býararkitekturin mæla til, at staðseta nýtt røktarheim við røktaríbúðum á økinum við Stórutjørn, at bygginevndin arbeiðir víðari við at nágreina tørvin á røktarheiminum og møguligum tilhoyrandi útbyggingum, og beina málið í býráðið umvegis eldranevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. september 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Bogi Andreasen og Helena Dam á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Eldranevndin 10. september 2020:** Útsett.

**Eldranevndin 15. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við Eldranevndini og meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, mælir til at finna aðra hóskandi staðseting nærri miðøkinum.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið vaðr einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Verkætlanin at skipa økið á Stórutjørn er farin av bakkastokki, men er talan um ein longri tíðarkarm, áðrenn nøkur ítøkilig ætlan kann skipast á økinum. Fyri at koma í gongd við verkætlanina at byggja nýtt røktarheim við røktaríbúðum er neyðugt at finna endaligu staðsetingina, og tí hevur verið hugt eftir møguligum øðrum staðsetingum til verkætlanina.

Økið eystan fyri Dalin Langa í Hoyvík varð í kommunuætlanini frá 2014 lagt út sum møguligt býarvakstrarøki í Hoyvík. Økið, sum verður nevnt Stórabrekka, liggur á eini høvd oman fyri vinnuøkið við Vegin Langa í 100 m hædd við stórslignum útsýni móti norðuri, eystri og suðri. Økið er óslætt heyggjalendi og liggur somuleiðis út til Dalin Langa, sum er eitt rekreativt øki við gongu/súkklubreyt og uppihaldsøki við Myllutjørn. Henda staðsetingin hevur áður verið nevnd í sambandi við at byggja nýtt røktarheim, men gjørdist hetta ikki aktuelt, tí ynski var at byggja bústaðir á Stórubrekku. Henda ætlanin er nú slept, og verður tí mælt til at staðseta nýtt røktarheim við røktaríbúðum á Stórubrekku.

Á Stórubrekku eru umleið 35.000 m$^2$ av lendi, sum byggjast kann á. Tørvur er á einum stórum øki til verkætlanina, umframt at øki skal leggjast av til møguliga víðkan. Stórabrekka liggur innan fyri Klingruna, og er tí longu ein partur av bygda økinum, mótsett Stórutjørn sum fer at liggja sum byggiøki í eitt tíðarskeið, meðan bygt verður. Økið er stórt, og eru góðir møguleikar at byggja lutvíst í einari hædd, sum ynski er um, og at víðka um byggingina seinni, um tørvur er á tí.

Økið liggur millum Dalin Langa og stóra vinnuøkið, sum hevur grivið seg inn undir landslagið. Hetta inntriv, sum er gjørt í lendið í vinnuøkinum, er sera ógvusligt og eirindaleyst sprongt burtur, fyri at fáa fleiri fermetrar til goymslur v.m. Ein trygdargeiri áljóðandi 30 metrar er lagdur parallelt við kantin, og kann ikki byggjast á hesum strekkinum, men kann hetta teljast við í byggistigið.

Vegasamband er frá Klingruni, og lætt er at skipa gøtur og fríøki í økinum, sum kunnu gerast partur av gøtukervinum til Dalin Langa og grøna nærumhvørvið. Góður sólargangur og gott útsýni er til allar síður frá Stórubrekku, tí økið liggur høgt og skránar til allar síður. Lívd er ikki nógv av í verandi støðu, men við

skilagóðari skipan av bygging, fríøki, vøkstri, parkering og atkomum við gøtusambondum, kann lívd fáast til uppihald og gróðursett øki.

Stórabrekka liggur sum framhald av rehabiliterings- og umlættingardeplinum URD, og kann eitt nýtt røktarheim samvirka við stovnin og uttanumøki, sum somuleiðis verður lýst í ritgerðini “Eitt evidensgrundað designuppskot fyri Dalin Langa, Hoyvík, við denti á endurvenjing og at skapa sálarliga heilsubót fyri brúkararnar á umlættingar- og rehabiliteringsdeplinum URD”. Í stuttum fevnir uppskotið um sambandi millum endurvenjing og ágóðan av at vera í náttúruni sæð út frá einum sjónarmiði at menniskju liva alsamt longri.

Økið, sum er ogn hjá Tórshavnar kommunu, er fevnt av umráðispartinum A3 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er lagt til blandaða bústaða- og miðstaðarbygging. Eitt nýtt røktarheim rúmast ikki innanfyri ásetingarnar, og er neyðugt at broyta almennu byggisamtyktina til umráðispart D3, sum verða kannaðir stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt. Útstykking innan fyri umráðispartarnar D2 og D3 verður einans loyvd eftir serstakari byggisamtykt, og skal nýggj serstøk byggisamtykt tí gerast sambært ásetingunum í almennu byggisamtyktini. Økið á Stórubrekku er partur av matr. nr. 138a, og skal eitt hóskandi øki tí sundurbýtast til endamálið.

Skjøl:
- Stórabrekka - Staðseting (kortskjal), journal nr. 17/03196-34.
- Eitt evidensgrundað designuppskot fyri Dalin Langa, Hoyvík, við denti á endurvenjing og at skapa sálarliga heilsubót fyri brúkararnar á umlættingar- og rehabiliteringsdeplinum URD, journal nr. 17/03196-33.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, heilsu- og umsorganarstjórin og býararkitekturin mæla til:
- at staðseta nýtt røktarheim við røktaríbúðum á økinum á Stórubrekku
- at broyta almennu byggisamtyktina og gera nýggja serstaka byggisamtykt
- at bygginevndin arbeiðir víðari við at nágreina tørvin á røktarheiminum
- og beina málið í býráðið umvegis heilsu- og eldranevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Kristianna Winther Poulsen og Ruth Vang, samtykti at taka undir við staðsetingini av røktarheiminum og røktaríbúðunum á Stórubrekku í Hoyvík og beina málið í býráðið umvegis heilsu- og eldranevndina og fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jákup Dam, atkvøður blankt.

**Ískoyti**:
Framtíðar røktarheimsbygging – námsferð.

Býráðið hevur samtykt at byggja nýtt røktarheim við 64 búplássum og 16 atknýttum røktaríbúðum.

Fyrireikandi arbeiðið er farið í gongd. Hetta er stór verkætlan, og sum støðan er við vaksandi tali av eldri borgarum og minkandi arbeiðsmegi, er neyðugt at hugsa nýtt, tá bygt verður. Neyðugt er at tryggja, at eitt nýtt røktarheim er soleiðis bygt og útgjørt at tað í størst møguligan mun tekur atlit til hesa avbjóðing. Í hesum sambandi er neyðugt at eisini vælferðartøknin er hugsað inn í loysnirnar á heiminum.

Ráðstevna um fremtidens boligbyggeri verður í Keypmannahavn 17.-18. november 2021.

[https://nohrcon.dk/produkt/temauge-om-byggeri-og-indretning-af-pleje-og-seniorboliger-2021/kobenhavn-2021-11-16/](https://nohrcon.dk/produkt/temauge-om-byggeri-og-indretning-af-pleje-og-seniorboliger-2021/kobenhavn-2021-11-16/)

Tað er Nohrcon www.nohrcon.dk  sum skipar fyri ráðstevnuni. Skráin fyri dagarnar er viðfest. Prísur og avsláttur framgongur av heimasíðuni.

Ætlanin er at bygginevndin og eldranevndin saman við viðkomandi fólki frá umsitingini fara til hesa ráðstevnu at kunna seg um og fáa inspiratión til bygging av nýggjum røktarheimi og røktaríbúðum.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og fulltrúi í heilsu- og umsorganarfyrisitingini mæla til at heilsu- og eldranevndin umframt Ruth Vang, limur í bygginevndini fara á ráðstevnu í Keypmannahavn um fremtidens plejehjemsbyggeri og leggja málið fyri fíggjarnevndina til samtyktar.

**Heilsu- og eldranevndin 14. september 2021:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Súna Mørk, Kári Johansen og Birgir Nielsen, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini um staðseting.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

Nevndin tekur eisini undir við tilmælinum um at heilsu- og eldranevndin umframt Ruth Vang, limur í bygginevndini fara á ráðstevnu í Keypmannahavn um fremtidens plejehjemsbyggeri og beinir málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og meirilutanum í Heilsu- og eldranevndini.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

# 226/21 Uppskot frá eigarafelagnum Hoyvíkshædd um skipan av fríøkinum eystanfyri Dýrindalsgøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2021 | 105/21 | 21/01660-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 214/21 | 21/01660-3 |
| 3 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 226/21 | 21/01660-3 |

**Upprunin til málið**
Skriv er komið frá eigarafelagnum á Hoyvíkshædd, um:

- At tey, ið búgva í økinum í longri tíð, hava tosað um møguleikarnar at gera økið eystan fyri Dýrindalsgøtu til eitt grønt frítíðar- og hugnaøki hjá hoyvíkingum og øðrum at brúka til hugna og gaman.

Fundur var millum Eigarafelagið á Hoyvíkshædd og umsitingina hjá Tórshavnar kommunu, har eigarafelagið vísir á tørvin á einum fríøki í økinum, og vísir á økið eystan fyri Dýrindalsgøtu til endamálið.

Eigarafelagið ynskir, at Tórshavnar kommuna skipar og planerar økið.

**Lýsing av málinum**
Á hvørjum ári, síðani fólk byrjaðu at búleikast á Hoyvíkshædd, hevur verið skipað fyri faklagongu og báli gamlaárskvøld.
Í mong ár vóru hesi bál á óbygdum grundstykkjum á Karlamagnusarbreyt.
Tey seinastu árini hevur ikki verið møguleiki at brenna bál á hesum økjum, tískil hava tey brent bál á fríøkinum eystan fyri Dýrindalsgøtu. Hetta økið vísir seg at vera serstakliga væl egnað til endamálið.
Økið verður frítt atkomuligt fyri allar borgarar í kommununi. Á økinum ynskja tey at fáa plantað, gjørt bálpláss og møguliga annað so sum spælipláss og at byggja eina smáttu, sum skjal *21/01660-1 Bálpláss,* og *21/01660-6 shelterbyg eystan fyri dýrindalsgøtu.pdf* vísa.

Tey hava gjørt skitsumynd av økinum, sum er ætlað til íblástur, hvussu tey hugsa, at økið kann skipast. Hetta er tó bara til íblástur, og verður ein tílík smátta aktuell, so stendur eigarafelagið sjálvt fyri at byggja hana.
Mettur kostnaður fyri tilfar til smátturna er 125-150.000 kr.

Eigarafelagið ynskir eisini, at lendisgøtan í økinum verður longd, soleiðis at samband er millum Hoyvíkshøllina og Hoyvíkshædd, og at hon verður breiðkað, soleiðis at líkbilurin kann koyra frá kirkju og samkomuhúsum og niðan í kirkjugarðin í Hoyvík.

Tá Umlættingar- og Rehabiliteringsdepilin URD varð bygdur, varð endurgjald veitt til eigarafelagið. Endurgjaldið skal býtast út á ymisku matriklarnar í økinum, og eigur Tórshavnar kommuna smb. upplýsingunum frá eigarafelagnum uml. 200.000 kr. av hesum endurgjaldinum.

1. Mest umráðandi er at fáa økið lagt av til fríøki, sum kann nýtast til bálpláss og hugna annars.
2. Eigarafelagið ynskir, at Tórshavnar kommuna stendur fyri at skipa økið, og at skipanin av økinum verður gjørd í samstarvi millum eigarafelagið og kommununa.
3. Eigarafelagið skjýtur upp, at endurgjaldið til Tórshavnar kommunu verður brúkt í fríøkinum til frama fyri borgararnar."

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur sum A3 øki til blandaða bústaðabygging smb. almennu byggisamtyktini.

**Upplýsingar frá umsitingini**

Ynski frá eigarafelagnum er í høvuðsheitum væl í trá við yvirskipaðu ætlanina, har grønir geirar tryggja samband millum ymisku býarpartarnar.
Grøn fríøki til borgarar í kommununi hóska væl uppat hesum grønu geirunum. Ítøkiligu loysnirnar mugu greinast nærri, so tær hóska til samlaðu bindingarnar og ætlanirnar í økinum.
Flestu fríøki í kommununi verða skipað, við at eigarafeløgini søkja um *játtan til fríðkan av býnum, grøn øki – spælipláss*.
Tórshavnar kommuna viðger umsóknir, og veitir játtan eftir umsókn, ið verða raðfestar á hvørjum ári.
Eigarafelagið á Hoyvíkshædd ynskir ikki hesa skipanina, men at Tórshavnar kommuna sjálv stendur fyri arbeiðinum at skipa økið.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:**
Samtykt á býráðsfundi 29. apríl 2021, at fara undir Kirkjugarðsleiðina frá kirkjutorginum til kirkjugarðin. 250.000,- kr. játtaðar til endamálið .

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið hevur ikki verið til viðmerkingar hjá øðrum deildum

**Skjøl**
J.nr. 21/01366-2 Kirkjugarðsleiðin_yvirlitstekning
J.nr. 21/01660-1 Bálpláss,
J.nr  21/01660-6 shelterbyg eystanfyri dýrindalsgøtu.pdf

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | x | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at økið vestan fyri Dýrindalsgøtu, sum eigarafelagið vísir á, verður lagt av til fríøki til borgarar í kommununi.
- at eigarafelagið stendur fyri at skipa og gera økið í samstarvi við Býarskipanardeildina.
- at eigarafelagið á Hoyvíkshædd sjálvt stendur fyri at gjalda ynsktu átøkini á fríøkinum eystan fyri Dýrindalsgøtu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt kort, ið vísir økið, ið eigarafelagið ynskir at skipa felagsøkið á. Støddin er uml 3750 m$^2$.

***Sí skjal 21/01660-10 Uppskot frá eigarafelagnum um skipan av økinum 3750 m$^2$.***

Ætlanin er, at felagsøkið verður eystanfyri Kirkjugarðsleiðina, og verður skipað í samstarvi við Býarskipanardeildina, soleiðis at trivnaðarøkið hóskar til og ikki órógvar Kirkjugarðsleiðina í Hoyvík

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at økið vestan fyri Dýrindalsgøtu, sum eigarafelagið vísir á, verður lagt av til fríøki til borgarar í kommununi.
- at eigarafelagið stendur fyri at skipa og gera økið í samstarvi við Býarskipanardeildina.
- at eigarafelagið á Hoyvíkshædd sjálvt stendur fyri at gjalda ynsktu átøkini á fríøkinum eystan fyri Dýrindalsgøtu.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

# 227/21 Nýtt tyrvingarpláss : Samstarv við IRF

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2017 | 48/17 | 17/03122-25 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 30.11.2017 | 65/17 | 17/03122-25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.12.2017 | 329/17 | 17/03122-25 |
| 4 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 318/17 | 17/03122-25 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 08.02.2018 | 6/18 | 17/03122-25 |
| 6 Fíggjarnevndin | 21.02.2018 | 40/18 | 17/03122-25 |
| 7 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 40/18 | 17/03122-25 |
| 8 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.11.2019 | 46/19 | 17/03122-25 |
| 9 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 316/19 | 17/03122-25 |
| 10 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 273/19 | 17/03122-25 |
| 11 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 14.09.2021 | 34/21 | 17/03122-25 |
| 12 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 218/21 | 17/03122-25 |
| 13 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 227/21 | 17/03122-25 |

**Málslýsing:**
Umsitingarnar hjá IRF og Tórshavnar kommunu hava síðani tíðlíga í summar arbeitt við at kanna møguleikan fyri at samstarva um tyrvingarpláss. IRF hevur fyri stuttari tíð síðani tikið í nýtslu eitt nýtt tyrvingarpláss í Trøllavík í Suðuroy, sum IRF ætlaði at nýta til at tyrva óbrennbært burturkast, undantikið øsku, á frá øllum IRF økinum. Í fyrstu atløgu var talan um at at nýta hetta plássið til tyrviburturkast úr Tórshavn eisini, men tað varð skjótt greitt, at samlaðu nøgdirnar vórðu ov stórar til at tað loysti seg at flyta tær suður um fjørð.

IRF fór tí at kanna møguleikan fyri at leggja tyrvingarpláss norðanfjørðs. Eitt uppskot er Junkarahagan í Kvívik, har tyrvingarpláss hevur verið í mong ár, men sum er um at verða avriggað. Kommunala Brennistøðin hevur síðani verið við í tilgongdini í at kanna/fyrireika tyrvingarpláss í Kvívík. Nevnast skal, at formlig loyvi frá eigarum, kommunu og myndugleikum er ikki útvegað enn, men mett verður, at av tí at har hevur ligið eitt tyrvingarpláss í mong ár, verður lutfalsliga einfalt at fáa neyðugt loyvir á hesum stað.

Plássið skal eftir ætlan ikki nýtast til mold og annan reinan avgrevstur, tí tílíkt virksemi liggur hjá hvørjari einstakari kommunu og ikki hjá IRF. Sostatt verður framhaldandi neyðugt hjá Tórshavnar kommunu at hava pláss til mold og avgrevstur, tí hetta er krav sambært lóg.

IRF hevur heitt á PB Consult um at gera tekniskar fyrireikingar, t.e. byggiprogramm, projektuppskot og kostnaðarmeting.

Seinasta kostnaðarmetingin dagfest 18/8-17 er áljóðandi 46,2 mió. Men síðani eru ymsar tillagingar gjørdar í innrættingini, sum væntandi viðføra ein minni kostnað.

Tosað hevur verið um eitt samstarvsmodell, har IRF stendur fyri at byggja og reka tyrvingarplássið, og at Tórshavnar kommuna ger nýtslu av plássinum til alt sítt tyrviburturkast, og eisini ávísir hetta tyrvingarplássið til tað vinnuliga tyrviburturkastið. Alt tyrviburturkast, sum kemur til tyrvingarplássið, verður gjaldsskyldugt, og rindað verður ein ávísur kostnaður pr. rúmmetur, soleiðis at allur íløgu- og rakstrarkostnaður verður goldin við gjøldum fyri burturkast, sum kemur til plássið. Tó verður helst eisini neyðugt, at báðir partar, t.e. IRF og Tórshavnar kommuna, veðhalda fyri hvør sínum parti av lántøkuni og rakstrinum, um tað skuldi hent, at inntøkurnar svíkja t.d. vegna fallandi nøgdir.

Sambært leysligum útrokningum kann móttøkugjaldið verða umleið 350-400 $kr/m^3$ fyri at raksturin kann javnviga. Gjaldið fyri vanligt tyrvingarburturkast er í dag 240 $kr/m^3$ í Tórshavnar kommunu.

Fyri Tórshavnar kommunu fer tað sambært leysligum útrokningum at merkja ein meirkostnað á umleið 3 mió. kr. um árið til gjøld og flutning at nýta hesa skipan við felags tyrvingarplássi saman við IRF í Kvívík, í mun til kostnaðin av verandi skipan í dag við tyrvingarplássi í Húsahaganum. Tá eru møguligar sparingar av minni virksemi í Húsahaganum innroknaðar. Fyri vinnuna verður meirkostnaðurin til gjøld og flutning samsvarandi mettur til 1 mió. kr. um árið í mun til verandi skipan í dag. Nevnast skal, at um Tórshavnar kommuna hevði valt at bygt eitt nýtt tyrvingarpláss í Tórshavnar kommunu, hevði tað eisini viðført øktar kostnaðir og gjøld, um íløgan skuldi verið afturgoldin við gjøldum fyri burturkast.

Í sambandi við samstarvið um felags tyrvingarpláss, hevur IRF spurt Kommunalu Brennistøðina, um møguleikan fyri at IRF tyrvir ilsku á tyrvingarplássinum hjá Tórshavnar kommunu í Húsahaganum frá umleið 1. oktober 2017 og fram til eitt nýtt tyrvingarpláss er klárt. IRF skal hava avriggað sítt verandi tyrvingarpláss í Oyndarfirði á heysti 2017. Tyrvingarplássið í Húsahaganum er sum kunnugt um at verða fult, men nakað av plássi er eftir til ilsku. Eisini er gjørd eitt skipanaruppskot/neyðplan (mál nr. 16/02610) fyri hvussu tyrvingin kann umskipast, um/tá verandi pláss verður fult, og er hendan ætlan góðkend av Umhvørvistovuni. Umskipanin er mett at kosta umleið 1 mió. kr. Alternativt ber til at leggja ilskuna í eina rúgvu við økið innanfyri rulluportrið, har rúgvan við reinari sølumold liggur, og síðani koyra ilskuna norð á eitt nýtt tyrvingarpláss t.d. í Kvívík, tá ið tað økið er klárt at nýta.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til, at

1. Tórshavnar kommuna fer í samstarv við IRF um felags tyrvingarpláss t.d. í Kvívík og at umsitingin/Kommunala Brennistøðin arbeiðir víðari við fyrireikingunum saman við IRF.
2. Tórshavnar kommuna útvegar og avsetur nýtt øki til mold og avgrevstur vestanfyri/sunnanfyri Oyggjarvegin við Kleynisvarða
3. Tórshavnar kommuna tekur ímóti ilsku frá IRF á tyrvingarplássinum í Húsahaganum sambært nærri avtalu við IRF.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. oktober 2017:** Málið umrøtt og verður tikið uppaftur á næsta fundi við atliti til at fáa málið betri lýst.

**Ískoyti:**
Umsitingin arbeiðir við at fáa málið betri lýst, og verður hetta lagt fram á fundinum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 30. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Halla Samuelsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 14. desember 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, taka ikki støðu til málið á fyriliggjandi grundarlag, tí málið er ikki nóg væl lýst.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Verandi tyrvingarpláss hjá Tórshavnar kommunu er fult og tí má ein loysn finnast nú.

Játtaðar eru uml. 800.000 til at gera nakrar tillagingar á staðnum, soleiðis at tað ber til at halda fram árið út, ella eitt sindur longri. Eftir hetta skal ikki roknast við at Tórshavnar kommuna kann taka ímóti burturkasti at tyrva.

Tórshavnar kommuna og IRF arbeiða við eini ætlan um at gera eitt felags tyrvingarpláss. Eftir ætlan skal IRF byggja og reka nýggja tyrvingarplássið sum verður staðsett í Kvívík. Allar útreiðslur í sambandi við íløgur og rakstur verður goldin við móttøkugjaldi.

Móttøkugjaldið, sum verður ásett av IRF, verður væntandi 350-400 kr./m$^3$, gjaldið í Tórshavnar kommunu er í dag 240 kr./m$^{3.}$

Skal Tórshavnar kommunu sjálv byggja og reka eitt nýtt tyrvingarpláss, har íløgu- og rakstrarkostnaðurin skulu fíggjast við móttøkugjøldum, so skal roknast við, at móttøkugjaldið verður væl hægri enn tað er í dag.

Koyring av ruski er ikki partur av hesi avtalu. Tann sum kemur við ruskinum skal sjálvur gjalda fyri koyringina.

Móttøka av mold er ikki partur av hesi avtalu og tí skal Tórshavnar kommuna framhaldandi taka ímóti mold.

<u>Fíggjarligar avleiðingar fyri Tórshavnar kommunu:</u>
Meirkostnaðurin fyri rakstur, gjøld og flutning er mettur til umleið kr. 3,0 mió./ár fyri Tórshavnar kommunu.

IRF og Tórshavnar kommuna skulu veðhalda fyri hvør sínum parti av lántøkuni (íløgan mett til kr. 46,2 mió.) og av rakstrinum, um tað skuldi hent, at inntøkurnar svíkja t.d. vegna fallandi rusknøgdir.

Um so er at t.d. rusknøgdirnar verða minni enn væntað, soleiðis at útreiðslurnar verða størri enn inntøkurnar, so skulu IRF og Tórshavnar kommuna gjalda hvør sín part av árliga muninum av inntøkum og útreiðslunum.

Um

<u>Fíggjarligu avleiðingar fyri vinnuna og onnur:</u>
Í 2016 komu inn 3572 m$^3$ av vinnuburturkast til tyrvingar frá vinnuni og fyri árini 2012-2016 er talið í miðal 2468 m$^3$.

Fyri vinnuna verður meirkostnaðurin til gjøld og flutning mettur til umleið 1 mió. kr./ár, í mun til verandi skipan í dag.

Tað verður nakað meira av koyring, t.d. er úr Hoyvík 8-9 km. til verandi tyrvingarpláss í Húsahaga meðan tað er uml. 24-25 km til Kvívíkar.

Vinnan kemur framhaldandi at sleppa av við smáar nøgdir á Hjalla. Tað eru bert kundar, ið hava heilar bingjur við tyrvingartilfari, sum mugu koyra beinleiðis til tyrvingarplássið í Kvívík við bingjunum (hjáfesta excel-ark vísir útrokningar grundarlagið).

<u>Móttøka av mold og avgrevstri:</u>
Tórshavnar kommuna skal framhaldandi taka ímóti mold og avgrevstri (reint tilfar). Til hetta er ætlanin at nýta verandi maskinur og starvsfólk, soleiðis at raksturin verður nakað tann sami sum nú.

Verandi moldmóttøkupláss er um at verða fult og tí verður arbeitt við at finna eina nýggja staðseting til hetta. Í hesum sambandi skal roknast við at íløgur skulu gerast til nýggja plássið til m.a. vegir, hegn/portur, maskinhøll, starvsfólkarúm, innlegging av vatni, el, kloakk og líknandi.

<u>Rottangatøming:</u>
Sum er verður rottangaevja koyrd niðan á evjuplássið í Húsahaga, men plássið er ótíðarhóskandi og tí er neyðugt at finna eina aðra loysn.

Kommunan hevur samtykt at samstarva við IRF um viðgerð av rottangaevju í Leirvík. Nú er so ætlanin at flyta hetta til Kvívíkar, soleiðis at tað kemur at liggja saman við nýggja tyrvingarplássinum og verður tað ein stórur fyrimunur fyri Tórshavnar kommunu, tí hetta kemur at liggja nærri Havnini.

<u>Tíðarætlan:</u>
IRF hava upplýst, at teir meta, at nýggja tyrvingarplássið kann standa klárt til at taka ímóti ruski í apríl/mai 2019. Hetta er treytað av, at ein avgerð beinanvegin verður tikin um at Tórshavnar kommuna ferð í samstarv við IRF um nýggja tyrvingarplássið í Kvívík.

<u>Ætlanaravtala:</u>
Ætlanin er at IRF og Tórshavnar kommuna skriva undir eina ætlanaravtalu, fyri at kanna møguleikarnar til at gera og reka eitt felags tyrvingarpláss.
Tá so verkætlanin verður góðkend av báðum pørtum, verður formligur samstarvssáttmáli gjørdur.

**Tilfar til fundin:**
J.nr. 17/03122-31 Uppskot til ætlanaravtalu millum IRF og Tórshavnar,
J.nr. 17/03122-34 Leigusáttmálar millum IRF og hagapartin Norðuri í Haga
J.nr. 17/03122-35 Hagtøl fyri rusk at tyrva

**Tilmæli:**
Leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini og virkandi leiðari á Kommunalu Brennistøðini mæla til:
1. at Tórshavnar kommuna fer í samstarv við IRF um felags tyrvingarpláss t.d. í Kvívík og at kommunan arbeiðir víðari við fyrireikingunum saman við IRF.
2. at Tórshavnar kommuna skrivar undir ætlanaravtalu millum IRF og Tórshavnar kommunu, j.nr. 17/03122-31.

at Tórshavnar kommuna útvegar og avsetur nýtt øki til mold og avgrevstur vestanfyri/sunnanfyri Oyggjarvegin við Kleynisvarða.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 08. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle, Bergun Kass og Heðin Mortensen, tekur undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

Ískoyti:
Uppskot til avtalu um

Býráðsfundur 01. mars 2018: Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 0 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus, Heðin Mortensen, Gunvør Balle

Atkvøddi blankt: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Kommunan hevur móttikið uppskot til avtalu millum IRF og TK, um at reka eitt felags tyrvingarpláss fyri burturkast, sum skal tyrvast, umframt slaggu (øsku), harundir eisini samstarv um eina nýggja nýmótans móttøku til viðgerð av rottangaevju o.l.

Somuleiðis hevur kommunan móttikið eina kostnaðarmeting, dagfest 31.10.2019, sum ásetur lyklatøl, gjald fyri móttøku av tilfari, fíggjarætlan (budget) og útreiðslur.
Roknað verður við einum halli 2 tey fyrstu árini, sum skal deilast millum IRF og KB eftir fólkatalinum og hareftir verður mett, at skipanin hvílur í sær sjálvum.

Skjøl: j.nr. 17/03122-39 Uppskot til avtalu millum IRF og KB og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á brennistøðini mæla til, at tikið verður undir við fyriliggjandi avtalu, j.nr. 17/03122-39.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 04. november 2019:** Ein meiriuti, Turið Horn, Bergun Kass og Bjørghild Djurhuus, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, atkvøður blankt.

Gunvør Balle luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle, Bergun Kass og Heðin Mortensen tekur undir við Náttúru- og umhvørvisnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við Náttúru- og Umhvørvisnevndini.

Býráðsfundur 28. november 2019: Atkvøtt varð um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 4 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen og Bjørghild Djurhuus.

Blankt atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson.

**Ískoyti:**
Sambært avtaluna millum IRF og TK, dagfest 05.12.2019, um at reka eitt felags tyrvingarpláss fyri burturkast, sum skal tyrvast, umframt móttøku til viðgerð av rottangaevju o.l., skal kommunan taka støðu til fylgjandi viðurskifti:

1. Sambært §1 TK skal góðkenna endaliga projektið

2. Sambært §2 Partarnir skulu í felag áseta gjøld í sambandi við raksturin

3. Sambært §3 Ein felagsnevnd skal setast, við umboðum fyri IRF og TK at ráðgeva leiðslunum hjá IRF og TK, um hvussu farast skal fram í øllum rakstrarviðurskiftum.

4. Sambært §4 Fíggjar- og rakstraræltan skal leggjast fyri IRF og TK til góðkenningar.

Viðvíkjandi pkt. 1) §1, endaligt projekt
IFR hevur sent kommununi endaliga projektið í sambandi við bygging av nýggjum tyrvingarplássi í Nýggjheiðum, okkara j.nr. 17/03122-45, harundir:

1. Mynd
2. Kostnaðarmeting fyri samlaðu verkætlanina
3-4 Sáttmáli við J&K
5.-14. Yvirlit, byggiskrá, tekningar og myndir

Í sambandi við byggingina er avtalað, at TK fær allar fundarfrásagnir frá byggifundum og at umboð fyri TK kann luttaka á fundunum.

Viðvíkjandi pkt. 4) §4, fíggjar- og rakstraræltan
IFR hava sent kommununi uppskot til fígging av verkætlanini og hevur nevndin hjá IRF góðkent eitt tilboð frá BankNordik, sí j.nr. 17/03122-44

Fíggjardeildin hevur hesar viðmerkingar:
Sambært avtaluni skulu Tórshavnar kommuna og IRF gjalda rakstrarkostnaðin, íroknað kapitalútreiðslur, av tyrvingarplássinum í mun til íbúgvaratalið hvønn 31. desember í Tórshavnar kommunu og í kommununum í IRF-økinum. Verkætlanin er fíggja við 120 mió. kr. í lántøku, IRF stendur fyri láninum. Í uppruna kostnaðarmetingini stendur lánið til at vera 110 mió. kr.

Vit taka undir við umleggingini frá variablari rentu til fasta rentu. Hettar viðførir tó eina broyting í kapitalútreiðslunum í mun til upprunaætlanin, munurin er góðar 300 t.kr. Tað er trupult at siga um hettar dýrkar um verkætlanina í longdini, tað avhongur av rentugongdini.  Sambært nýggju kostnaðarmetingini er árligi kostnaðurin hækkaður við 420 t.kr.

Hjálagt:
j.nr. 17/03122-44 Umlegging av láni 120 mió. kr. - felags verkætlan um tyrvingarpláss úti í Nýggjheiðum
j.nr. 17/03122-45 Relevant tilfar - verkætlan Nýggjheiðar

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á brennistøðini mæla til, at nevndin góðkennir projektið, sum IRF hevur sent kommununi, sambært j.nr. 17/03122-45, at nevndin góðkennir framsendu fíggjarætlan og tilboð um lántøku, sambært j.nr. 17/03122-44 og beinir málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

Umboð fyri IRF vóru á fundinum og greiddu frá

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 14. september 2021:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Annika Olsen, tekur undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri, trimum blonkum og ongari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Kristianna Winther Poulsen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jón Kragesteen, Gunvør Balle, Annika Olsen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Ruth Vang.

## 228/21 Dagføring av vegnum Argjavegur/Argjaboðagøta

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 26.11.2019 | 83/19 | 19/04645-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 04.02.2020 | 7/20 | 19/04645-1 |
| 3 Ferðslunevndin | 20.02.2020 | 7/20 | 19/04645-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 10.03.2020 | 16/20 | 19/04645-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 08.09.2020 | 36/20 | 19/04645-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 229/20 | 19/04645-1 |
| 7 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 201/20 | 19/04645-1 |
| 8 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 231/20 | 19/04645-1 |
| 9 Tekniska nevnd | 13.09.2021 | 54/21 | 19/04645-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 223/21 | 19/04645-1 |
| 11 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 228/21 | 19/04645-1 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn er komin um at byggja íbúðarhús við 27 íbúðum umframt felagshús á matr. nr. 43g, á Argjaboða (j.nr. 18/03069).

Býráðið hevur samtykt at gera eina serstaka byggisamtykt fyri økið, og í tí sambandi eru fleiri kærur komnar inn frá íbúgvum á Argjaboða, sum klaga um at vegurin er ov vánaligur til meira ferðslu, í støðum bert 1 spor og eingin gongubreyt.

Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti 11. September 2019, at góðkenna uppskotið um nýggja serstaka byggisamtykt og at kommunan fær vegin út á Argjaboða dagførdan.

Fíggjarnevndin samtykti 13. november 2019 at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið viðvíkjandi byggisamtyktini í býráðið og at beina málið um dagføringina av vegnum út á Argjaboða í teknisku nevnd og stovna nýtt mál hesum viðvíkjandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Sunnari partur av Argjavegnum út ímóti Argjaboðagøtu, íalt 160 m, er einans uml. 4 m breiður. Vegirnir báðumegin eru góðar 9 m í breidd.

Skal vegurin breiðkast, so er neyðugt hjá kommununi fyrst at ogna sær lendið og møguliga bygningar. Á niðaru síðu eru 13 privatir eigarar og fleiri neyst og á ovaru síðu eru 9 privatir eigarar og 2 sethús.

Um tann parturin av vegnum, sum bert er 4 m breiður, skal breiðkast, so hann er eins breiður sum restin, verður arbeiðið mett at kosta áleið (20.000 x 160) kr. 3,2 mió., tá er ognartøka, keyp av húsum/neystum o.a. ikki við.

Ein fyribils loysn kundi verið, at sett upp ferðsluljós við radara, fyri at stýra ferðsluni, soleiðis at bilar ikki møtast á tí smala partinum. Kostnaðurin av hesum verður mettur til uml. 300.000,- kr.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Umsókn at byggja á matr. nr. 43g, á Argjaboða, j.nr. 18/03069.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

Tað eru ongin frávik, men málið skal viðgerast av ferðslunevndini, áðrenn nakað kann gerast.

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at arbeitt verður víðari við eini loysn, har tað verða sett upp ferðsluljós við radara, fyri at stýra ferðsluni og at leggja málið fyri nevndina aftur, tá eitt liðugt uppskot fyriliggur.

**Tekniska nevnd 26. november 2019:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður ímóti og mælir til, at vegurin verður dagførdur.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt eitt meira ítøkiligt uppskot til eina loysn, har ferðslan verður stýrd við ferðsluljósum, og eitt gonguøki á 1 m verður strikað upp á ovara borð. Uppskotið hevur verið til ummælis hjá ferðslugrannskoðara, har hann gevur sítt viðmæli til uppskotið við smærri viðmerkingum so sum uppstriking v.m. Hetta kemur við í endaligu projekteringini av ferðsluloysnini.

Eisini er ein støðulýsing gjørd av vegastrekkinum, sum m.a. sigur at vegastrekkið er í góðum standi, tá hugsað verður um stabilitet av vegnum.

Eisini er umbiðin ein ferðslugrannskoðan av økinum í verandi líki. Hon er ikki tøk enn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at arbeiða víðari við uppskotinum j.nr. 19/04645-5 støðumynd – ferðsluljós, at strika 1 m gongubreyt á ovara borð og beina málið í ferðslunevndina umframt at hava ein ástaðarfund.

**Tekniska nevnd 04. februar 2020:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Tilmæli:**
Ferðslubólkurin mælir til at taka undir við ætlanini.

**Ferðslunevndin 20. februar 2020:**
Uppskot um ferðsluljós er ein brúkbar loysn. Ferðslunevndin mælir tó til at bíða verður fyribils við at gera broytingar á nevnda vegastrekki, vísandi til at ferðslan er sera lítil. Higartil eru ikki skrásett ferðsluóhapp ella líknandi á staðnum.

**Ískoyti:**
Møguleiki er at breiðka vegin í støðum, har økið fram við vegnum er kommunal ogn. Hetta kann gerast beinanvegin. Eisini eigur man at kanna møguleikan um keyp/gerðabýti við ánarar, har hetta kann lata seg gera. Umsitingin hevur gjørt tekning, ið vísir á hesar møguleikar, sí "*Kort – víðkanar økir*" . Kostnaðarmetingin av hesum er mett til 3,65 mill. sí kostnaðarmeting .
Fyrst eigur projekt og nágreinilig kostnaðarmeting av verkætlanini at verða gjørd. Hetta arbeiðið er mett til 200.000 kr. Hetta kann fíggjast av rakstrarkonto fyri vegir 8110.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við at projekt og nágreinilig kostnaðarmeting verður gjørd, og at málið kemur aftur í nevnd, tá hetta er gjørt.

**Tekniska nevnd 10. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur samráðst við Tummas Rubeksen, ánara av matr. 214 og 39a, Argir, um at kommunan keypir ognir hansara, og at hann fær eitt hóskandi grundstykki hinumegin vegin av matrikul nummar 122k.

Semja varð um at fáa tvær óheftar metingar av ognunum og hesar eru:

Protek sp/f: virðið av húsi kr. 1.800.000 kr.
Skyn: virðið av húsi kr. 2.550.000 kr.

Grundstykkið er mett til 750.000 kr.

Húsini hjá Tummas eru øll umvæld og eru í sera góðum standi, og hann hevur ætlanir um at byggja út í nærmastu framtíð og ynskir tí eina skjóta avgerð í hesum máli. Hann upplýsir, at ognin er skuldarfrí, og um hann skal góðtaka eina semju, so skal hann somuleiðis vera skuldarfríur í nýggju húsunum.

Hann sigur seg hava kannað kostnaðin fyri at byggja nýggj hús, t.v.s. útgrevstur og bygging, og at hetta kemur at kosta honum áleið 3,6 mió. kr. T.v.s. at hann, umframt grundstykkið frá kommununi, skal hava 3.600.000 kr. fyri ognir sínar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At kommunan letur honum hóskandi grundøki av matrikul 122k
- At kommunan keypir ognina frá Tummas Rubeksen fyri kr. 3.600.000
- At keypið av ognini verður flutt á konto 6175, L61020, Keyp av jørð, og verður fíggjað soleiðis:
    - Kr. 350.000 av konto 6875, L68035, Kloakk Tróndargøta
    - Kr. 500.000 av konto 6875, L68027, Kloakk Signabø
    - Kr. 389.000 av konto 6875, L00002, framfluttur karmur
    - Kr. 611.000 av konto 6875, L00001, karmur fyri árið
    - Kr. 1.050.000 av konto 6810, kloakkir o.a.
    - Kr. 700.000 av konto 6811, áir, yvirflatuvatn og veitir

At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 08. september 2020:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum treytað av góðkenning frá kommununala eftirlitinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Bjørghild Djurhuus, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til at ein heildarloysn verður funnin fyri allar eigararnar á vegastrekkinum og at peningurin heldur verður játtaður av keyp og sølu.

**Ískoyti:**
Í tilmælinum viðvíkjandi mál 19/04645 skal tað ikki standa 389.000 kr. av 6875, L00002, men L00001.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At kommunan letur honum hóskandi grundøki av matrikul 122k
- At kommunan keypir ognina frá Tummas Rubeksen fyri kr. 3.600.000
- At keypið av ognini verður flutt á konto 6175, L61020, Keyp av jørð, og verður fíggjað soleiðis:
  - Kr. 350.000 av konto 6875, L68035, Kloakk Tróndargøta
  - Kr. 500.000 av konto 6875, L68027, Kloakk Signabø
  - Kr. 389.000 av konto 6875, L00001, framfluttur karmur
  - Kr. 611.000 av konto 6875, L00001, karmur fyri árið
  - Kr. 1.050.000 av konto 6810, kloakkir o.a.
  - Kr. 700.000 av konto 6811, áir, yvirflatuvatn og veitir

  At málið verður beint í býráðið sum eykajáttan til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Ein meiriluti**,** Annika OLsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til at ein heildarloysn verður funnin fyri allar eigararnar á vegastrekkinum og at peningurin heldur verður játtaður av keyp og sølu.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, 1 atkvøðu ímóti og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Karina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Vísandi til upprunan í málinum og lýsingina frá umsitingini til fund í teknisku nevnd tann 26. november 2019 er nú gjørd ein meting av, hvussu ein varandi loysn kann gerast fyri strekkið millum Traðagøtu og Argjaboðagøtu. Í samband við ætlandi økt byggivirksemi á Argjaboða, hevur verið víst á avbjóðingar at skipa ferðsluna í hesum strekkinum.

Økið er merkt av tveimum ymiskum viðurskiftum:

1. Strekkið fram við Støðni er smalt og í støðum er ivamál um, hvørt verandi vegur kann halda til økta ferðslu. Her skal vegurin breiðkast og leggjast soleiðis, at til ber at føra ferðsluna trygt millum Argjaboðagøtu og Argjaveg. Serliga á einum strekki er standurin á verandi vegi og vegskráa oman á Støðna ivasamur í mun til møguliga breiðking.

2. Strekkið frá omankoyringini til brimgarðin og víðari út á Argjaboða er ikki endaliga skipað við tryggari gongubreyt og vendimøguleikum. Hetta kann gerast í somu tilgongd, meðan vegurin annars verður dagførdur.

Viðfestar eru tekningar (Argjavegur-Argjaboði tekningar) sum vísa uppskot til vegaføringina við viðmerkingum til tær avbjóðingar, sum er knýttar at hesum uppskoti.
Mett verður, at fyri at tryggja at dagførdi vegurin klárar at halda komandi ferðsluna, eigur arbeiðið, at projektera og gera útboðstilfar, at verða veitt út til ráðgeva.

Ein fyribils kostnaðarmeting av hesi verkætlan er á uml. kr. 4,5 – 5 mió. Tá er íroknað arbeiðið at gera gongubreytir út á Argjaboða.

Møguligt keyp av lendi/makaskifti er ikki íroknað kostnaðarmetingina.

Av hesum er mett, at projektering og útboð kann røkkast innan ein karm á kr. 400.000,-

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at heimilað verður umsitingini, at veita út arbeiðið at projektera og bjóða út arbeiðið at dagføra vegastrekkið frá Traðagøtu til endan á Argjaboðagøtu og í hesum sambandi játta kr. 400.000 av konto 8175, LK81043 Parkeringstunnil til nýggja verkætlan Dagføring Argjavegur-Argjaboðagøta.

**Tekniska nevnd 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men at peningurin verður tikin av LK 81042.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>30. september 2021 | Blað nr.: 903<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 229/21 Ferðslutrygd við Eysturskúlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.05.2021 | 28/21 | 20/04029-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 13.09.2021 | 51/21 | 20/04029-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 222/21 | 20/04029-1 |
| 4 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 229/21 | 20/04029-1 |

**Upprunin til málið**
Foreldur at næmingum á Eysturskúlanum eru ótrygg við ferðslutrygdina á staðnum.

**Lýsing av málinum**
Foreldur og foreldraráð á Eysturskúlanum hava heitt á kommununa um at finna eina haldgóða loysn, so ferðslutrygdin kann verða so góð sum til ber.

Umsitingin hevur gjørt eitt ávegis uppskot, 20/04029-2, til hvussu ferðsluviðurskiftini kunnu gerast betri.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | x | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at heimila umsitingini at arbeiða víðari við uppskotinum 20/04029-2.

**Tekniska nevnd 10. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyt:**

Umsitingin hevur gjørt eitt endaligt uppskot, 20/04029-4, og gjørt eina kostnaðarmeting av at ferðslutryggja vegirnar við Eysturskúlan.
Uppskotið fevnir eisini um at fáa til vegar 29 p-pláss til Eysturvøll. Hetta tí íbúgvarar í grannalagnum kæra sína neyð um parkerings óskil við vøllin.

T.v.s. at arbeiðið er klárt at bjóða út sum undirhondsboð til tveir arbeiðstakarar.

Fíggjartørvurin er mettir til 1,8 mill. kr. og kann fíggjast av íløgukonto 8175.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at:

- Tikið verður undir við, at nevnda verkætlan kann byrja.
- At flyta kr. 1.800.000 kr. av konto 8175, LK81043 (Parkeringstunnil), á nýggja verkætlan «Ferðslutrygd við Eysturskúlan» undir konto 8175
  Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Tó skal vegateinurin fram við eysturvølli og parkeringsøkið vestan fyri eysturvøll ikki gerast og um peningur er eftir, skal restin brúkast til skúlagarðin við Eysturskúlan.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. september 2021 | Blað nr.: 905<br><br>Formansins merki: |

# 230/21 Umsókn at yvirtaka vegastrekki Ryskigøta, matr. nr. 1347q, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.09.2021 | 49/21 | 20/03873-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 221/21 | 20/03873-3 |
| 3 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 230/21 | 20/03873-3 |

**Upprunin til málið**
Sp/f 10.09.2018 eigari av Ryskigøtu/matr. nr. 1345ae, 1347u, 1347q, Tórshavn, ynskir, at kommunan yvirtekur hesar matriklar.

**Lýsing av málinum**
Matriklarnir eru partur av privatu útstykkingini, sum er gjørd á Ryskigøtu, Tórshavn. Matr. nr. 1347ae, stødd 1489 $m^2$, 1347u, stødd 633 $m^2$ og 1347q, stødd 3375 $m^2$ skulu leggjast saman við Villingadalsvegnum, litra dy, Tórshavn.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Fólk frá umsitingini hava verið á staðnum og hugt at vegnum. Niðurstøðan er, at vegurin er í góðkendum standi.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Kort – Ryskigøta j.nr. 20/03873-4

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒
Eigarin av matriklinum ber útreiðslurnar í sambandi við marknaumskipan av matriklunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at kommunan yvirtekur vegin og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

# 231/21 Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Dalavegin (Lagatrøð)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.05.2021 | 95/21 | 21/01433-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.05.2021 | 147/21 | 21/01433-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 154/21 | 21/01433-1 |
| 4 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 231/21 | 21/01433-1 |

**Upprunin til málið**
Eftir at serstaka byggisamtyktin fyri Dalavegin (Lagatrøð) er vorðin góðkend, er ein feilur funnin í henni, ið kann geva umsitingarligar avbjóðingar.

**Lýsing av málinum**
Serstaka byggisamtyktin fyri Dalavegin varð góðkend í 2019 og skipar eina sethúsaútstykking við grundstykkjum í støddunum 400-700. Orsøkin til, at ein serstøk byggisamtykt varð gjørd fyri útstykkingina var, at talan var um grundstykki, ið vóru minni enn 500 $m^2$, og er hetta einans møguligt, um serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið.

Talan er um eina trøð, á uml. 7000 $m^2$, ið liggur millum eldri grannaløg, og tí varð, í tilgongdini at skipa økið, dentur lagdur á, at byggingin í økinum ikki skuldi ávirka grannarnar óneyðuga nógv, og at ásetingarnar fyri bygginga annars skuldu vera tær somu sum í vanligum sethúsaútstykkingum.

Í serstøku byggisamtyktini §5, stk. 4, um bygging og stødd húsanna stendur, at mest loyvda hædd er 9,0 m frá planering.

Í almennu byggisamtyktini fyri A1 øki stendur, og er tað sum ætlað var í økinum, at mest loyvda hædd til hægsta punkt við útvegg er 6 m, og 9 m til mønuna. Hús við einvegis takhalli mega verða 6 m høg á lægru síðuni og 7,5 m á hægri síðuni.

Ætlanin við ásetingini í serstøku byggisamtyktini var at tryggja, at mest loyvda hædd á húsum var sum í vanligum sethúsaøkjum, men av tí at einki stendur um, hvar hetta mátið er til, ella hvussu høgir útveggirnir kunnu vera, kann hetta elva til misskiljingar, og verða tolkað soleiðis, at øll húsini kunnu verða 9 metur høg. Hetta er ikki ætlanin. Tí verður mælt til, at taka ásetingina um mest loyvdu hædd úr serstøku byggisamtyktini fyri Dalavegin, og at hæddarviðurskiftini verða sambært ásetingunum fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini.

Eftirsum ætlanin frammanundan er at broyta serstøku byggisamtyktina, verður somuleiðis mælt til at broyta navnið á byggisamtyktini til "Serstaka byggisamtyktin fyri Lagatrøð", sum er navnið, vegurin til útstykkingina hevur fingið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Nýggj serstøk byggisamtykt við Dalavegin, matr. nr. 804a, Tórshavn,* journal nr. 19/04022

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- *Serstøk byggisamtykt – broytingar,* journal nr. 21/01433-2.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Dalavegin sambært skjalinum *Serstøk byggisamtykt - broytingar,* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. mai 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við almennu hoyringina av broytingini av byggisamtyktini, er ein kæra innkomin, sí skjal *Kæra viðvíkjandi broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Lagatrøð.*

Kæran snýr seg í stóran mun um málsviðgerðina av upprunaligu serstøku byggisamtyktini og gongdina við útstykkingini. Ført verður m.a. fram at:

- Málið frá byrjan hevur verið merkt av at verða skundað ígjøgnum við fleiri fyrisitingarligum feilum.
- Tað varð lovað, at vegurin fór at fylgja lendinum, men hann liggur 2 m yvir lendinum framman fyri verandi sethús.
- Samskifti og umsiting bera brá av at virka skjótt og í tí dulda. Talan er um so mikið fá hús, ið verða beinleiðis rakt av broyttu byggisamtyktini, at tað lættliga ber til at leggja skrivlig boð í allar postkassar í grannalagnum.
- Ein byggisamtykt er ein avtala við borgaran. Og avtalur skulu haldast og ikki broytast.

Fyri at rætta uppá skeivleikan, verður í kæruni ynski ført fram um at:

1. Økið verður matrikulerað aftur til uppruna samtyktina ella kommunan keypir stykkini aftur og ger eina grøna fløtu til sínar borgarar – tí her er ongin grønur blettur eftir í miðbýnum.
2. Bygt verður í mesta lagi 1,5 hædd frá grundini av. Lendið upp til veghædd skal telja við.
3. Byggjast skal við flagtekjum fyri at varðveita eitt sindur av grønum øki eftir í miðbýnum.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Serstaka byggisamtyktin fyri Dalavegin (Lagatrøð) varð góðkend av Umhvørvis- og vinnumálaráðnum í 2019. Talan er soleiðis um eina góðkenda ætlan, ið er komin væl ávegis, stykkini eru seld, og fleiri av eigarunum eru ávegis at fáa byggiloyvi. Hendan broytingin snýr seg um at nágreina hæddarásetingar.

Broytingar í byggisamtyktum og uppskot til nýggjar serstakar byggisamtyktir eru at meta sum eitt reguleringsamboð og ikki ein vanlig fyrisitingarlig avgerð. Harvið verður tryggjað við lóg, at allir viðkomandi

aktørar verða “hoyrdir” í tíðini, har broytingin liggur frammi alment. Tí verða broytingar av byggisamtyktum ikki sendar ávísum borgarum til hoyringar, men til allan almenningin til viðmerkingar.

Talan er um eina sethúsaútstykking í býnum, og tað verður ikki mett verða ráðiligt, ella rímiligt, at hesi skulu hava meira bindandi ásetingar enn onnur grundstykkir í býnum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at hildið verður fast í uppskotinum til broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Dalavegin, sum samtykt í býráðnum 27. mai 2021, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

# 232/21 Broyting av almennu byggisamtyktini við Miðhorn, matr. nr. 1160a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.05.2021 | 96/21 | 21/01539-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.05.2021 | 148/21 | 21/01539-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 148/21 | 21/01539-1 |
| 4 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 232/21 | 21/01539-1 |

**Upprunin til málið**
Í november 2020 varð økið við Miðhorn bjóðað út í almennari sølu – uml. 7000 $m^2$ til útstykkking til sethús ella raðhús og uml. 5700 $m^2$ til bygging og umsiting av leiguíbúðum. Talan er um økið millum býlingin á Norðasta Horni og býlingin Millum Horna, sí kortskjal *Økið*.

Alt økið liggur sum er í 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er ætlað landbúnaði. Um økið skal kunna verða nýtt til tað, sum lýst er í útbjóðingartilfarinum, má byggisamtyktin fyri økið broytast til bústaðarøki.

**Lýsing av málinum**
Økið við Miðhorn, partur av matr. nr. 1160a, Tórshavn, liggur millum tveir býlingar, ið lýsa hvør sín bústaðardám. Vestanfyri liggur Norðasta Horn við sethúsum og tvíhúsum og eystanfyri liggur Millum Horna við íbúðarhúsum og sethúsum. Útstykkingin við Miðhorn verður soleiðis við til at binda býlingarnar saman.

Eystara helvt av økinum oman fyri vegin, varð boðið út til bygging og umsiting av íbúðum. Hetta økið liggur á uml. somu hæddarkurv sum íbúðarhúsini undir Gráasteini, og liggur sum framhald av hesum niðan móti bratta lendinum. Fyri at tað skal vera møguligt at byggja íbúðarbygging sum ætlað, eigur hetta at verða broytt til A2 øki í almennu byggisamtyktini, sum er øki ætlað høgari bústaðabygging, sí skjal *Eftir broyting.*

Økið niðan fyri vegin varð boðið út til útstykkking til sethús ella raðhús. Fyri at hetta skal vera møguligt, eigur økið at verða broytt til A1 øki í almennu byggisamtyktini, ætlað sethúsabygging, og verður hetta somuleiðis við til at knýta A1 øki eystanfyri og vestanfyri saman.

Min. 10% av samlaðu útstykkingini skal gerast til fríøki, ið skal vera til gagns fyri íbúgvarnar í økinum.

Atkomuvegurin til økið verður knýttur í Velbastaðvegin.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
§5, stk. 1. Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisni kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.

Ásetingar fyri A2 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
§6, stk. 1. Loyvt er einans at byggja hús í fleiri hæddum til bústaðarendamál. Í sambandi við bygging skal tó bera til at gera rúm til felags nýtslu sum t.d. stovnar, vaskirúm o.a. fyri tey, ið har búgva.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tá verkætlanin er komin longur, og uppskot til skipan av økinum fyriliggur, er ætlanin at gera eina serstaka byggisamtykt, ið fevnir yvir bæði íbúðarøkið og sethúsa/ raðhúsaøkið.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Útbjóðing av útstykkking við Miðhorn í Tórshavn,* journal nr. 20/03654.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Økið liggur í 4. Grundumráði, og skal broytingin tí góðkennast av friðingarmyndugleikanum.

**Skjøl**
- *Økið,* journal nr. 21/01539-2.
- *Áðrenn broyting*, journal nr. 21/01539-2.
- *Eftir broyting,* journal nr. 21/01539-2.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til broyting av almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu sambært kortskjalinum *Eftir broyting*, treytað av loyvi frá friðingarmyndugleikanum, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. mai 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Uppskotið til broyting av almennu byggisamtyktini fyri økið við Miðhorn hevur ligið til almenna hoyring frá 2. juni 2021 til 14. juli 2021, og í tí sambandi eru viðmerkingar komnar frá einum granna í økinum, sí skjal *Viðmerking til broyting.*

Í viðmerkingini verður ført fram at:
- Ynskiligt hevði verið, um man helt seg til tær ætlanirnar, sum vóru við byggingini á Norðasta Horni av fyrstani tíð - at bygt hevði verið sethúsabygging heim í Havnina og ikki byggja høgar sethúsablokkar á høgum lendi, sum ikki kann bera tað og sær óhóskandi út í vakra umhvørvinum á leiðini.
- At leggja ein part av 4. Grundumráði sum A2 bústaðir til íbúðir er at fara ov langt í mun til, hvat økið kann vera. Talan er um vakurt náttúru øki, og er tað stór synd at oyðileggja tað við at broyta tað til A2 øki.
- Mælt verður til, at øll ætlaða broytingin av parti av matr. nr. 1160a verður løgd út sum A1 bústaðarøki.

Til hetta hevur umsitingin hesar viðmerkingar:
Í Tórshavnar kommunu hevur verið vanligt, at loyvt høgari bygging fram við brøttum lendi. Hetta soleiðis at høg bygging kann loyvast í økjum, uttan at byggingin fer upp um fjallarøðina. Dømi um tílík øki í býnum eru íbúðarøkið við Heimasta Horn, íbúðarøkið við Kongavarða og komandi íbúðarøkið á Oyggjarvegnum.

Parturin av matr. nr. 1160a, Tórshavn, sum í broytingaruppskotinum verður lagdur til A2 øki, liggur á uml. somu hæddarkurvu sum íbúðarbyggingin á Heimasta Horni og við líknandi lendisviðurskiftum, og mett verður, at høg íbúðarbygging hóskar seg til økið og er í trá við onnur A2 øki í býnum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at hildið verður fast í uppskotinum til broyting av almennu byggisamtyktini fyri part av matr. nr. 1160a, Tórshavn, sum samtykt í býráðnum 27. mai 2021, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

## 233/21 Nýggj serstøk byggisamtykt Millum Horna, matr. nr. 1121a, 1121g, 1121h, 1121i og 1121k, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2021 | 110/21 | 21/01736-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 196/21 | 21/01736-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 152/21 | 21/01736-1 |
| 4 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 233/21 | 21/01736-1 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av matr. nr. 1121a, 1121g,1121h, 1121i og 1121k, Millum Horna, hevur søkt um loyvi at byggja íbúðir á ognunum. Matr. nr. 1121a liggur í A2 øki í almennu byggisamtyktini, ætlað høgari íbúðarbygging og hinir matriklarnir liggja í A1 øki í almennu byggisamtyktini, ætlað sethúsabygging, sí skjal *Almenn byggisamtykt Millum Horna*. Við serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verður íbúðarbygging loyvd í A1 øki.

Í umsóknini verður skrivað, at verkætlanin fevnir um uml. 90 íbúðir, P-básar, takt P-øki, goymsluskúrar, atkomugeirar, svalagongdir, lyft/trappubygning, gøtur, felags- og spæliøki, øki til plantur/vøkstur o.a.

**Lýsing av málinum**
Íbúðarverkætlanin, sum søkt verður um, er býtt í tveir partar – norðara part, sum liggur í A2 øki og sunnara part, sum liggur í A1 øki. Á A2 økinum er ætlanin at byggja bygning í 5 hæddum, við íbúðum á fýra teimum ovastu hæddunum og parkering/goymslu á niðastu hædd. Nýtsla, hædd, byggi- og nýtslustig, er í trá við ásetingarnar fyri A2 øki í almennu byggisamtyktini. Somuleiðis eru parkeringsviðurskiftini og fríøkini í trá við ásetingarnar í almennu byggisamtyktini. Økið framman fyri íbúðarbygning er fyrst og fremst parkeringsøki, ið er felags fyri alt verkætlanarøkið. Harumframt er eitt felags útiøki aftan fyri bygningin.

Á A1 økinum er ætlanin at byggja bygningar í tveimum hæddum, sum í stødd eru at meta sum sethús/tvíhús. Ætlanin er at byggja 7 tílíkar bygningar við 4 íbúðum í hvørjum bygningi. Mitt í A1 økinum er stórt fríøki, umframt parkering og goymslurúm.

Íbúðarbyggingin, sum er ætlað í A2 økinum, krevur í sær sjálvum ikki eina serstaka byggisamtykt, men talan er um eina samlaða ætlan, ið avhongur av hvørjum øðrum, av tí at byggingin í A1 økinum skal nýta p-plássini í A2 økinum og íbúgvarnir í A2 økinum skulu hava atgongd til fríøkið í A1 økinum. Tí er neyðugt við einari serstakari byggisamtykt, ið er galdandi fyri bæði økini.

Økið Millum Horna, er eitt øki við blandaðari sethúsa- og íbúðarbygging. Eystanfyri eru høgu íbúðarbygningarnir við Heimasta Horn, umframt at fleiri útstykkingar til íbúðir og sethús eru ætlaðar í økinum. Ætlaða byggingin í A2 liggur lendisliga á linju við íbúðarbyggingina á Heimasta Horni og gerst soleiðis partur av geiranum av høgari íbúðarbygging, ið verður loyvd fram við bratta lendinum norðanfyri. Í A1 økinum, sum annars er ætlað sethúsum, verður í hesum føri mett vera ráðiligt at loyva íbúðum, m.a. av tí at byggingin í stødd og skapi minnir um sethúsabygging, og av tí at onnur íbúðarbygging er ætlað í A1 økinum eystanfyri.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.
- Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

Ásetingar fyri A2 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Loyvt er einans at byggja hús í fleiri hæddum til bústaðarendamál. Í samband við bygging skal tó bera til at gera rúm til felags nýtslu sum t.d. stovnar, vaskirúm o.a. fyri tey, ið búgva har.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Tekniska deild metir, at yvirskipaða ætlanin er ráðilig hvat viðvíkur ferðslu og leiðingum. Hetta skal tó kannast nærri, tá ætlanin er komin longri, og farið verður undir at geva loyvir.

Tórshavnar kommuna er í holt við at yvirtaka Velbastaðvegin út til Norðasta Horn, og tískil skal Landsverk ikki geva loyvi til íbindingina.

**Skjøl**

- *Almenn byggisamtykt Millum Horna,* journal nr. 21/01736-4.
- *Serstøk byggisamtykt Millum Horna,* journal nr. 21/01736-4.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt Millum Horna, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við teirri treyt, at endaligar tekningar av útsjóndini fyriliggja til býráðsfundin.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini við tí broytingaruppskoti frá Trónda Sigurðsson, at sett verður í serstøku byggisamtyktina, at byggjast kunnu 90 íbúðir í økinum.

Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við, at málið hevur ligið til almenna hoyring, eru 4 mótmæli innkomin frá grannum Millum Horna 4, 6, 10 og 32, sí skjøl *1. Mótmæli, 2. Mótmæli, 3. Mótmæli* og *4. Mótmæli.*

Fleiri av evnunum, ið verða viðgjørd í mótmælunum, ganga aftur, og niðanfyri verða tey lýst og viðgjørd:

1. **Dámurin á økinum og nøgd av íbúðum**

- Ætlanin er at kroysta 90 íbúðir á eitt lutfalsliga lítið øki. Við uml. 3 fólkum í hvørjari íbúð, fara 250-300 fólk at búgva á økinum – meir enn fólkatalið í t.d. Kaldbak og Hvalvík.
- Húsini, sum eru teknaði á A1 økið í neðra, standa so tætt og eru so høg, at dagslósið verður avmarkað og alt økið harvið gerst myrkt.
- Um so er, at býráðið ætlar at víkja frá 9 metur hædd frá kjallaralendi, so kunnu bygningarnir fara langt upp í luftina, og tað blívur ikki nøkur vøkur sjón.
- Stóra nøgdin av íbúðum á økinum kemur at gera, at tað verður sera trongt Millum Horna.
- Ætlaða byggingin er merkt av at fáa so nógvar íbúðir inn á lendið sum gjørligt.
- Tað verður ikki í tilfarinum nóg væl grundgivið fyri, hví neyðugt er at víkja frá ásetingunum til byggiøki A1, og hvussu stórt nýtslustigið nú fer at verða í mun til galdandi ásetingar.

**2. P-pláss, vegir og ferðsla**

- Eingin konkret kunning um vegabreidd, gongubreyt og frástøður til verandi hús.
- Verandi gongubreyt er ikki við á tekningunum – t.v.s. er hon tikin burtur.
- Vegurin smalkaður í so stóran mun, tí húsini verða bygd oman í vegin, so tað bert er pláss fyri einum bili at koyra á vegnum og gongubreytin er tikin burtur.
- Tilfarið vísir, at vegurin verður førdur gjøgnum havan hjá húskinum, ið býr Millum Horna 4, og íbundin vegin undir Gráasteini. Hetta má vera ein feilur.
- Einans 94 p-pláss verða – t.v.s. uml. 1 til hvønn bústað. Flestu húski hava 2 bilar, og eingi p-pláss eru til gestir. Hetta merkir, at fólk fara at seta bilarnar fram við vegnum allastaðni í økinum. Har verður ruðuleiki og sjúkrabilar og brandbilar fara at fáa tað trupult at koma til og frá.
- 90 íbúðir viðføra minst 150 bilar, so vegurin verður avtaglaður við bilum, so tað verður trupult at koma til og frá húsum, og einki p-pláss til gestirnir
- Í málslýsingini til býráðsfundin verður ætlanin samanborin við ætlaðu íbúðarbyggingina á matr. nr. 1119a. Har eru tó 1,5 p-pláss pr. íbúð. Harafturat verður munandi meira bygt pr. grundstykkjavídd á matr. nr. 1121, enn á matr. nr. 1119a.
- Kavarudding verður trupul.
- Royndir vísa, at á vetri í kavaveðri og hálku er trupult at at fáa ferð á niðan í brekkuna, tí svingið er so krapt, og trupult er at sleppa av við kavan, ið skal ruddast burtur. Tí hevði verið skilagott at gjørt vegin breiðari enn hann er í dag, soleiðis at bilarnir ikki missa alla ferðina á veg niðan til parkeringsplássini. Tískil er heldur ikki skilagott at leggja húsini so tætt við vegin, tí hetta tarnar útsýninum.
- Vandi fyri, at grannar ikki sleppa til egin hús, tí innkoyringin verður sperrað av parkeraðum bilum.
- Framgongur ikki, um serstakt pláss verður til løðing av el-bilum.

**3. Tilfar, ið er lagt fram**

- Ófullfíggjað og ósamanhangandi tilfar, ið er lagt fram á býraðsfundi og alment. M.a. er ein vegur teknaður ígjøgnum okkara grundøki, sum sambært býararkitektinum tí ikki skal vera har.
- Tilfarið, ið er lagt fram, lýsir ikki nóg væl, hvat broytingin viðførir í mun til galdandi reglur, ella hvussu hugsanin er at loysa uttanhýsis plásstørvin.

**4. Broytingaruppskot**

- Heitt verður á Tórshavnar kommunu um at halda fast um galdandi byggisamtykt fyri A1 økið.
- Stór kollvelting í mun til verandi bygging, og hetta kemur at skemma umhvørvið sera nógv, hetta er eitt sera vakurt umhvørvi, sum eigur at verða varðveitt. Tí má øll bygging passa til umhvørvið.
- Býráðið valdi í síni tíð at leggja ein býarpart á Norðasta Horni. Tað vildi tí verið tað mest natúrliga hjá sitandi býráðið at hildið áfram við somu byggisamtykt inn ímóti býnum, soleiðis at hetta fer at gerast ein samanhangandi bústaðarbygging, heldur enn at broyta byggisamtyktina fyri økið her frá at verða eitt vanligt

A1 øki og gera eina Karlamagnusarloysn afturat. Her verður í staðin kroyst eitt stórt byggjarí inn á eitt avmarkað øki, ið ikki kann bera slíka bygging.

- Mælt verður staðiliga til, at ætlaða broytingin í byggisamtyktini verður slept og at hildið verður fast um galdandi byggisamtykt fyri A1 økið, og soleiðis varðveita dámin fram við Velbastaðvegnum frá Norðasta Horni, heimeftir og víðari fram við vegnum undir Gráasteini.

Ad. 1. Íbúðarbyggingin í A1 økinum, er skipað soleiðis, at min. 5 metur er ímillum bygningarnar og min. 2,5 m til vegin. Hetta er í trá við aðra bústaðabygging í sethúsaøkjum. Somuleiðis eru ásetingar viðvíkjandi hædd, byggi- og nýtslustig tær somu, sum fyri A1 sethúsaøki, t.v.s. at mest loyvda hædd er 9 m til mønuna og 6 m til hægsta punkt við útvegg, mest loyvda byggistig er 0,3 og mest loyvda nýtslustig er 0,6.

Tað, at hædd, byggi- og nýtslustigið er tað sama, sum í vanligum sethúsaøkjum ger, at samlaða byggingin ikki er meira rúgvismikil, enn í vanligum sethúsaøkjum. Serstaka byggisamtyktin ger tó, at til ber at skipa økið annarleiðis, soleiðis at avmarkaða byggilendið í kommununi verður gagnnýtt mest møguligt.

Í mun til ljósviðurskifti, so eru mest loyvdu hæddir og frástøður bygninganna tær somu, sum í vanligum sethúsaøkjum, og eru hesi við til at tryggja nøktandi ljós viðurskifti.

Ad. 2. Tekniska deild metir, at yvirskipaða ætlanin er ráðilig hvat viðvíkur ferðslu og leiðingum. Hetta skal tó kannast nærri, tá ætlanin er komin longri, og farið verður undir at geva loyvir. Vegir, gongubreytir og p-pláss skulu fylgja galdandi reglum og normum.

Verandi vegur og gongubreyt verða ikki broytt. Vegurin er uml. 6 m breiður og gongubreytin er uml. 2 m breið. Vegur, p-pláss og gongubreyt halda seg innanfyri matriklar umsøkjarans, og fara soleiðis ikki inn á grannaognir. Hetta sæst á kortinum *Støðumynd á korti*, har støðumyndin er løgd inn í myndakort kommununnar.

Nøgdin av p-plássum er í trá við ásetingar um p-pláss til íbúðir í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og Bygningskunngerðini 2017 – 1 p-pláss pr. 75 $m^2$, tó í minsta lagi 1 p-pláss pr. íbúð.

Í sambandi við øki til parkering kann nevnast, at ein partur av p-plássunum verða í parkeringskjallara. Hetta ger, at meira pláss er at skapa uttandura felagsøki, ið eru góð fyri trivnaðin í økinum.

Ad. 3. Tað tilfarið, ið er lagt til almenna hoyring, er tað, sum er galdandi. Verkætlanin skal sjálvsagt verða á øki umsøkjarans, um ikki onnur avtala er gjørd við grannarnar. Tekningarnar, sum eru lagdar til almenna hoyring, halda seg á øki umsøkjaran, fylgja verandi matrikulmørkum, og fara soleiðis ikki inn á grannaognir.

Í serstøku byggisamtyktini stendur lýst, hvat loyvt er at byggja á økinum, sum serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri. M.a. stendur í §4, stk. 3 um bygging og støðd húsanna, at aðrar ásetingar, t.e. byggiregulerandi ásetingar, skulu verða í samsvar við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

Ad. 4. Økið, sum serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, liggur sum A1-sethúsaøki og A2-øki til høga bústaðabygging. Í A1 øki ber tó til at gera serstakar byggisamtyktir, soleiðis at íbúðir kunnu byggjast í sethúsaøkjum, har tað verður mett at hóska til. Byggilendið í Tórshavnar kommunu er avmarkað, og man hevur í fleiri førum samtykt, at arbeiðast skal fram ímóti at byggja fleiri íbúðir í kommununi, m.a. í Kommunuætlanini og í Bústaðarpolitikkinum, sum ásetir, at ynskta bústaðarbýtið í kommununi í 2030 er 60% sethús, 20% tví- og raðhús og 20% íbúðir. Bústaðarbýtið í 2017 var 72% sethús, 17% tví- og raðhús og 20% íbúðir. Hóast hetta, so skulu atlit sjálvsagt takast til trivnað og nøktandi bústaðarviðurskifti, dám á økinum o.a.

Í økinum Millum Horna, er, og er ætlað, blandað bústaðabygging, við sethúsum, lágari íbúðarbygging, og høgari íbúðarbygging. Økið, sum hendan serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, fevnir um lága íbúðarbygging, sum í støðd minnir í sethús/tvíhús, umframt høg íbúðarbygging upp móti brattari lendinum. Hetta verður mett at hóska seg til økið, og aðrar ætlanir í økinum.

Grannarnir, sum hava sent kommununi mótmæli, vóru 31.08.2021 á fundi við borgarstjóran, formannin í byggi- og býarskipanarnevndini og umsitingina, sí fundarfrásøgn frá grannunum, skjal nr. 21/01736-28, Fundarfrágreiðing frá fundi við grannar 31.08.2021

Sum sæst í fundarfrásøgnini, so vóru somu evnir, sum klagurnar somuleiðis fevndu um, umrødd.
Eftir fundin varð ætlanin umrødd, og avgjørt varð at biðja umsøkjaran tillaga verkætlanina, soleiðis at:

- Nøgdin av íbúðum (í A1 økinum) minka so ella so. Her metir umsitingin, at uml. 8 íbúðir eiga at verða tiknar burtur, t.v.s. 2 av bygningunum í A1 økinum. Mælt verður til, at báðir teir eystastu bygningarnir verða tiknir burtur. Hetta er fyri at íbúgvaratrýstið í A1 økinum verður meir at sammeta við íbúgvaratrýstið í vanligum sethúsaøkjum.
- Nøktandi útsýni og frástøða til veg kann betrast. Tað gerst sera hált og legst nógvur kavi í økinum um veturin. Niðasti bygningurin í eystara parti av økinum stendur soleiðis fyri, at útsýnið er vánaligt. Tí verður mett, at hesin má takast burtur, soleiðis at nøktandi útsýni og frástøða til veg kann tryggjast.
- Nøktandi umstøður verða at parkera hjá teimum búgvandi. Tá so nógvar íbúðareindir eru á einum avmarkaðum øki, er tað ikki nøktandi, at økið einans livir upp til absolutt minstamarkið, hvat viðvíkur p-plássum. Tí eiga minst 1 p-pláss at vera pr. íbúð, og um allar íbúðirnar eru uml. 75 $m^2$, skulu uml. 15 eyka p-pláss gerast afturat. Hetta skal gerast, uttan at góðskan á fríøkjunum gerst verri.
- Fríøkini í A2 økinum hava nøktandi góðsku.

Umsøkjari hevur váttað fyri umsitingini, at hann fer at tillaga verkætlanina, soleiðis at omanfyri standandi krøv verða rokkin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at serstaka byggisamtyktin Millum Horna, sum samtykt í býráðnum 23. juni 2021, verður tillagað omanfyri standandi krøv viðv. íbúðarnøgdini, útsýni, vegi, parkering og fríøki og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

# 234/21 Broyting av byggisamtykt fyri Velbastað, matr. nr. 51a, í sambandi við sethúsaútstykking

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.06.2021 | 135/21 | 21/01258-2 |
| 2 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 200/21 | 21/01258-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 151/21 | 21/01258-2 |
| 4 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 27.09.2021 | 6/21 | 21/01258-2 |
| 5 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 234/21 | 21/01258-2 |

**Upprunin til málið**
Ynski er um nýggja sethúsaútstykking á Velbastað, og í tí sambandi er skitsa til útstykking á 11 grundstykkir oman fyri Ervaveg gjørd, sí skjal *Útstykking - skitsa*.

**Lýsing av málinum**
Enn er talan bert um skitsu av útstykkingini, men fyri at fáa málið í gongd, verður uppskot gjørt til at broyta byggisamtyktina fyri økið. Økið liggur í K-Landbúnaðarøki. Um sethús skulu byggjast á økinum, má økið broytast til B-sethúsaøki, sí skjal *Eftir broyting*.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri B-sethúsaøki í byggisamtyktini fyri Kirkjubø/Velbastað eru m.a.:

- Loyvt er einans at byggja sethús við upp til 2 íbúðum og – eftir serloyvi frá byggivaldinum – tvíhús, rað- og ketuhús o.t. til eitt húski. Í sambandi við bústaðirnar skal tó bera til at innrætta høli til handlar, onnur vinnuendamál og stovnar, treytað av at hesi virki ikki eru til ampa ella lýta dámin á økinum sum sethúsabýlingi.

Ásetingar fyri K-landbúnaðarøki í byggisamtyktini fyri Kirkjubø/Velbastað eru m.a.:

- Loyvt er bert at byggja hús, ið eru neyðug til tess at tryggja fullgóðan rakstur av virkjum við teim endamálum, sum nevnd eru í stk. 1. Tó er loyvt at gera slík teknisk virki og hús, ið neyðug eru til ravmagns- og vatnveitingar, til burturveiting av skarnvatni og til telefon- og telefgrafsamband og í sambandi við vegahald.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Talan er um festijørð, sum liggur uttanfyri planlagt byggilendi, og tískil skal málið til hoyringar hjá Búnaðarstovuni og hjá friðingarmyndugleikanum.

Viðmerking er komin frá kirkjubø- og velbastaðarnevndini j.nr. 21/01258-4 og 5.

**Skjøl**

- *Útstykking – skitsa,* journal nr. 21/01258-3.
- *Eftir broyting,* journal nr. 21/01258-3.
- Viðmerking frá kirkjubø- og velbastaðarnevndini j.nr. 21/01258-4 og 5

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina sambært skjalinum *Eftir broyting*, treytað av loyvi frá avvarðandi myndugleikum, og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá byggi— og býarskipanarnevndini við tí broytingaruppskoti frá Trónda Sigurðsson, at byggisamtyktin verður broytt sambært skjalinum «skitsa», sum liggur í málinum**.**

Einmælt samtykt**.**

Annfinn Brekkstein boðaði frá, at hann er ógegnigur og luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at uppskotið til broyting av byggisamtyktini fyri Velbastað hevur ligið til almenna hoyring, er eitt mótmæli innkomið frá einum borgara á Velbastað, sí skjal *Velbastað hoyring matr. nr. 51a og 6a.*
Í mótmælinum verður m.a. víst á at:

- Velbastað er elligomul bygd og í avtaluni um samanlegging av Kirkjubøar sóknar kommunu og Tórshavnar kommunu verður sagt, at bygdirnar skulu varðveitast við sínum sereyðkennum. Við at leggja eina rond av húsum oman fyri býlingin, verður hetta lyftið ikki hildið.
- Norðast í økinum er vakur fossur og suður frá honum eru vakrir hamarsspjallir. Bygging á hesum øki fer at skemma.
- Fleiri óbygd grundstykkir eru tøk, og uml. 5 hektarar av útløgdum byggiøki eru somuleiðis tøkir. Tað átti ikki at verið neyðugt at útlagt meira byggiøki.
- Útstykkingin norðan fyri Roykshеyggjarnar, sum kommunan hevði ætlanir um, fekk nógv mótmæli, m.a. grundað av øktari ferðslu á smølu vegunum. Vìst verður til somu mótmæli í smb. við hesa ætlan.
- Viðvíkjandi broytingini av eina stykkinum á matr. nr. 6a verður víst á, at vanliga verður talan um at heildarætlan má gerast fyri eina útstykking. Í hesum føri er talan um okkurt, ið líkist eini einstakaætlan ella "skeggi nær høkuni".
- Tann vakrasti minnisvarði, ið ein kundi reist á Velbastað, er at friða allan bøin fyri bygging.

Ásannast kann, at ein partur av byggiøkinum á Velbastað er óbygt. Hetta er tó grundað á avbjóðandi lendisviðurskifti og byggilinjur fram við landsvegi, ið gera, at tað er trupult at byggja og gagnnýta lendið skynsamt. Ervavegur er kommunalur vegur. Tískil ber til at byggja tættari vegnum, lendið kann gagnnýtast betur og sloppið verður undan at gera stórar íløgur í veg.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at:

- Broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 51a, Velbastað sambært kortskjalinum *Eftir broyting.*
- Nevndin tekur støðu til, um byggisamtyktin skal broytast fyri matr. nr. 6a, Velbastað sambært kortskjalinum Útstykking – skitsa.
- Beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og halda fast í býráðssamtyktini og at beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 27. september 2021:** Staðbundna nevndin tekur undir við tilmælinum, men vil fegin kunnast tá útstykkingarætlanin er liðug. Annars vísa til viðmerkingarnar sum eru sendar inn áður.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

Annfinn Brekkstein boðaði frá, at hann metti seg vera ógegnigan at luttaka í viðgerðini av málinum, og tók býráðið hesa fráboðan til eftirtektar.

# 235/21 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 147/21 | 21/03382-1 |
| 2 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 27.09.2021 | 7/21 | 21/03382-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 235/21 | 21/03382-1 |

**Upprunin til málið**
Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* er samtykt, at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi.

Fyri fleiri av bygdunum eru byggisamtyktirnar ikki vorðnar endurskoðaðar síðani tær eru blivnar partur av Tórshavnar kommunu, og tí er í nógvum førum ósamsvar millum byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Harumframt er munur á hvat loyvt verður í teimum ymisku bygdunum, og hetta ger byggisamtyktirnar fyri bygdirnar torskildar, truplar at umsita og viðførir ójavnvág í kommununi.

Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* eru yvirskipaði viðurskifti viðgjørd við tí endamáli, at fáa eins ásetingar í byggisamtyktunum fyri bygdirnar, tó við nøkrum frávikum, tá talan er um staðbundin viðurskifti og serstakan bygdadám.

Í hesum málinum verður serstaka byggisamtyktin fyri Velbastað viðgjørd nærri, við støði í yvirskipaðu viðurskiftunum, sum eru viðgjørd í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar.*

**Lýsing av málinum**
Velbastaður er fevndur av byggisamtyktini hjá Kirkjubøar kommunu, og varð gjørd í 1987. Í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri bygdirnar verður mælt til, at bygdirnar Kirkjubøur, Velbastaður, Nólsoy, Hvítanes, Kaldbak og Hestur fáa hvør sína serstaka byggisamtykt, í trá við ásetingarnar fyri 4. Grundumráði í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Hetta merkir, at serstaka byggisamtyktin fyri Kirkubø/Velbastað verður býtt í tvey, soleiðis at bygdirnar fáa hvør sína serstaka byggisamtykt.

Mett verður ikki, at serstøku byggisamtyktirnar fyri bygdirnar skulu hava eins nógv ymisk øki, sum almenna byggisamtyktin hevur, av tí at talan er um minni bygdir, har ikki ber til at regulera virksemið eins neyvt og í høvuðsstaðnum. Tí eru tær ymisku ásetingarnar fyri allar bygdirnar samanbornar, og funnið er fram til nakrar felags ásetingar, ið hóska til allar bygdirnar.

Áðrenn endurskoðanina av byggisamtyktini fyri Velbastað, eru hesi ymisku økini í bygdini:

B: Sethús
C: Vinnuendamál
C:1A: Vinnuendamál
D: Havnaøki
$D^1$: Ferjuhavn
E: Almennir stovnar
F: Almenn frítíðarøki
G: Neyst og bátapláss
H: Frílendi
$H^1$: Friðað øki
J: Bóndahús
K: Landbúnaður

Niðanfyri eru ásetingarnar í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað, sum smb. uppskotinum eru tær somu fyri allar bygdirnar:

SA: Bústaðarøki
SB1: Havnaøki
SB2: Vinnuøki
SD1: Frílendi
SD2: Almennir stovnar og mentan
SE: Neyst
SF: Frítíðarhús

Tá kemur til bókstavir og tøl, verða somu tekin brúkt fyri økini í bygdunum sum í høvuðsstaðnum, men við tí muni, at “S” er sett frammanfyri bókstavirnar og tølini, t.d. “S”B1, fyri at vísa til at talan er um øki í eini serstakari byggisamtykt, og ikki í høvuðsstaðnum.

Sum sæst, so eru tað færri øki í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað.

- B: Sethúsaøki er broytt til SA: Bústaðarøki
- Tey bæði vinnuøkini C: Vinnuendamál og C1A Vinnuendamál eru broytt til SB2: Vinnuøki
- Tey bæði havnaøkini D: Havnaøki og $D^1$: Ferjuhavn, eru broytt til SB1: Havnaøki
- Tey bæði almennu økini E: Almennir stovnar og F: Almenn frítíðarøki eru broytt til SD2: Almennir stovnar og mentan
- G: Neyst og bátapláss er broytt til SE: Neyst
- Tey bæði almennu grønu økini H: Frílendi og $H^1$: Fríðað øki eru broytt til SD1: Frílendi
- Tey bæði landbúnaðarøkini J: Bóndahús og K: Landbúnaður eru broytt til 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Tær ávísu broytingarnar í økjum og ásetingum eru nærri lýstar í skjalinum *KirkjubøVelbastað – áðrenn og eftir broyting,* og ein meira yvirskipað lýsing er niðanfyri:

**Bústaðarøki**
Bústaðarøkini í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu loyva typologiunum stakhús, tvíhús, raðhús og íbúðir. Í bygdunum er ein meting gjørd av, hvør typologi skal loyvast í hvørjari bygd, gjørd út frá m.a. verandi bygging/ásetingum og bygdadámi.

Á Velbastað verður mett ráðiligt at loyva stakhúsum, tvíhúsum, raðhúsum og íbúðum. Bygdin hevur eina hóskandi støðd og nærleika til høvuðstaðin, og mett verður, at dámurin í bygdini rúmar hesum typologium.

Í sethúsaøkjum í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er minsta grundstykkjavídd 500 $m^2$. Í bygdunum verður yvirskipað mett, at grundstykkini kunnu vera minni, og á Velbastað verður mett, at ein hóskandi minsta grundstykkjavídd er 400 $m^2$. Hetta grundað á lendisviðurskifti, og verandi víddir á grundstykkjum í bygdini.

Ásetingar viðv. hædd, byggi- og nýtslustigi vera tær somu sum fyri sethúsaøki í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Vinnu-/Havnaøki**
Í summum bygdum eru vinnu- og havnaøkini tvunnin saman, meðan tað í summum bygdum eru ymiskar ásetingar – á Velbastað eru tað áðrenn endurskoðanina tvey ymisk vinnuøki og tvey ymisk havnaøki.

Mett verður, at tað er greiðast at hava eitt øki til vinnu og eitt øki til havnaendamál í serstøku byggisamtyktunum fyri bygdirnar. Soleiðis verða tey atskild, uttan at tað gerst ov ítøkiligt, júst hvat virksemi skal vera í økinum.

**Almenn øki**
Í byggisamtyktini fyri Kirkjubø/Velbastað er áðrenn endurskoðanina 4 ymisk almenn øki – Almenn frítíðarøki, øki til almennar stovnar, frílendi og friðað øki.

Mett verður, at í bygdunum eiga tvey ymisk almenn øki at vera – eitt til grøn fríøki, har ikki er loyvt at byggja, og eitt til almennar stovnar, ítrótt og mentan. Ikki er neyðugt við serskildum øki til friðað øki. Hesi eru friðað smb. løgtingslógum, t.d. nr. 48 um náttúrufriðing og nr. 19 um fornminni og bygningar.

**Neystaøki og øki til frítíðarhús**
Ynski hevur leingi verið um at loyva frítíðarbústøðum í neystum, og mett verður, at ásetingarnar fyri neystaøkini í bygdunum skulu vera soleiðis, at til ber at hava frítíðarbústað á loftinum. Tó, so skulu nakrar treytir verða, t.d. skulu kloakkir og aðrar leiðingar gjaldast av neystaeigarunum og á niðastu hædd skal vera møguligt at hava bát.

Í bygdunum eiga somuleiðis at vera løgd av øki til frítíðarhús. Hesi eiga at liggja í útjaðaranum av bygdini, soleiðis at nærleiki er til almennar hentleikar, uttan at tey gera seg ov nógv inn á bygdalagið – í hesum sambandi eiga atlit so sum stødd á øki, bygging, snið og tílíkt at verða tikin. Á økjunum til frítíðarhús eigur ikki at vera møguligt at búgva alt árið, grundstykkini kunnu vera minni, og til ber at skipa tey annarleiðis enn vanlig bústaðarøki, við t.d. felags parkeringsplássum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Í § 26, stk. 5 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett at:

- *Í bygdunum Kaldbak, Kaldbaksbotni, Hvítanesi, Norðradali, Syðradali, Nólsoy, Hestur, Koltur, Kirkjubø og Velbastað kann, út um tað, ið er ásett fyri 4. Grundumráði, einans verða bygd sambært serstakum byggisamtyktum.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Umsókn um fíggjarligan stuðul til ábøtur á spælipláss á Velbastað, matr. nr. 50a og 50ak,* journal nr. 16/02938.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- *KirkjubøVelbastað – áðrenn og eftir broyting,* journal nr. 21/03382-2.
- *Kort – áðrenn endurskoðan,* journal nr. 21/03382-3.
- *Kort – eftir endurskoðan,* journal nr. 21/03382-3.
- *Serstøk byggisamtykt – Tekstur,* journal nr. 21/03382-4.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað smb. skjølunum *Serstøk byggisamtykt – tekstur* og *Kort – eftir endurskoðan*, og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 27. september 2021:**

**Ein meiriluti:** Dánjal Pauli í Búðini, Eyðbjørn Gaard og Bryndis Hjartardsdóttir tekur ikki undir við at J og K umráði verða broytt til 4. grundumráði vegna væntandi kunning, men annars tekur nevndin undir við hinum punktunum.

**Ein minniluti:** Gunvør Balle tekur undir við tilmælinum.

**Ein minniluti:** Annfinn Brekkstein tekur undir við tilmælinum, men at J blívur standandi.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at beina málið aftur i byggi- og býarskipanarnevndina.

# 236/21 Umsókn um at broyta matr. nr. 293b, Signabøur til A1 øki, so møguleiki er at byggja sethús á grundstykki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.10.2020 | 190/20 | 20/03062-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.05.2021 | 94/21 | 20/03062-2 |
| 3 Kollafjarðarnevndin | 29.09.2021 | 7/21 | 20/03062-2 |
| 4 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 236/21 | 20/03062-2 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar kommuna hevur fingið umsókn um at broyta almennu byggisamtyktina fyri matr. nr. 293b, Kollafjørður (á Signabø), frá 4. Grundumráði til A1 øki, soleiðis at møguleiki er at byggja sethús á grundstykkinum, sí skjal *293b*.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Økið á Signabø er skipað við trimum ymiskum ásetingum í almennu byggisamtyktini, sí skjal *Signabøur - byggisamtykt*:

- A1 sethúsaøki er størsti parturin. Hesin er allur omanfyri høvuðsvegin á Signabø.
- D1 frílendi, sum gongur ígjøgnum vestara partin av Signabø, har tvær áir renna oman til fjørðin.
- Harumframt eru tvey neystaøki niðri við fjørðin.

Vegurin á Signabø er eitt greitt byggisamtyktarligt mark millum A1 sethúsaøki og 4. Grundumráði, sí skjal *Signabøur - byggisamtykt*. Hetta sæst eisini aftur, um hugt verður eftir eldri byggisamtyktum fyri Signabø – økið omanfyri vegin er sethúsaøki, meðan økið niðanfyri vegin er frílendi og til landbúnað, sí skjal *Byggisamtykt Kollafjørður 1978-1990*.

Ognin, ið søkt verður um at broyta, liggur niðanfyri vegin, við omankoyringina til bátahylin á Signabø, og er dámurin á økinum meira neystakendur.

Fyri at varðveita dámin á økinum og meginregluna um at sethúsabygging á Signabø er omanfyri vegin, verður mælt frá at ganga umsóknini á møti.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.

Ásetingar fyri 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- 4. Grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

### Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

### Skjøl

- *293b,* journal nr. 20/03062-3.
- *Signabøur byggisamtykt,* journal nr. 20/03062-3.
- *Byggisamtykt Kollafjørður 1978-1990,* journal nr. 20/03062-4.

### Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla frá at ganga umsóknini á møti grundað á ynskið um at varðveita dámin á økinum og at varðveita meginregluna um, at sethúsaøkið á Signabø er oman fyri vegin.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsøkjarin hevur sent áheitan um at taka málið upp til nýggja nevndarviðgerð.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin vísa til tilmælið til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini hin 7. oktober 2020.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mai 2021:** Samtykt at ganga umsóknini á møti, treytað av, at matrikulin verður 500 fermetrar til støddar, umframt at umsøkjari ber allan kostnað av at gera grundstykkið byggibúgvi við leiðingum osfr.

**Kollafjarðarnevndin 29. september 2021:** Staðbundna nevndin tekur undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

# 237/21 Fíggjarætlan 2022, Tórshavnar kommuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.09.2021 | 239/21 | 21/03493-3 |
| 2 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 237/21 | 21/03493-3 |
| 3 Mentamálanevndin | 06.10.2021 | 245/21 | 21/03493-3 |
| 4 Havnanevndin | 05.10.2021 | 37/21 | 21/03493-3 |
| 5 Vinnunevndin | 07.10.2021 | 33/21 | 21/03493-3 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.10.2021 | 189/21 | 21/03493-3 |
| 7 Tekniska nevnd | 04.10.2021 | 66/21 | 21/03493-3 |
| 8 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2021 | 42/21 | 21/03493-3 |
| 9 Trivnaðarnevndin | 07.10.2021 | 69/21 | 21/03493-3 |
| 10 Heilsu- og eldranevndin | 05.10.2021 | 26/21 | 21/03493-3 |

**Upprunin til málið**
Fíggjarnevndin skal sambært kommunustýrislógini leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober.

Býráðið skal síðani viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Býráðið hevur fyrstu viðgerð 28. oktober og aðru viðgerð 25. november.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Lýsing av málinum**

**Fortreytir fyri fíggjarætlan 2022**
Í uppskotinum til fíggjarætlan 2022 er roknað við, at kommunuskattaprosentið og barnafrádrátturin framhaldandi verða ávikavist 19,00% og 8.000 kr.

Kendar framskrivingar og virksemisbroytingar eru eisini tiknar við.

Virksemisbroytingar eru t.d sáttmála- og lógarbundnar broytingar, rakstrarkostnaðar-ávirkan av nýggjum íløgur og íløgum, ið koma ístaðin fyri aðrar og eisini samtyktar og/ella ætlaðar broytingar í virksemi og tænastustøði.

Í talvuni niðanfyri síggjast høvuðstølini býtt á kommunugreinar.

| tkr | | Roknskapur 2020 | Ætlan 2021 | Ætlan 2022 | Broyting 2021/2022 pst | kr |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | | |
| 20501 | Kommununskattur | 890.147 | 873.135 | 920.000 | 5,4% | *46.865* |
| 20601 | Felagsskattur | 55.298 | 28.000 | 35.000 | 25,0% | *7.000* |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 602 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | *0* |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 155.841 | 154.817 | 154.817 | 0,0% | *0* |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 36.675 | 33.844 | 36.072 | 6,6% | *2.228* |
| | **Inntøkur íalt** | **1.138.562** | **1.091.796** | **1.147.889** | **5,1%** | ***56.093*** |
| | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 93.422 | 95.895 | 99.138 | 3,4% | *3.243* |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 256.186 | 282.668 | 302.171 | 6,9% | *19.503* |
| §3 | Børn og ung | 190.635 | 200.198 | 214.617 | 7,2% | *14.419* |
| §4 | Undirvísing | 42.880 | 45.008 | 47.159 | 4,8% | *2.151* |
| §5 | Mentan og frítíð | 61.694 | 65.573 | 63.830 | -2,7% | *-1.743* |
| §6 | Teknisk mál | 150.203 | 144.852 | 147.141 | 1,6% | *2.289* |
| §7 | Kommunal virkir TK | 87.825 | 79.062 | 81.139 | 2,6% | *2.077* |
| §7 | Kommunal virkir TH | -44.681 | -32.858 | -32.353 | -1,5% | *505* |
| | **Rakstur íalt** | **838.165** | **880.398** | **922.842** | **4,8%** | ***42.444*** |
| | | | | | | |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 18.141 | 18.000 | 18.000 | 0,0% | *0* |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 3.231 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | *0* |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **21.372** | **20.000** | **20.000** | **0,0%** | ***0*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **279.024** | **191.398** | **205.047** | **7,1%** | ***13.649*** |
| | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | - | 800 | 2.225 | 178,1% | *1.425* |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | - | 5.500 | 5.700 | 3,6% | *200* |
| 20401 | Rentuinntøkur TK | - | 0 | 0 | 0,0% | *0* |
| 20401 | Rentuinntøkur TH | - | 0 | 0 | - | - |
| | **Rentur íalt** | **2.517** | **6.300** | **7.925** | **25,8%** | ***1.625*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **276.507** | **185.098** | **197.122** | **6,5%** | **12.024** |
| | | | | | | |
| | **Avdráttir TK** | **1.234** | **1.234** | **1.234** | **0,0%** | ***0*** |
| | **Avdráttir TH** | **15.873** | **15.873** | **19.900** | **25,4%** | ***4.027*** |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **259.400** | **167.991** | **175.988** | **4,8%** | ***7.997*** |
| | | | | | | |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **230.592** | **156.506** | **169.235** | **8,1%** | **12.729** |
| | | | | | | |

Búskaparráðið hevur nýliga lagt sína heystfrágreiðing fram, og har metir ráðið fyri 2022 ein búskaparvøkstur/vøkstur í bruttotjóðarúrtøkuni BTÚ upp á 3,3% í leypandi prísum.

Ráðið endurmetir eisini búskaparvøksturin fyri 2020 og 2021. Metingin er nú ávikavist -2,4% (-6,9%) og 7,9% (5,5%).

**INNTØKURNAR**

Tað ber ikki til at siga, at korona hevur sæst stórvegis aftur í inntøkunum hjá kommununi. Væntandi verður tó felagsskatturin lakari komandi.

Inntøkumetingin av **kommunuskattinum** er við støði í staðfestu inntøkunum fyrstu átta mánaðarnar í 2021 og fíggjarætlanartølini síðstu 4 mánaðarnar við 1,00% væntaðum vøkstri løgdum omaná. Oman á samlaða metta talið fyri 2021 eru síðani løgd 2,00% fyri at koma fram til metingina fyri 2022. Inntøkurnar frá kommunuskattinum vaksa tá 5,4% ella 46,9 mió.kr upp í 920 mió.kr í mun til 873,1 mió.kr í fíggjarætlanini fyri 2021.

Inntøkurnar av **skatti av eftirlønarinngjøldum** eru mettar til 154,8 mió.kr. Hetta er sama metta tal sum fyri 2021. Ein nýgg meting fyri 2022 kemur frá Fíggjarmálaráðnum kemur væntandi skjótt. Fyri 2020 var staðfesta talið 155,8 mió.kr.

Inntøkan frá **felagsskatturin** er fyri 2022 mett at verða 35,0 mió.kr, sum er 7,0 mió.kr ella 25% hægri enn metingin í fjør. Staðfesti felagsskatturin fyri 2020 bleiv 55,3 mió.kr, og tá var metingin 35 mió.kr. Munurin ímillum tá og nú er tó, at Fíggjarmálaráðið væntar, at korona fer at síggjast aftur í rakstrarúrslitunum hjá feløgnum og harvið eisini skattinum.

**Samlaðu inntøkurnar** vaksa sostatt 56,1 mió.kr ella 5,1% upp í 1.147,9 mió.kr í mun til metingina upp á 1.091,8 mió.kr í fíggjarætlanini 2021. Til samanberingar vuksu inntøkurnar í fíggjarætlanini 2021 við 27,4 mió.kr ella 2,6% upp í 1.091,8 mió.kr í mun til fíggjarætlanina 2020.

**RAKSTRARÚTREIÐSLURNAR**
Virksemið í høvuðsstaðarkommununi er enn sum áður í stórum vøkstri.

Talið av íbúgvum í kommununi vaks frá 2020 til 2021 við 1,79% ella 397 upp í 22.607 frá 22.210. Frá 2013 og fram til 2021 er talið av íbúgvum vaksið 2.664 ella 13,4%.

Ein sovorðin vøkstur hevur náttúrliga við sær øking í virksmeminum, tænastunum og harvið eisini rakstrarútreiðslunum.

Samanløgdu rakstrarútreiðslurnar hjá kommununi vaksa í fíggjarætlanini fyri 2022 netto 42,4 mió.kr upp í 922,8 mió.kr úr 880,4 mió.kr. Hetta er ein vøkstur upp á 4,8% í mun til fíggjarætlanina 2021.

**Lønir eru størsti partur av rakstrarkostnaðunum**
Av samlaða bruttokostnaðinum eru lønirnar 61% og 74% av nettokostnaðunum. Fyri ár 2022 eru lønirnar mettar at vaksa 33,8 mió.kr ella 5,17%í mun til fíggjarætlan 2021.

Av hesum vøkstrinum eru 9,96 mió.kr lønarhækkingar, tvs sáttmálabundnar hækkingar.

Haraftrat er tað vøksturin í virkseminum, ið økir um lønirnar við 23,8 mió.kr. Størsti parturin av hesum vøkstri í krónum er á grein 2, og her er tað serliga eldraøkið. Eisini er stórur vøkstur á grein 3, dagstovnaøkið.

Sí talvuna niðanfyri.

| | *tús.kr*<br>**Grein** | **Lønar-<br>hækking** | **Lønar-<br>øking** | **íalt** |
|---|---|---|---|---|
| §1 | Kommunal fyrisiting | 1.443 | 1.576 | **3.019** |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 4.128 | 11.097 | **15.225** |
| §3 | Børn og ung | 1.777 | 9.779 | **11.556** |
| §4 | Undirvísing | 392 | 2 | **394** |
| §5 | Mentan og frítíð | 573 | 1.752 | **2.325** |
| §6 | Teknisk mál | 1.117 | -603 | **514** |
| §7 | Kommunal virkir TK | 530 | 251 | **781** |
| | | **9.960** | **23.854** | **33.814** |

**Høvuðsútreiðslutøl á greinunum**

Á **§ 1 Kommunual fyrisiting** økjast nettoúreiðslurnar 3,4% ella 3,2 mió.kr. Størsti parturin av vøkstrinum er í lønum á Teknisku fyrisiting við 1,723 mió.kr / 7,00%. Tvey størv sum byggimálsviðgerðar á tekniska økinum blivu á heysti 2019 játtaði sum eykajáttan og eru harvið ikki í fíggjarætlanini fyri 2022. Hesi mugu tískil raðfestast í 2022. Eisini er lønarvøkstur í Miðfyrisitingini, sum í høvuðsheitum er ein fylgja av øktum lógarkrøvum ísv persónsdátuverju og kt-trygd.

Nettoútreiðslurnar á **§ 2 Almanna- og heilsumál** økjast íalt við 6,9% ella 19,5 mió.kr, herav 15,2 mió.kr er hækking í lønum.

*Barnavernd* økist 0,8 mió.kr ella 13,0%. *Børn sett heiman í fosturfamliju* hækkar 3,2 mió.kr ella 19,2% í mun til í fjør. Av hesum er hækking í lønum 1,9 mió.kr. *Brúkaragjøld, serstovnar* hækkar 1,2 mió.kr, ið er ein hækking á 30,8%. Útreiðslugongdin innan barnaverndarøkið hevur síðstu árini verið vaksandi, lutvíst av vaksandi tali av barnaverndarmálum og vaksandi tali av umsorganaryvirtøkum.

Eldraøkið stendur fyri størstu hækkingini innan almanna- og heilsumál. Serliga er talan um hækking í *konto 2721 Røktartænastur* 8,5 mió.kr svarandi til hækking á 5,7%. Herav eru t.d 800 tkr til heilstænastuna í Nólsoy og 4 mió.kr er uppraðfesting av røktarøkinum. *Konta 2722 Tilboð* hækkar við 2,8 mió.kr, ið er hækkking á 7,6%. 1 mió.kr er til lógarfesta endurvenjing og 1 mió.kr til virksemisfólk. *Lógarbundin ansingarsamsýning* økist 590 tkr ella 23,5%.

Nettoútreiðslurnar á **§ 3 Børn og ung** fylgja í høvuðsheitum barnatalinum og økjast 14,4 mió.kr ella 7,2%.

*Útreiðslurnar í teim fýra eindunum, B-A-R-N* økjast netto 8,6 mió.kr ella 5,8%. Barnatalið økist 18 í vøggustovunum, 28 í barnagørðunum og 46 í frítíðarskúlunum. Harumframt er ein ungdómsklubbur komin aftrat. Útrokningarlykilin er tann sami sum í fjør, tó er lønarstigin hjá leiðarum hækkaður til 29 samsvarandi miðaltalinum. Foreldragjaldið er óbroytt 27%.

*Útreiðslur til systkinaavsláttur* vaksa 2,1 mió.kr ella 16,9%.

*Kontan 3215 Aðrar útreiðslur* lækkar 2,9 mió.kr ella 22%. Lækkingin kemst serliga av, at játtanin til serstovur er tikin úr. Lagt er upp fyri nýggjum dagstovnaplássum svarandi til eina vøggustovu (12 børn) og eina barnagarðsstovu (20 børn), íalt 2,1 mió.kr. Nýggj konta 3218 Serstovur er skipað og økt við 2 mió.kr til 6 mió.kr svarandi til tørvin (barnatal á serstovu).

Nettoútreiðslurnar á **§ 4 Undirvísing** hækka 2,2 mo.kr ella 4,8%. Játtanin fylgir metta næmingatalinum. Størsti vøksturin er ísv nýggja Skúlan á Fløtum, 0,7 mió.kr ella 6,3%, hetta skyldast serliga økt tal av flokkum.

Nettoútreiðslurnar á **§ 5 Mentan og frítíð** lækka 1,7 mió.kr ella -2,7%. Størsta broytingin er lækking í *Stuðul til íløgur* upp á 4,3 mió.kr ella 84,3%, sum er vegna serstsaka játtan í 2020. Musikkskúlin hækkar 1 mió.kr ella 11,3%, sum kemst av øktum undirvísingartímatali eftir broyting í løgtingsfíggjarlógini.

Kontan Ítróttaranlegg økist 520 tkr ella 3,5% vegna nýggjar rakstrarútreiðslur ísv høllina á Fløtum og Tórsvøll.

Nettoútreiðslurnar á **§ 6 Teknisk mál** økjast við 1,6% ella 2,3 mió.kr. Av hesum eru t.d 0,6 mió.kr ella 5,6% øking til fríðkan og viðlíkhald.

Nettoútreiðslurnar á **§ 7 Kommunal virkir** økjast við 5,6% ella 2,6 mió.kr. Konta 7110 Renovatión veksur 1,6 mió.kr ella 7,1%.

-----

Í fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan við nevndu fortreytum og virksemisbroytingum verður úrslit áðrenn rentur 205,1 mió.kr.

Úrslit av rakstri og rentum, men áðrenn avdráttir og íløgur, verður 197,1 mió.kr.

Avlop til skattafíggjaðar íløgur verður 169,2 mió.kr.

Er avlopið til skattafíggjaðar íløgur lægri enn samlaðu íløgurnar, má munurin fíggjast við meiri inntøku og/ella, lægri útreiðslum og/ella lántøku.

Lániskuldin hjá kommununi var síðst í august mánaða 227 mió.kr íalt. Av hesum eru 217 mió.kr knýttar at Tórshavnar havn.

Í samband við byggingina av endurvenjingardepilinum URD var í fíggjarætlanini 2020 tikið hædd fyri eini lántøku á 57 mió.kr. Lánið er ikki tikið enn.

Tórshavnar havn hevur í løtuni eina samlaða lániheimild upp á 64 mió.kr, sum kann takast, um tørvur er á tí.

Býráðið ásetir kommunuskattaprosentið og barnafrádráttin og kann umvegis hesi bæði broyta fortreytirnar fyri fíggjarætlanina.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávísøkir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið innan 1. oktober.

**Fíggjarnevndin 28. september 2021:** Framlagt og beint í býraðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Framlagt.

## 238/21 Víðarimenning av Tórshavnar býarsavni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 05.04.2017 | 71/17 | 17/01122-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.05.2017 | 136/17 | 17/01122-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 202/17 | 17/01122-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 08.11.2017 | 298/17 | 17/01122-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 262/17 | 17/01122-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 11/18 | 17/01122-2 |
| 7 Mentamálanevndin | 06.02.2018 | 68/18 | 17/01122-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 21.02.2018 | 36/18 | 17/01122-2 |
| 9 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 94/18 | 17/01122-2 |
| 10 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 144/18 | 17/01122-2 |
| 11 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 98/18 | 17/01122-2 |
| 12 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 81/18 | 17/01122-2 |
| 13 Mentamálanevndin | 02.07.2018 | 239/18 | 17/01122-2 |
| 14 Fíggjarnevndin | 04.07.2018 | 218/18 | 17/01122-2 |
| 15 Mentamálanevndin | 08.10.2018 | 317/18 | 17/01122-2 |
| 16 Mentamálanevndin | 13.02.2019 | 52/19 | 17/01122-2 |
| 17 Mentamálanevndin | 13.05.2019 | 170/19 | 17/01122-2 |
| 18 Mentamálanevndin | 07.06.2019 | 196/19 | 17/01122-2 |
| 19 Mentamálanevndin | 11.09.2019 | 243/19 | 17/01122-2 |
| 20 Mentamálanevndin | 22.10.2019 | 279/19 | 17/01122-2 |
| 21 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 41/20 | 17/01122-2 |
| 22 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 85/20 | 17/01122-2 |
| 23 Mentamálanevndin | 10.02.2021 | 14/21 | 17/01122-2 |
| 24 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 238/21 | 17/01122-2 |

**Málslýsing:**

Í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu er orðað viðv. Tórshavnar býarsavni v.m.:

"Tórshavnar býarsavn skal koma í trygga legu, eins og fornminnisframsýningin hjá Søvnum Landsins eigur at koma nærri miðbýnum. Hetta hevði gjørt savnið munandi meira atkomuligt, bæði fyri føroyingar og útlendsk ferðafólk. Samgongan fer at arbeiða fyri, at Müllers Pakkhús verður sjóvinnusavn, sum lýsir sterka søguliga tilknýtið millum Havnina og havið."

Býarsavnið virkar sbrt. viðtøkum seinast broyttar av Tórshavnar býráð 11. september 2008 og góðkendar av landsstýriskvinnuni í mentamálum 10. november 2008. Reglugerðin er hjáløgd.

Endamálið er m.a.:

a) at skráseta, kanna og hava eftirlit við jarðføstum fornminnum, sum lýst er í løgtingslóg um friðing av føstum fornminnum og bygningum.

b) at fyrireika og standa fyri útgrevstri av toftum, fornum búplássum og søguligum lendum. Føroya Fornminnissavn skal góðkenna útgrevstrarætlanina og geva útgrevstrarloyvi.

c) at savna, skráseta og framsýna fornlutir og lutir frá nýggjari tíð, sum lýsa livihátt, starvslíkindi og mentan føroyinga til ymsar tíðir ella eru knýttir til søguligar hendingar.

d) at hava í hondum savnan at staðarnøvnum og munnliga goymdum søgnminnum og hava hetta tilfar greitt til vitskapliga gransking.

e) at savna saman mest møguligt tilfar av øllum, ið viðvíkur Tórshavn, so allir tættir av Havnar søgu kunnu verða skrivaðir, og um neyðugt at skipa fyri, at hon verður skrivað.

f) Savnið kann útvega sær fígging til verkætlanir uttaneftir. Landskassin hevur tó ikki endurgjaldsskyldu fyri útreiðslur savnsins, ið verða fíggjaðar á henda hátt.

Tórshavnar býarsavn er skipað sum kommunalur stovnur undir mentamáladeildini, og savnvørðurin (starvið ósett p.t.) vísir fyrisitingarliga til leiðaran á mentamáladeildini.
Játtanin til býarsavnið er á kontu 5510 Tórshavnar Býarsavn og er í 2017 1.166 tkr. Í nøkur ár er kontan í stóran mun nýtt til at skriva Havnar søgu. Tann verkætlanin verður ætlandi liðug í heyst, tá 6. bind verður liðugt og útgivið.

Í løtuni er fíggjarætlanin hjá sjálvum Býarsavninum (uttan arbeiðið við Havnar søgu) umleið 90 tkr. Goymslan er í leigaðum hølum í Slættanesgøtu, harumframt eru útreiðslur til el, gjøld fyri alarmar og telefonlinju til alarmar. Ein lítil upphædd verður sett av til keyp av lutum. Søvn Landsins endurrinda savninum sambært bygdasavnslógini 60% av góðkendum rakstrarútreiðslum. Endurgjaldið hevur seinastu árini verið umleið 55 tkr. og verður flutt kommununi, tá roknskapur er sendur inn.

Virksemið hjá Tórshavnar Býarsavni hevur verið avmarkað síðan 2009. Einki savnsstarvsfólk er beinleiðis knýtt at savninum, fyri uttan teir báðar søgufrøðingarnar, ið skriva Havnar Søgu. Mentamáladeildin umsitur savnið/goymsluna og avgreiðir tað, sum er neyðugt viðvíkjandi savninum mótvegis Søvnum Landsins og annars áhugaðum borgarum. Fólk venda sær av og á til deildina um lutir, tey vilja lata ella selja savninum. Eisini eru fyrispurningar um at síggja eitthvørt á goymsluni.

Onnur søvn í kommununi
Bygdasøvn eru í Kollafirði og í Nólsoy. Bæði eru skipað sum sjálvsognarstovnar. Kollafjarðar Bygdarsavn fær árligan stuðul frá kommununi eftir umsókn.

Praktikklesandi
Sum liður í fyrireikingunum av størri virksemi innan savnsøkið er avtala gjørt við Fróðskaparsetrið um, at lesandi á masterstigi innan søgu kemur í 3 mánaða praktikk frá september - november 2017 og kemur at gera greiningar viðv. innihaldi og skipan av einum nýmótans býarsavni.

Savnið hjá Birgari Johannessen
Víst verður til málið um stuðul til býarsavnið hjá honum. Hann ynskir, at Tórshavnar Kommuna yvirtekur savnið hjá honum í heyst uttan viðurlag. Avtalað er, at farið verður undir at skráseta lutirnar í savninum í summar. Ætlandi verður farið undir arbeiðið, so skjótt tað er greitt viðv. skrásetingarskipan.

Skráseting
Arbeitt verður við at gerast partur av skrásetingarskipan hjá Søvnum landsins.

Høli
Býarsavnið hevur í verandi støðu ongi framsýningarhøli. Hølistørvurin er knýttur at hvat fyri vavi virksemi skal hava. Nærri greiningar verða gjørdar av hesum samsvarandi tilgongdini sum lýst omanfyri.

Rakstrarískoyti frá Tjóðsavninum
Sbrt. galdandi savnslóg t.e. § 4, stk. 2 í bygdasavnslógini rindar landið fyri 60% av góðkendum rakstrarútreiðslur til slík søvn.

Tjóðsavnið nærri býnum
Savnið hevur sum heild verið í eini rembingartíð. Ætlanin er at fara í dialog við Tjóðsavnið fyri at avklára viðv. teirra framtíðarætlanum og í hvønn mun tað kunnu vera samvirknaðir millum ætlaða virksemi hjá Tórshavnar býarsavni og Tjóðsavninum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a). At taka støðu til yvirtøku av savnslutunum í savninum hjá Birgari Johannessen.

b). At umrøða hinar staklutirnar í málinum við atliti til, at umsitingin ger nærri tilmæli um ítøkiligu viðurskiftini til ein komandi fund.

**Mentamálanevndin 05. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við punkt a) og punkt b) umrøtt.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Ískoyti:**
Umsitingin er byrjað upp á innleiðandi samskifti við Tjóðsavnið um hetta mál. Herundir er spurningurin umrøddur um stuðul frá landinum til virksemi sbrt. § 4, stk. 1 og 2 í lógini um bygdasøvn. (Ll. Nr. 17 frá 9. mai 1972 um bygdasøvn við mentanarsøguligum týdningi, við seinni broyting).

Har er ásett:
*§ 4. Landið letur góðkendum bygdasavni í studningi 60% av rakstrarútreiðslunum.*
*2. stk. Upp í hesar verður roknað: Samsýning til starvsfólk, keyp av gripum, røkt av fornminnum, hiti, ljós, reingerð, innbúgv, leiga av høli o.t. ella renta og avskriving av bygningum, savnið hevur, tá tikið verður við, at landið letur 50% í studningi til keyp ella bygging av savnshúsum og til keyp av jarðføstum fornminnum og bygningum, ið kunnu góðtakast sum fornminni.*
---
Játtanin til Tórshavnar býarsavn hevur farnu árini ligið millum uml. 650 – 1400 tkr. Nettojáttanin í 2017 er 1166 tkr. Sum lýst í málinum og samtykt av nevndini er ætlanin komandi ár og árini framyvir at menna virksemið í Tórshavnar býarsavni.

Nærri frágreiðing og tilmæli kemur ætlandi til fundin í september. Við atliti til at landið kann uppfylla sína lógarásettu skyldu um at rinda 60% av rakstrarútreiðslunum, er neyðugt, at Tórshavnar kommuna longu nú søkir um stuðul til fíggjarárið 2018, tí annars verður tað ov seint í mun til fíggjarætlanartilgongdina hjá landsstýrinum.

Í hesum sambandi hevði verið hóskandi at ásett, hvørja upphædd kommunan hevur í hyggju at játta til endamálið í 2018. Eitt boð er uml. 800-1000 tkr. í nettojáttan.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at áseta, hvørja upphædd ætlanin er at játta til Tórshavnar býarsavn í 2018, og at hetta verður grundarlagið fyri umsókn til landið.

**Mentamálanevndin 11. mai 2017:** Samtykt at ætlaða upphæddin verður kr. 800.000.

**Ískoyti:**

**Ískoyti:**
Seinastu mánaðirnar hevur mentamáladeildin arbeitt við víðari menning av Tórshavnar Býarsavni. Meginparturin av lutunum á savninum hjá Birgari Johannessen er skrásettur, og Tórshavnar kommuna fer at yvirtaka savnið í seinasta lagi um ársskiftið. Starvsfólk á deildini hava verið uttanlands og kunnað seg um ymisk søvn í Danmark, Finnlandi, Noregi og Íslandi og fingið frágreiðingar og tilfar sum íblástur til arbeiðið, og ein starvslesandi er byrjað, sum næstu tríggjar mánaðirnar m.a. fer at arbeiða við hesum máli.
Umráðandi er at fáa gongd á savnsvirksemið sum skjótast. Tað kann gerast við í fyrsta umfari at hava eina ella fleiri framsýningar, sum eru avmarkaðar í vavi, t.d. við at velja eitt stutt tíðarskeið ella ávíst avmarkað evni at viðgera, sum er ein væl kendur leistur innan savnsvirksemi í Norðurlondum. Soleiðis sær borgarin í kommununi, at virksemi er á savninum.

Í sambandi við stovnsetan av savnsvirkseminum er hóskandi at viðgera fylgjandi spurningar:

<u>Staðseting av savninum – fyribils hølir og varandi loysnir</u>:
Í løtuni hevur Tórshavnar Býarsavn einki framsýningarhøli, og hildið verður, at savnið sum skjótast eigur at seta eina framsýning upp við lutum, savnið eigur. Til endamálið er ikki neyðugt við so ógvuliga stórum høli, eitt dømi kundi verið í parti av hølum hjá Býarbókasavninum. Møguleiki er eisini at hava sonevndar pop-up framsýningar í Müllers Pakkhúsi, og grannahúsini Skeiva Pakkhús eru eisini ein møguleiki, har kommunan møguliga kundi leigað eina hædd til sjóvinnusavn.

Á Frúutrøð verða á vári 2019 møguleikar fyri varandi søvnum, t.d. í bygninginum, har Tórshavnar Musikkskúli heldur til, og læknamiðstøðin á Frúutrøð kundi eisini verið tikin við, tá/um læknaviðtalan flytir í onnur hølir. Skúlabygningurin í Fr. Petersens gøtu, sum í løtuni hýsir næmingum í Skúlanum á Fløtum, verður tøkur, tá nýggi Skúlin á fløtum er liðugur í 2020. Bygningurin verður mettur at vera væl egnaður til framsýningar, tó serliga til eitt samansett framtíðar lista- og býarsavn, har kommunan kundi havt skiftandi framsýningar.

<u>Slag av framsýningum</u>:
Tað er ymiskt, hvussu býarsøvn skipa sínar framsýningar. Umframt at sýna lutir fram og hava frágreiðingar á skeltum eru óteljandi møguleikar við tí tøkni, sum er til taks og sum flestu søvn nýta so ella so. Flestu søvn hava eina blanding av øllum, so sum myndir, lutir, eftirgjørd modell, kort og tekningar við frágreiðingum, sum kunnu spælast av sum eitt nú ljóðupptøkur ella upplestur, og harumframt skíggjar við myndum, filmum, ljóðupptøkum osfr. Tað merkir, at tað ikki altíð eru so nógvir lutir á eini framsýning, og sostatt krevur hon ikki altíð nógv pláss.

<u>Egnar framsýningar</u>:
Tórshavnar býarsavn hevur eina goymslu, umleið 100 $m^2$, í leigaðum hølum, har savnið hevur nakrar lutir frá sjóvinnu og fiskiskapi, sum eru lutfalsliga gamlir. Tá handilin hjá Katrinu Christiansen gavst, keypti kommunan ein part av vørugoymsluni, har ein partur var gamalt tilfar. Nakrir lutir eru á goymsluni, sum einstaklingar hava latið savninum. Afturat hesum kemur savnið hjá Birgari Johannessen, sum serliga fevnir um tíðina frá 1950'unum og frameftir. Býarsavnið eigur eisini myndir og nøkur skjøl.
Við hesum ber til at seta framsýningar upp. Talan kann bæði verða um fastar sýningar og skiftandi sýningar eftir evni/tema og í sambandi við hendingar og aðrar umstøður. Sonevndu pop-up sýningar eru eisini ein møguleiki.

<u>Nøkur hugskot til evnisframsýningar</u>: Havnarkvinnur, Konubrot, Kvinnumóti ella hattamóti, Kvinnumóti í 1960-árunum, Handilslívið í Havn, Endurskapan av Kondittarínum, Tónleikur, Rokksavn, Sjónleikamentan, Havnar Sjónleikarfelagið fyllir 100 ár í 2018, Vinnuvirksemi, Vinnuvirksemi á Vestaru bryggju í 1960 árunum, Tórsgøta sum vinnugøta í fyrru helvt av 20. øld. Grafiskt prent., t.d. sodavatnsetikettir, Skúlaskapur/skúlasøgan, Trúarlív, Rúsdrekkamentan, Havnin undir krígnum, At vera barn og ung í Havn, Bygdirnar í kommununi.

Eitt framtíðar sjóvinnusavn kann skipast sum ein føst framsýning saman við ávísum tíðaravmarkaðum framsýningum.
Við vaksandi ferðavinnu er ein ítøkiligur møguleiki fyri nógvum vitjandi, og hetta kann verða grundarlag fyri at taka framsýningar fram eftir tørvi ella at skipa tær við ymiskum evnum, ið knýta seg at okkara fiskivinnu- og sjóvinnusøgu.

Onnur søvn í kommununi:
Í Nólsoy er savnið Húsini við Brunn hjá Nólsoyar Fornminnisfelag, og arbeitt verður við einum savni um Ova Joensen, sála. Í Kollafirði er Kollafjarðar Bygdarsavn, sum Kollafjarðar Fornminnisfelag rekur. Ein hugsan er, at hesi í framtíðini verða samskipað undir Tórshavnar Býarsavni saman við møguligum øðrum søvnum í kommununi.

Aðrar verkætlanir:
Kommunan fær av og á hugskot frá fólki um verkætlanir á savns- og mentanarøkinum. Nevnast kann royndarverkætlanin “Hans Andriasar hús”, sum fer fram í húsunum undir Pisuvarða 2, har skaldið Hans Andrias Djurhuus og konan Petra búðu. Tvey fólk úr Havnar Sjónleikarfelag taka av og á ímóti skúlaflokkum, vísa teimum húsini og greiða frá.

Eitt uppskot er um verkætlan í kirkjugarðinum undir Svínaryggi, Hon snýr seg um at seta QR-kotur við gamlar gravir, so fólk fáa upplýsingar um tey, sum liggja har. Støða er ikki tikin til, um kommunan fer undir verkætlanina.

Onnur sýna fram:
Hugsanin er, at Tjóðsavn Føroya fær høvi at seta framsýningar upp í hølum hjá Býarsavninum, t.d. 2-3 um árið. Í løtuni verður arbeitt við einum máli í Økisnevndini um Kirkjubø, sum Tjóðsavnið er partur av. Tjóðsavnið letur tekst og layout, meðan Tórshavnar kommuna stuðlar við prenti og grafiskum arbeiði. Ein tílíkur samstarvsháttur kundi eisini verið hugsandi fyri onnur søvn í Føroyum.

Yvirskipað verður arbeitt fram ímóti, at Býarsavnið skal fáa ein meir samskipandi leiklut í sambandi við at miðla okkara mentanararv. Ætlanin er at samstarva við Byggi- og Býarskipanardeildina í verkætlanum um miðling av mentanararvi í býnum, eitt nú í sambandi við ítøkiligu verkætlanina at endurskapa fiskastykkið yviri við Strond.

Tiltøk: Ætlanin er at skipa fyri kvøldsetu í oktober, har vit ynskja at koma í samband við borgaran og eggja fólki til at lata savninum viðkomandi lutir til savnið.

Innsavning og móttøka av lutum:
Býarsavnið fer at hava støðuga innsavning av lutum frá eldri og nýggjari tíðum og samtíðini. Móttøkan skal stýrast og skipast væl í sambandi við skráseting og goymsluviðurskifti, og dentur verður lagdur á, at savnið ikki eigur ov nógvar lutir av sama slag ella slíkar, sum fleiri onnur søvn í landinum hava.

Starvsfólk: Ætlanin er, at tvey starvsfólk verða knýtt at savninum, t.e. ein samanseting av fólki í føstum starvi og freelansarum, ið kunnu røkja uppgávuna innan fyri ásetta fíggjarkarm.

Tíðarætlan: Miðað verður ímóti, at fyrsta framsýningin letur upp tíðliga í 2018.

Kostnaður: Støða skal takast til, um atgongugjald skal rindast fyri at vitja framsýningar hjá Býarsavninum. Mest sannlíkt er, at einki gjald verður tikið, tí talan er um mentanarmiðling, upplýsing og kunning. Tað er eitt sindur ymiskt við atgongugjaldi í øðrum norðurlendskum býarsøvnum, umleið helvt um helvt, hvør tekur gjald ella ikki. Hildið verður, at inntøkan frá atgongumerkjum er lítil í mun til starvsfólkaútreiðslur, umsiting o.t.

Heimasíða: Tórshavnar býarsavn eigur at hava sína egnu heimasíðu. Síðan skal kunna um søvn, framsýningarhøli og hølir knýtt at Býarsavninum, og serliga við atliti til skiftandi framsýningar og høli hjá Býarsavninum. Hugsað eigur at verða um, at savnið kann vera líka nógv virtuelt sum fysiskt. Á síðuni verður kunnað um mentanararv í kommununi, t.d. um ymisk hús, so sum Hans Andriasar hús, Degns hús, Sloans hús, Móttøkuhúsið osfr.
Ynskiligt er at talgilda Havnar søgu og gera hana tøka á netinum.

Á fundinum koma umboð fyri umsitingina at sýna dømi um framsýningar og søvn í Norðurlondum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja, at umsitingin fer undir stigvísa íverksetan av Tórshavnar Býarsavni.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við íverksetan av Tórshavnar Býarsavni mælir mentamáladeildin til, at fylgjandi evni verða viðgjørd:

Hølisviðurskifti: Frammanfyri eru nevnd ymisk høli, sum kunnu nýtast til framsýningar. Nýtt er, at gamli realskúlin, har Heilsuhúsið í løtuni heldur til, verður tøkur um ársskiftið. Mett verður, at bygningurin, sum í sjálvum sær er varðveitingarverdur og hevur góða staðseting í miðbýnum, kundi verið brúktur til savnsvirksemi heilt ella lutvíst. Á fundinum verður framlagt dømi um møguliga disponering av hølunum.

Fígging/starvsfólk: Fíggjarætlanin 2018 verður væntandi á 1,4 mill. kr., tá roknað við, at landið kemur við umleið 0,6 mió.kr. (hetta er tó óvist enn!). Ætlanin er, at í mesta lagi helvtin av játtanini verður nýtt til starvsfólk. Hugsanin er, at tað skulu vera tvey hálvtíðarstørv at býta millum ein søgufrøðing og eitt samskiftis- og/ella miðlafólk. Harumframt skal eitt fjórðingsstarv tilskilast umsjón og vegleiðing. Ein partur av arbeiðnum við framsýningum verður keyptur uttanífrá.

Endalig fíggjarætlan fyri Býarsavnið verður send Tjóðsavninum í seinasta lagi 1. desember. Hetta er í sambandi við stuðul frá landinum sambært lóg um bygdasøvn.

Framsýningar: Ætlanin er at skipa savnið við einari fastari framsýning, skiftandi framsýningum við ymiskum evnum umframt uppihaldsrúmi við kafe og sølubúð, sum tilskilað omanfyri.

Atgongd: Skotið verður upp ikki at taka atgongugjald fyri at vitja framsýningarnar, hetta er vanligt í fleiri norðurlondum.

Mánakvøldið 13. november 2017 skipar kommunan ætlandi fyri almennum temakvøldi í Auluni í Finsen um Tórshavnar Býarsavn, har øll hava møguleika at koma við hugskotum og uppskotum til virksemið hjá savninum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at viðgera omanfyri standandi.

**Mentamálanevndin 08. november 2017:** Samtykt at taka undir við at umsitingin arbeiðir víðari við omanfyri nevndu ætlanum og beina málið um realskúlan sum savn í fíggjarnevndina.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum máli.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti**.
13. november 2017 skipaði kommunan fyri evniskvøldið í Auluni í Finsen um Tórshavnar býarsavn. Umleið

120 fólk møttu og var bæði talan um framløgu og orðaskifti har borgarir fingu høvi at seta fram uppskot og viðmerkja. Í hjálagda skjalið sæst samandráttur av innkomnu uppskotunum. Í heyst var gjørd ein spurnakanning av spyr.fo um savnsvirksemi. Úrlitið verður framlagt umframt listi yvir serligu uppskotini frá teimum sum luttóku í kanningini.

Á fundinum verður somuleiðis greitt frá status í tilgongdini, herundir viðv. hølisviðurskiftum, yvirtøka av savninum hjá Birgari Johannessen, lýsing eftir starvsfólki, samskifti við mentamálaráðið/Tjóðsavnið um stuðul, heimasíðu v.m.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at viðgera uppskotini frá borgarunum um framtíðar virksemi hjá býarsavninum við atliti til at umsiting heldur fram við fyrireikingunum av býarsavninum.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Starvslýsing eftir leiðara
Sum liður í fyrireikingunum er nú gjørt uppskot til starvslýsing fyri komandi leiðara og savnsvørð á savninum. Sí uppskot til starvslýsing.

Umsitingin hevur til uppgávu at lýsa og fremja slík mál, men er ynski í hesum føri, at nevndin kann gera sær hugsanir um vavi og innihaldið í starvinum. Starvið verður ikki sett fyrrenn nærri er greitt viðv. fíggjarætlanini fyri 2018.

Fíggjarætlan 2018
Enn er ikki avkláring komin við Mentamálaráðið/Tjóðsavnið um teirra fígging sbrt. galdandi lóggávu. Fundur er á politiskum stigi seinni í feb. og kemur tá væntandi ein avkláring.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at staðsfesta lýsingina og at beina málið í fíggjarnevndina til góðkenningar.

**Mentamálanevndin 06. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini við teirri broyting, at talan er um starv, ið er normerað til ¾ tíð.

**Ískoyti**
Sambært avtalu við Birgar Johannessen um yvirtøku av savninum (sí mál 15/04166), er avhendingarskjal klárt at undirskriva, sí hjálagda skjal. Yvirtøkan fevnir um á leið 1000 lutir, ið allir eru skrásettir.

Sbrt. ætlan kemur Birgar Johannessen at reka savnið fram til og við mai 2018 tá savnið endaliga er latið Tórshavnar kommunu.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at inngangа hjáløgdu avtalu við Birgar Johannessen.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**

5. mars 2018 fekk kommunan hjálagda svar frá Tjóðsavninum viðv. stuðli sbrt. Bygdasavnslógini (17/04004-2). Í skrivinum brúkar Tjóðsavnið hugtak nevnt 'Góðkend fíggjarætlan' og fyriheldur seg ikki til at kommunan við støði í lógini hevði ætlað at havt eina samlaða fíggjarætlan á uml. 2.000 tkr. Harav TK rindar 40% og landið 60% sum ásett í lógini. Játtanin frá Tjóðsavninum er uml. 18% av tí sum lógir ásetur. Hetta er ein ónøktandi støða. Kommunan hevur í mars verið á fundi við Mentamálaráðið og gjørt vart við málið um stuðul til Tórshavnar býarsavn. Tá var ikki greitt hvat játtanin fór at vera.

Kommunan hevur biðið um eitt yvirlit yvir játtanina, ið einstøku søvnini fáa í mun til teirra bruttofíggjarætlan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at senda mótmæli til Mentamálaráðið um játtanina. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Í máli 18/02468, ið eisini verður til viðgerðar á fundinum, verður tilmælt til at tilmæla fíggjarnevndini til at inngingin verður leigusáttmáli um leigumál í Niels Finsensgøtu 38, 100 Tórshavn, har býarsavnið hjá Birgari Johannessen heldur til. Ætlandi verður savnið yvirtikið primo juli 2018. Ongin onnur hølisloysn tykist vera tøk í løtuni og er tí ætlanin at savnið kann halda fram har inntil mai 2019.

Higartil hava ymiskar loysnir verið frammi viðv. framtíðar høliskarmum til Tórshavnar býarsavn, herundir í Realskúlanum, ið nú verður dagstovnur í hvørtfall fram til summarið 2020, tá fleiri broytingar henda í økinum við Finsen og Kongagøtu. Harumframt eru ætlanir framhaldandi um at hava sonevndar evnisframsýningar ymisk støð eitt nú í Mullers pakkhúsi, í Auluni í Finsen o.a.

Í mai 2019 flytir Tórshavnar musikkskúli ætlandi út í nýggja stásuliga bygningin á Fløtum/við Landsvegin. Musikkskúlin húsast í løtuni m.a. í bygninginum Yviri við Strond 13, nevndur Skansastova. Talan er um bygning í 3 hæddum, har veghæddin er umleið 180 m2, miðhæddin umleið 141 m2 og lofthæddin umleið 136 m2 (netto m2 tøl). Umframt musikkskúlavirksemi so hevur dansifelagið Tøkum lætt dans í stóra hølinum á veghæddini eitt kvøld um vikuna, ein part av árinum. Av tí at hølini í Niels Finsensgøtu eru at meta sum fyribils verður mett hóskandi longu nú at fáa ávísa greiðu á hvar savnið kundi flutt í mai 2019. Eitt boð er Skansastova. Í sjálvum sær er staðsetingin at meta sum eina fyribils loysn inntil ein meiri varandi og betri loysn er tøk. Í eini langtíðar visjón er hugsandi at eitt býarsavn kundi verið staðsett í eini samansettari bygging t.d. á Skálatrøð saman við Tjóðleikahúsið og øðrum mentanarbygningum. Henda loysnin tekur helst nøkur ár at avklára og er tí hóskandi við eini loysn uppá hølisviðurskiftini uppá meðallangt sikt.

Um undirtøka er fyri málinum er ætlanin síðani í næstum at fáa greina fyritreytirnar fyri at kunna brúka bygningin til savnsendamál nøkur ár fram. Hetta verður gjørt saman við Húsaumsiting og møguligum ráðgeva, umframt at neyðug byggimálsviðgerð verður tikin upp við byggivaldið. Ætlandi verður vent aftur til nevndirnar seinni í ár. Roknast má við at ávísar ábøtur og tillagingar mugu gerast í bygninginum fyri at fáa hann brúkiligan til ætlaðu nýtsluna og verður í sofall uppskot til verkætlan gjørt.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á Húsaumsitingini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heita á fíggjarnevndina um, at Skansastova verður latin til Tórshavnar býarsavn frá á sumri 2019 og at umsitingin vendir aftur til nevndirnar við nærri greining av fyritreytunum seinni í ár.

**Mentamálanevndin 02. juli 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, við tí treyt, at Tøkum Lætt heldur fram í niðastu hædd í Skansastovu, sambært galdandi sáttmála.

**Fíggjarnevndin 04. juli 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

Ískoyti
24. apríl 2018 samtykti Tórshavnar býráð at senda eitt mótmæli til Mentamálaráðið viðv. tillutaðu játtanini fyri 2018, har týðandi munur var millum søkta stuðulin og játtaða stuðulin. Onki svar er komið uppá skrivið.

Landsstýrið hevur júst lagt fram fíggjarætlanaruppskot fyri 2019. Játtanin til stuðul til bygdasøvn er óbroytt og eru tí útlit fyri, at Tórshavnar býarsavn ei heldur hesuferð hevur útlit fyri at fáa tillutað eina játtan samsvarandi ætlanini í lógini. Eitt stig kundi tí verið at sent eina áheitan á mentanarnevnd- og fíggjarnevnd løgtingsins um málið og vóna at karmarnir vera stillaðir nakað.

Tilmæli
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at senda skriv til løgtingið um játtanarviðurskiftini á kontuni fyri stuðul til bygdasøvn við støði í skrivinum frá 24. apríl 2018.

**Mentamálanevndin 08. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Fíggjarstøða 2019
Við einari játtan á 889.000 kr. og umleið 200.000 kr. í stuðli frá landinum hevur býarsavnið eina fíggjarætlan á eina góða millión. Avlopið fyri 2018 var 626.000 kr., harav umleið 400.000 kr. eru bundnar til Havnarsøgu. Sum støðan er í løtuni hevur býarsavnið sostatt eina fíggjarætlan á 1,2 milliónir fyri 2019.

Virksemi í 2019
Virkisætlanin, ið varð góðkend á fundi í Mentamálanevndini 3. oktober 2018 (mál 18/03428 – Virkisætlan 2018/19 Tórshavnar býarsavn) var gjørd við støði í einari fíggjarætlan á 2 milliónir krónur.

Sambært virkisætlanini fyri 2019 skal býarsavnið skipa fyri 1 – 2 framsýningum/tiltøkum í ár, fáa goymsluviðurskiftini í trygga legu, gerast partur av nýggjari skrásetingarskipan og skráseta lutirnar hjá savninum. Eisini skal Býarsavnið hava eftirlit við jarðføstum fornminnum, og luttaka í verkætlanum um m.a. Stóragarð og Fiskastykki yviri við Strond.

Aftaná framsýningina í desember er vorðið greitt hvussu krevjandi pop-up framsýningar eru, bæði fíggjarliga og í mun til starvsfólkaorku. Eisini er vorði greitt at goymsluviðurskiftini og skráseting fara at krevja nógva orku í ár. Leigumálið í Niels Finsensgøtu gongur út í mai, goymslan í Hoyvíkshøllini skal tømast í seinasta lagið í mars og útleigari uppsigur væntandi leigumálið í Slættanesgøtu í summar.

Við einari fíggjarætlan á 1,2 milliónir mugu umfatandi tillagingar gerast í mun til upprunaligu virkisætlanina. Neyðugt verður at leggja nógva orku í at fáa goymsluviðurskiftini í trygga legu og eitt fólk má setast at hjálpa við hesum arbeiði – t.d. eitt ¾ verkætlanarstarv. Við at økja starvsfólkahópin - sum er fortreyt fyri

framburði og menning á savninum - er ikki fíggjarligt grundarlag fyri framsýningarvirksemi í 2019 við støði í verandi játtan.

Kommunan hevur eisini 6. februar 2019 sent rykkjara til virkandi landsstýrismannin í mentamálum um játtanina til býarsavnið. Víst verður til samtyktina í nevndini á várið 2018.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka kunningina til eftirtektar.

**Ískoyti**
Býarsavnið hevur tørv á bæði goymslu og framsýningarhøli. Leigumálið í Niels Finsensgøtu 38 (Savnið hjá Birgari) gongur út 31. mai 2018. Ein fortreyt fyri avhandanina av tí savninum var, at lutirnir vera settir í framsýning og ikki koyrdir allir á goymslu.

Býarsavnið hevur goymslu á áleið 200 fermetrar í Slættanesgøtu 5. Hesi høli eru ikki vælegnaði til endamálið m.a. orsakað av vánaligari atkomu og plásstroti.

Eisini liggur hópin av lutum úr Müllers Pakkhús á goymslu í kjallaranum í Hoyvíkshøllini. Hesir lutur skulu út sum skjótast, tí hølini skulu brúkast til ítróttarvirksemi. Hølini eru heldur ikki egnaði til goymslu. Býarsavnið hevur tí átrokandi tørv á bæði framsýningarhøli og goymslu og mugu loynsir finnast sum skjótast.

Arbeitt er við ymsum møguleikum bæði í kommunalum ognum og hjá vinnuligum útleigarum. Hædd skal takast fyri galdandi BK17 krøvum og krøv í sambandi við varðveitslu- og framsýningarvirksemi, herundir galdandi ICOM reglur fyri søvn. Slíkt arbeiði má roknast við at taka tíð og tí er viðkomandi at leita eftir eini fyribils loysn, har savnið kann hava framsýningar til endalig loysn fyriliggur.

**Møguligar loysnir til goymsluhøli**
A. Goymsla í kommunalum ognum
Møgulig goymsluhøli hjá kommununi eru viðgjørd, m.a. Bacalao. Eingin høli eru egnað til goymslu av fornlutum og mett verður, at tað fer at taka langa tíð til møgulig høli kunnu vera klár og helst innibera ein løgukostna á eini 2.000 tkr (við fyrivarni!). Umsitingin hevur eisini innleiðandi mett um viðurskiftini viðv. at hýsa býarsavnsvirksemi fyribils í Skansastovu, men verður mett ikki hóskandi umframt at annað virksemi skal flyta.

B. Privat leiga
Umsitingin hevur fingið eitt ítøkiligt tilboð um goymsluhøli á Smyrilsvegi 4, sum kunnu verða gjørd av nýggjum við øllum krøvum um bruna, wc og lítlari skrivstovu/arbeiðsrúmi, myrkalegging og møguleika fyri vørulyft. Niðasta hædd er 138 fermetrar og ovasta hædd er 204 fermetrar, tilsamans 342 fermetrar.

Hølini kunnu verða liðug til innflytan uml. 1. oktober 2019. Leigugjald 700 kr./kvm., sum gevur 239.400 kr/ár, sum er 19,950 kr/mðr. Allir prísir eru uttan mvg og uttan nýtslu. Nýtslan er mett til umleið 150 kr./m2 pr ár (ca. 51.300 um árið). Áramálið fyri leiguavtaluna er tá sett til 10 ár við møguleika at leingja leigumálið.

Talan er um sera snøgg goymsluhøli, ið lúka øll krøv um trygga varðveitslu av lutum. Eisini verða hølini arbeiðslig við lítlum arbeiðsrúmi til skrásting o.a. og starvsfólkavesi. Tað er eisini ein fyrimunur ,at hølini liggja væl í býnum. Vansin er at leiga skal rindast og at tí má fígging útvegast á játtanini til Tórshavnar býarsavn. Verandi leiga av goymslu í Slættanesgøtu 5 er 84.000 kr. um árið, umframt ravmagn og uppvigar tí ikki nýggju leiguavtaluni. Leiguavtalan í Slættanesgøtu verður uppsøgd.

Ein vansi er, at hølini ikki eru tøk fyrrenn í heyst, og tí skal fyribils loysn finnast inntil tá. Her verður m.a. kannað í løtuni viðv. eini loysn við goymslubingjum ella aðra loysn eitt stutt tíðarskeið.

**Møguligar loysnir til framsýningarhøli**

A. Føst framsýningarhøli í kommunalum ognum
Nú Musikkskúlin og Skúlin á Fløtum verða lidnir, eru ymsir skúlabygningar tøkir til annað endamál. Møguleikar fyri framsýningarhølum í teimum hølum eru kannaðir, serliga Skúlin í Kongagøtu og Musikkskúlin á Frúutrøð.

B. Privat leiga
I Gamla Skálabúðin
Møguleiki er at leiga tríggjar hæddir í Dr. Jakobsensgøtu 21, uml. 400 fermetrar tilsamans. Hølini skulu umvælast og kunnu vera klár 1. januar 2020. Útleigari hevur skotið tveir ymiskar leistir upp við styttri ella longri leigumáli og bygningklárger, ið ávirkar støðið á leigugjaldinum.

Hølini liggja væl fyri mitt í býnum. Ein rás gongur frá Skálatrøð, har ávísir møguleikar eru fyri parkering, men parkeringsviðurskifti í gøtuni sjálvari eru vánalig. Mett verður at savnið hevur tørv á uml. 600 fermetrum til framsýning, móttøku, wc, møguligum kaffikróki og skrivstovu. Í so máta er er hesin bygningur ov lítil, men hann kann kortini gerast karmur um vælvirkandi savnsvirksemi. Tvær tær ovastu hæddirnar kunnu brúkast til framsýning, meðan niðasta hædd kann brúkast til skrivstovu og lítla goymslu. Høvuðsvansin er at TK skal binda seg til lutfalsliga langt áramál ella leiga stytri áramál, men tá rinda fyri klárgerð, sum lættliga kann kostar mio. upphædd. Leigan er so mikið høg at tað skjótt kundi loyst seg betri at TK sjálvt bygdi hóskandi høli, men er tá høvuðsavbjóðingin at finna staðseting í miðbýnum sum er mest ynskiliga staðið til eitt nýmótans savn, ið vil røkka út til borgarar og ferðandi.

II Skeiva Pakkhús - privat leigumál, privat/kommunalt samstarv
Fyrispurningur er komin frá eigaranum um samstarv við kommununa um eitt livandi mentanarumhvørvi niðri á Skálatrøð. Talan er um tríggjar hæddir í Skeiva Pakkhúsi, ið kunnu nýtast til savnsvirksemi. Tvær hæddir til framsýning (uml. 180 fermetrar hvør) og ovastu hædd til skrivstovu og fundarhøli (uml. 100 fermetrar v/ skráveggi). Eigarin vísir til ætlanina um at brúka Müllers Pakkhús sum Sjóvinnusavn, og skjýtur í hesum sambandi upp at gera ein brúgv millum Müllers og Skeiva Pakkhús fyri at samantvinna virksemi í hesum báðum søguligu bygningum. Hølini verða sett í stand í samráð við leigara. Brúgvin millum pakkhúsini er rættuliga avgerandi, serliga við atlit at atkomumøguleikum. Tó ber eisini til at gera eitt torn við lyftu uttanfyri, har sum Knørraneystið stendur.

Hetta er ein framsíggin ætlan, ið stuðlar undir einum livandi søguligum umhvørvi á Skálatrøð: Sjóvinnusavn, Westward Ho, Býarsavn, Gamla Hospital og nýggjum mentanarbygningum á Skálatrøð.

Vansar eru at húsið er ein forngripur í sjálvum sær, og kann hetta verða ein avbjóðing í mun til at seta framsýningar upp. Húsið er sera skeivt og har er lágt millum loft og gólv. Gólv og veggur er klætt við viði, og virksemi í húsinum hevur sett sjónligt merki á alt innanveggja. Hetta hava eigararnir ikki hug at gera ov nógv við. Talan er undir øllum umstøðum um eina umfatandi verkætlan við nógvum óvissum.

III. Öström
Sum ein fyribils loysn er møguleiki hjá Býarsavninum at leiga í Öström. Talan er um tvey høli, sum í løtuni verða leigað út til veitslur. Størra høli er 245 fermetrar og minna høli er 180 fermetrar. Útleigari vil helst leiga bæði hølini út, men er ikki avvísandi fyri bert at leiga annað høli út. Prísurin er áleið 890 kr. fermeturin. t.v.s. umleið 220 tkr. um árið í kostnaði, umframt nýtslu, fyri størra hølið.

Fyrimunir eru serliga, at talan er um høli, ið eru klár at flyta inn í og sum verða tøk í august. Serliga størra hølið hevði riggað sum framsýningarhøli, meðan minna hølið hevði riggað til serframsýningar og tiltøk, um til bar at leiga hetta høli eftir tørvi. Atkoman er í lagi, og fólk í koyristóli sleppa inn. Trý vesi eru í gongini og alt er í góðum standi.

Høvuðsvansin er at inngongd er frá Sigmundargøtu, og hølini eru tí ikki sjónlig frá høvuðsvegnum á

Skálatrøð. Har er eingin skrivstova, og hóast tað møguliga ber til at innrætta eina lítla skrivstovu í trappurúminum er hetta ikki nøktandi sum umsiting hjá Býarsavninum.

**Samanseting við annað savnsvirksemi**
Áður hava verið ætlanir um eitt sjóvinnusavn í Mullers pakkhúsi, umframt at TK eisini hevur stórt listasavn. Í útvegan at framtíðar hølum til býarsavn kundi eisini verið viðkomandi at viðgjørt møguleikan fyri samansettur Býar- og listasavni. Hesi viðurskifti eiga at vera tikin við í viðgerðina av hesum máli.

**Fíggjarviðurskifti**
Við verandi fíggjarætlan hjá Býarsavninum ber í verandi støðu ikki at innganga hesi leigumál til goymslu og framsýningarhøli. Neyðugt er at endurskoða og økja fíggingina í hesum sambandi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at gera leiguavtalu um goymslu á Smyrilsvegi 4, og at arbeitt verður víðari við ætlan um at leiga høli í Østrøm til fyribils framsýningarhøli.

**Mentamálanevndin 13. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tórshavnar býarsavn og umsitingin hava samskift við útleigara um møguligt leigumál í Østrøm til fyribils framsýningarhøli. Nú fyriliggur eitt uppskot til leigusáttmála, sum fevnir um savnshøll á uml. 250 fermetrar, harav nakrir fermetrar fara til lítla skrivstovu. Harumframt eru umleið 78 ferm. Felagsøki (inngongd, vesi og køkur í erva og trappa til rýming).

Leiðarin á Býarsavninum metir at talan er um eina nøktandi fyribilsloysn til Býarsavnið fær egnan savnsbygning. Grótveggirnir í hølunum skapa tó ávísar avbjóðingar. Tí má roknast við, at tað verður neyðugt at keypa leysar veggir og innbúgv til lutirnar, sum skulu sýnast fram. Veggirnir kunnu eisini nýtast at avskildra stóra rúmið.

Verður hetta leigumálið realiserað, kann tað fáa virkna í januar 2020. Hetta er hóskandi hjá Býarsavninum, tí orka verður ikki til at seta nakra framsýning upp í heyst, nú stórar flytingar og skráseting av goymslum standa fyri framman. Vetrarhálvan er heldur ikki sesong fyri savnsvirksemi.

Til ber ikki at rúma leigugjaldinum fyri framsýningarhølini innanfyri verandi játtan. Skal størri orkukrevjandi framsýningarvirksemi setast á skrá er neyðugt at økja um játtanina.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til staðseting og fígging.

**Mentamálanevndin 07. juni 2019:** Umrøtt.

**Ískoyti**
Sí tilmæli í máli 19/01969 Tøkir skúlabygningar.

**Mentamálanevndin 11. september 2019:** Víst verður til samtyktina í málinum Tøkir skúlabygningar 19/01969.

**Ískoyti**:
Sbrt. grein 2 í viðtøkunum fyri Tórshavnar býarsavn (sí hjálagt sum skjal x) er mentamálanevndin savnsnevnd fyri Tórshavnar býarsavn.

Leiðarin á Tórshavnar býarsavni verður við á fundinum at umrøða fylgjandi evni saman:

1). Hølisviðurskifti: Stutt kunning um nýggju goymsluna og umrøða av savnsbygningi/framsýningarhøli
2). Tórshavnar býarsavn – uppskot til virksemi og framsýning(ar): Stutt framløga og umrøða
3). Leikluturin hjá Býarsavninum í 75 ára minningarhaldinum í sambandi við endan av hersetingini av Føroyum: Umrøða
4). Savnsnevndin: Leikluturin hjá Savnsnevnini og skipan av nevndararbeiðinum

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið.

**Mentamálanevndin 22. oktober 2019:** Savnsleiðarin legði fram.

**Ískoyti:**
Tórshavnar býarsavn hevur gjørt eina virkisætlan fyri 2020 og herundir útgreinaða fíggjarætlan tengd at tí sama. Á fundinum kemur savnsleiðarin at greiða frá ætlanunum hjá savninum í 2020 og framyvir.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 05. februar 2020:** Útsett.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**:
Umsitingin hevur eftirmett virkisætlanina fyri 2020 saman við Tórshavnar býarsavni. Sum heild hevur tað eydnast væl hjá savninum við virkseminum í 2020, herundir serliga við serframsýningini um Havnin undir krígnum, umframt at fáa skapt grundarlagið fyri framhaldandi menning av savninum og eini komandi fastari framsýning.

Sí hjálagt ársfrágreiðing hjá savninum.

Býarsavnið hevur gjørt eina virksemisætlan fyri 2021. Sí hjálagt skjal.

Á fundinum verður greitt nærri frá innihaldinum.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja virksemisætlanina fyri 2021.

**Mentamálanevndin 10. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Gunvør Balle biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

Tórshavnar Býarsavn má byggjast um fyri at liva upp til bruna - og onnur myndugleikakrøv og fyri at gera umstøðurnar hóskandi sum savnshølir. Í fjør vórðu 1,5mió kr settar av til arbeiðið. Neyðugt verður helst at seta 0,5-1,0 mió aftrat av á fíggjarlógini fyri 2022 fyri at gera arbeiðið liðugt.

**Tilmæli:**
Gunvør Balle, Elsa Berg, Jákup Dam og Ruth Vang mæla til at fara undir at umvæla og broyta hølini hjá

Tòrshavnar Býarsavni á Frúutrøð alt fyri eitt smbrt fyriliggjandi tekningum og brúka tær 1,5 mió kr, ið eru tøkar til verkætlanina. Harumframt verður mælt til at seta 1,0 mió av á fíggjarlógini fyri 2022 til at gera arbeiðið liðugt og fáa Býarsavninum góð savnshøli.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Málið umrøtt.

# 239/21 Møgulig standmynd/minnismerki um Andreu Árting

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 365/18 | 18/04076-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.09.2019 | 247/19 | 18/04076-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 238/19 | 18/04076-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 203/19 | 18/04076-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 244/19 | 18/04076-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 58/20 | 18/04076-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 02.04.2020 | 95/20 | 18/04076-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.04.2020 | 74/20 | 18/04076-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 27.04.2020 | 125/20 | 18/04076-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 123/20 | 18/04076-1 |
| 11 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 96/20 | 18/04076-1 |
| 12 Býráðsfundur | 11.06.2020 | 119/20 | 18/04076-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 10.02.2021 | 27/21 | 18/04076-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.02.2021 | 31/21 | 18/04076-1 |
| 15 Mentamálanevndin | 12.05.2021 | 116/21 | 18/04076-1 |
| 16 Mentamálanevndin | | | 18/04076-1 |
| 17 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 239/21 | 18/04076-1 |

**Upprunin til málið:**
Gunvør Balle, forkvinna í mentamálanevndini.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ynski er at heiðra minni um Andreu Árting og hennara virki innan fakfelagsrørsluna, kappróður v.m. við at gera eina standmynd ella minnismerki/-varða.

Andrea Árting var komin væl upp í árini, tá hon í ringastu tíðunum í 30´unum púra óvæntað gjørdist forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag. Kreppan hevði við sær, at fakfeløgini vóru undir trýsti. Hetta nervaði tó ikki Andreu. Hon var órørd, og hon segði altíð tingini beint fram sama, hvar ið hon var. Við sínum eyðsýnda sosiala tilviti gjørdist hon ein ímynd fyri fakfelagsstríði í Føroyum í 20. øld. Alt sítt vaksna lív setti hon rættindini hjá kvinnum í brennidepilin. Hóast hon ongantíð sat á tingi, so virkaði hon í roynd og veru sum ein sosialpolitikkari. Lønin hjá arbeiðskvinnunum var størsta partin av 20. øld væl lægri enn hjá monnunum. Hetta setti Andrea sær fyri at broyta. Í 1977 rakk hon loksins úrslitinum, at kvinnur og menn skuldu fáa líka løn fyri sama arbeiði. Tá hon seinni sama árið legði frá sær sum forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag, var hon 85 ára gomul. Soleiðis verður sagt um Andreu Árting í sambandi við filmin, sum er gjørdur um hana og vístur í KVF í 2017.

Røddir hava av og á verið frammi um at gera eina standmynd av kendu havnarkonuni Andreu Árting.

Tórshavnar kommuna kundi tikið stig til samstarv við Havnar Arbeiðskvinnufelag og aðrar áhugapartar um at seta eina standmynd upp av Andreu Árting í býnum.

Ein staðseting kundi t.d. verði uttanfyri Steinatún, sum liggur mitt í býnum, har nógv fólk ferðast aftur og fram. Tað hevði klætt Tórshavnar kommunu væl at reist eina standmynd av hesi serstøku kvinnu, sum stríddist so íðuliga fyri rættindunum hjá kvinnum.

Møgulig staðseting av standmynd ella minnismerki/-varða er málsøkið hjá Býarskipanarnevndini og verður tikið upp í nevndini, um verkætlanin gerst aktuell.

Tá greitt er, hvørjir partar hava áhuga at vera við í verkætlanini, verður fíggjarætlan gjørd og leistur fyri, hvussu verkætlanin verður útint.

Eisini kann nevnast, at bók um søguna hjá Havnar Arbeiðskvinnufelag eftir ætlan kemur út í 2019.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, um arbeiðast skal víðari við málinum og at fáa samstarv í lag við Havnar Arbeiðskvinnufelag og onnur um møguliga verkætlan.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í dialogi við nøkur fakfeløg um at vera við í hesi verkætlan, og ábendingar eru um, at tað helst ber til. Eisini hevur TK søkt Betri Stuðul um stuðul, men fekk noktandi svar. Fyri at skapa betri grundarlag fyri at koma á mál við verkætlanini verður mett hóskandi, at TK nú tekur stig til at útvega hóskandi eginfígging til verkætlanina, sum so kann vera grundarlag undir endaligu tilgongdini at fáa onnur at koma við í samlaðu fíggingina.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at:
1. Flyta 100 tkr. av konto 4140 Ætlanir á skúlaøkinum til nýggja projektkontu: Minnismerki Andrea Árting
2. Flyta 100 tkr. av projektkontu L57029 (sak: Gøtuítrótt) til nýggja projektkontu: Minnismerki Andrea Árting

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at heita á fíggjarnevndina at flyta 100 tkr. av kontu 5310 Mentanartiltøk o.a. til nýggja projektkontu: Minnismerki Andrea Árting.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av konto 4140, kr. 100.000 av L57029 og kr. 100.000 av konto 5310 á konto 5311 og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Til tess at gera verkætlanina ítøkiliga, verður mett neyðugt at fáa nærri viðgerð av møguligum staðsetingum og krøvum til sjálvt listaverkið Andreu Árting til heiðurs, hetta eisini sum liður at útvega samlaðu fíggingina. Á løgukontu 6275 Fríðkan av býnum, L62038 eru kr. 300.000 tøkar. Aftrat eru nakrar tilsagnir um fíggjarligan stuðul frá uttanhýsis pørtum komnar til verkætlanina.

Tørvur er á at fáa neyvari staðfest, hvørji krøv skulu setast til staðseting og listaverk. Tørvur er harumframt á uppskoti um tilgongd at útvega sjálvt verkið. Liður í hesum er eisini at meta um hóskandi vavi av samlaðu verkætlanini, harundir kostnað.

Tað eigur at verða heitt á Listaráðið um skjótast til ber at geva tilmæli til nevndarviðgerð hesum viðvíkjandi, so at tilgongd at útvega listaverk og aðrar fyrireikingar í sambandi við staðsetingina annars kunnu byrja.

Um tilgongdin at útvega listaverk v.m. krevur fígging, verður hetta at leggja aftur fyri nevnd at taka støðu til.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heita á Listaráðið um uppskot til staðseting av listaverkinum og krøv annars bæði til staðseting og listaverk. Mælt verður eisini til at heita á Listaráðið um uppskot til tilgongd at útvega listaverkið.

**Mentamálanevndin 05. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti**:
Tórshavnar listaráð hevur viðgjørt málið um staðseting av listaverkinum, umframt krøv til listaverkið og útveganartilgongd og hevur fylgjandi tilmæli.
---
*Viðv. staðseting*
*Listaráðið mælir til at verkið verður staðsett í Steintúni, treytað av at tað kann fáa hóskandi rúmd og pláss og ikki avmarkað til sjálvt torgið. Listafólkið skal kann arbeiða við staðseting í økinum.*

*Viðv. krøvum til listaverkið*
*Listaráðið mælir til at taka støði í nøkrum fáum krøvum, herundir boðskapinum um AÁ (kvinnujavnrættindi, sosialt rættvísti, áræði, áhaldni og sterk kvinnufyrimynd) og at verkið skal kennast fólksligt (ikki elitert), forvitnisligt og sjónligt í býarmyndini.*

*Viðv. útvegnar-/útboðstilgongd*
*Listaráðið mælir til at fara undir eina tilgongd har útvald yrkislistafólk fáa møguleika at luttaka í eini tilgongd, ið helst er í stigum. Einum undanumfari og so evt. eini millumstigi (tá móti ávísum gjaldi) og so endaligari tilgerð.*
---

Víðari tilgongd
Um samtykt verður at halda fram við verkætlanini fer Listabólkurin í kommununi, ið hevur ábyrgd av praktisku útveganini sbrt. galdandi reglugerð, undir útboðstilgongd at útvega listaverk. Hugsanin er at talan verður um innbodna tilgongd við einum undanumfari, og um valt verður at fara víðari til eitt annað umfar við fleiri luttakarum, at hesir tá fáa eina ávísa samsýning fyri kappingarluttøkuna.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Býarskipanardeildini og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka støðu til um farast skal víðari við útboðstilgongdini við støði í tilmælinum frá Tórshavnar listaráði. Málið verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanarnevndini mæla til at taka undir við tilmælinum og at játta 100.000,- kr. av kt. 6275, fríðkan av býnum, L00001 løgukarmur fyri árið, til L62038 standmynd/minnismerki um Andreu Árting og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í framflytingunum frá fíggjarárinum 2019, ið kemur til viðgerðar í fíggjarnevndini og býráðnum í næstum, verða ætlandi framflytingar frá m.a. kontu 5210 Tórshavnar kvøldskúli, á umleið 950 tkr.

Mett verður at partur av hesum kann vera flutt til at betra um fíggjarliga grundarlagið fyri verkætlanini. Henda upphæddin er helst ikki nokk, men vil nú vera nøktandi grundarlag fyri at fara víðari við verkætlanini og byrja útveganartilgongdina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at flyta 250 tkr. av kontu 5210 Tórshavnar kvøldskúli til projektkontu L62038 – standmynd/minnismerki - Andrea Árting.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 11. juni 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Listabólkurin hevur verið í tilgongd saman við Edvardi Fuglø, listamanni um skitsuuppskot til standmynd, og hevur eisini fingið gjørt uppskot, ið sýnir staðseting av standmyndini í sunnara parti av torginum í Steinatúni.

Á fundinum verður greitt nærri frá uppskotinum til standmynd og ætlaðu staðsetingini.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar. Málið verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina til kunningar.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur arbeitt við at finna eina endaliga staðseting av standmyndini í Steinatúni.

Mett verður, at standmyndin hevði tikið seg væl út í plantukummuni móti vestur, har hon í størstan mun verður staðsett, soleiðis at hon fær rúm og ikki verður kroyst upp ímóti natúrligu trøunum.

Sí viðheftu tekningar av ítøkiligu staðsetingini, j.nr. 18/04076-45, Staðseting_Standmynd av Andreu Árting.

Sigast skal, at hendan staðsetingin skal fínpussast, soleiðis at standmyndin fær nøktandi rúmd, og soleiðis at hon ikki verður fløkt inn í verandi planting og eitt nú lyktapelarnar í plantukummuni. Møguliga verður neyðugt at flyta onkra planting, og tað verður í framhaldandi tilgongdini neyðugt at taka støðu til hvussu standmyndin verður sett í plantukummuna, um gróður skal verða kring standmyndina ella um økið møguliga skal flísaáleggjast ella at eitthvørt annað skal gerast kring standmyndina. Øll hesi viðurskiftini eiga at verða tikin upp í komandi tilgongdini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at standmyndin av Andreu Árting verður staðsett í Steinatúni í vestastu plantukummuni, og at málið verður beint í mentamálanevndina til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 10. februar 2021:** Samtyktin hjá byggi- og býarskipanarnevndini tikin til eftirtektar.

Birgir Nielsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Listabólkurin og Býarskipanardeildin hevur verið í samskifti við listamannin Edvard Fuglø um verkið og eru komin ásamt um nakrar tillagingar so verkið stendur seg enn betri í mun til umhvørvið í Steintúni.

Eisini er nú nærri greitt viðv. mettum kostnaði, og kemur umsitingin á greiða frá tí á fundinum. Neyðugt verður við eyka fígging afturat um verkætlanin skal fremjast.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið.

**Mentamálanevndin 12. mai 2021:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Gunvør Balle biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

Leingi hevur verið arbeitt við at reisa eina standmynd av Andreu Árting, uml 1 mió kr er fingin til vega og byggi- og býarskipanarnevndin hevur samtykt at standmyndin skal staðsetast í Steinatúni. Listafólkið er funnið og listaverkið er teknað og klárt er at fara til verka.

**Tilmæli:**
Gunvør Balle, Elsa Berg, Jákup Dam og Ruth Vang mæla til at fara undir arbeiðið at reisa standmyndina av Andreu Árting í Steinatúni og brúka tað uml. 1 mió kr ið hoyra til verkætlanina. Mælt verður samstundis til at seta 1 mió kr av á fíggjarætlanina fyri 2022 soleiðis at listaverkið er liðugt fíggjað.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Málið umrøtt.

# 240/21 Frágreiðing um normering á dagstovnaøkinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 16.11.2020 | 299/20 | 20/03974-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.11.2020 | 301/20 | 20/03974-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 274/20 | 20/03974-1 |
| 4 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 240/21 | 20/03974-1 |

**Upprunin til málið:**
Endurskoðan av útrokningarlyklinum á dagstovnaøkinum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við bygnaðarbroytingina til eindarleiðslu á dagstovnaøkinum var partur av arbeiðssetninginum at endurskoða útrokningarlykilin, harundir normeringarnar á dagstovnaøkinum.

Í løtuni uppliva vit eitt dagstovnaøki, sum er undir trýsti. Stovnarnir hava brúk fyri fleiri hondum, fleiri fakfólkum, betri skipanum, nýggjum mannagongdum, betri umstøðum, fyrireikingartíð v.m.

Sama støða hevur eisini verið í Danmark, har kjakast hevur verið um minimumsnormeringar síðstu 20 árini stuðlað undir av nógvari gransking, sum hevur víst, hvussu umráðandi tað er at hava góða normering og dygdargóð fakfólk á dagstovnaøkinum bæði fyri menningina og trivnaðin hjá børnunum og starvsfólkunum.

Í fjør samtykti danska fólkatingið at skipa minimumsnormeringar á øllum dagstovnum stigvíst fram til 2025, harundir eisini at útbúgva fleiri námsfrøðingar til økta talið av starvfólkum. Serstøk játtan varð eisini latin kommununum í hesum sambandi.

Í Føroyum hevur eisini verið kjak um minimumsnormeringar síðstu árini. Føroya Pedagogfelag hevur latið gera uppskot um minimumsnormeringar, og løgtingið hevur eisini nýliga havt viðgerð av slíkum uppskoti, sum tó ikki er samtykt. Uppskotið hjá Føroya Pedagogfelag er í stórum tað sama sum tær donsku normeringarnar.

Normeringin hjá Tórshavnar kommunu í vøggustovu og barnagarðsstovu kann samanberast við tær hjá donskum kommunum áðrenn minimumsnormeringina. Sorø kommuna við uml. 29.000 borgarum hevði í 2018 eina normering uppá 1 starvsfólk til hvørji 3,9 børn í vøggustovu og 1 starvsfólk til hvørji 7 børn í barnagarðsstovu. Í donskum kjaki verður tikið til, at normeringarnar í 2018 vóru søguliga lágar.

Sum tað sæst í talvuni niðanfyri er normeringin í Tórshavnar kommunu í 2020 heldur frægari enn tann í Sorø kommunu í 2018. Hinvegin er samtykta minimumsnormeringin betri enn normeringin í Tórshavnar kommunu í dag.

| | **Tórshavnar kommuna 2020** | **Danmark í 2025/FP** |
|---|---|---|
| Vøggustovur | 1 starvsfólk til 3,5 børn | 1 starvsfólk til 3 børn |
| Barnagarðsstovur | 1 starvsfólk til 6,6 børn | 1 starvsfólk til 6 børn |
| Frítíðarskúli | 1 starvsfólk til 14,5 børn | 1 starvsfólk til 9 børn |

Í tølunum fyri Tórshavnar kommunu er íroknað normeringsøkingin uppá kr. 4,5 mió frá 2020.

Um normeringin í Tórshavnar kommunu varð sett til minimumsnormeringina, sum hon verður í Danmark í 2025, so skulu leggjast uml. kr. 36 mió aftrat játtanini býtt soleiðis:

| | |
|---|---|
| Vøggustovur | 17,2 mió |
| Barnagarðsstovur | 9,1 mió |
| Frítíðarskúli | 9,6 mió |

Hesi tølini eru tengd at barnatalinum, sum merkir, at hesar útreiðslurnar til betri normeringar fara at hækka, um barnatalið hækkar eisini komandi árini.

Útrokningarnar eru harumframt gjørdar í samsvari við núverandi útrokningarlykil, har grundarlagið er ásetingin í dagstovnalógini, har tímarnir til børnini skulu vera minst 2/3 námsfrøðingar. Hin triðingurin er hjálparfólk. Lønarsatsurin er miðal starvsaldur á øllum dagstovnaøkinum fyri ávikavist námsfrøðingar og hjálparfólk.

Foreldragjaldið er í dag 27%. Um óbroytt fer foreldragjaldið at hækka samsvarandi normeringsvøkstrinum, men tað ger so eisini, at aðrar útreiðslur á dagstovnaøkinum fara at hækka, t.e. systkinaavsláttturin og fíggjarlig frípláss.

Fyrivarni skal takast fyri, at skipanirnar í Danmark og Føroyum eru ikki heilt eins, eitt nú viðvíkjandi undirvísingarskyldu og frítíðarskúla. Í Danmark fara børn í skúla á seks ára aldri.

Kostnaður til tímar vegna serligan tørv/serstovur er ikki íroknaður minimumsnormeringini. Hetta liggur eisini uttanfyri vanligu normeringina í Tórshavnar kommunu.

Metast má, at verður normeringin hækkað til at verða á sama stigi sum tann danska minimumsnormeringin, so er skilagott at gera hetta yvir eitt áramál, har hædd verður tikin fyri samlaðu kommunalu fíggjarætlanini komandi árini, og har man samstundis streingir á landsmyndugleikarnar um at útbúgva fleiri námsfrøðingar til dagstovnaøkið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Dagstovnalógin.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Fíggjarætlanin.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** Ja ☒ Nei ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at umrøða málið.

**Mentamálanevndin 16. november 2020:** Nevndin mælir til breiða politiska semju um at hækka normeringarnar sambært yvirlitinum omanfyri yvir eitt áramál og at heita á landsstýrið um at raðfesta útbúgving av námsfrøðingum til dagstovnaøkið. Málið beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 25. november 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Gunvør Balle biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

Eftir fakligum tilmæli samtykti eitt samt býráð í november í 2020 at hækka normeringina á dagstovnaøkinum við 36 mió komandi árini, - ella við uml 6-8 mió árliga komandi 4-5 árini.

Tað eru nógvar og stórar avbjóðingar á dagstovnaøkinum, og neyðugt er at hugsa nýtt og finna munagóðar loysnir fyri at økið skal vera haldført í framtíðini.

Størsta avbjóðingin er vantandi starvsfólk, serliga námsfrøðingar, og leiðarar á økinum brúka nærum alla sína tíð til at fáa gerandisdagin at ganga upp. FLeiri átøk skulu til fyri at tiltrekkja og fasthalda starvsfólk, eitt av hesum er hægri normering og eitt annað er at skapa eitt spennandi arbeiðspláss har møguleiki er fyri fakligari sparring og menning.

Síðsti býráðsmeiriluti hækkaði normeringin við 4,5 mió kr í 2020 og við 6,3 mió í 2021. Vit vóru fullgreið yvir at tað var ikki nóg mikið og heittu tí á umsitingina um at greina tørvin á normering.

Greiningin frá umsitingini vísti, at um normeringin í Tórshavnar kommunu varð sett til minimumsnormeringina, sum hon verður í Danmark í 2025, so skulu leggjast uml. kr. 36 mió aftrat játtanini býtt soleiðis:

Vøggustovur 17,2 mió
Barnagarðsstovur 9,1 mió
Frítíðarskúli 9,6 mió

Tórshavnar kommuna eigur at útinna viljan hjá einum samdum býráð og hækka normeringina til dagstovnaøkið við hesum 36 mió. Eisini eigur TK at fara undir eitt skipað arbeiðið við

starvsfólkamenning, sum kann vera við til at økja um trivnaðin og draga til sín skikkað starvsfólk til dagstovnaøkið.

Soleiðis kunnu vit sum størsta kommuna gera okkara til at bøta um arbeiðsumstøðurnar á okkara dagstovnum.

**Tilmæli:**
Gunvør Balle, Elsa Berg, Jákup Dam og Ruth Vang mæla til

1. at politiska skipanin biðjur um uppskot frá umsitingini til átøk innan starvsfólkamenning ið kunnu vera við til at gera dagstovnaøkið í Tk lokkandi við høgari fakligheit og trivnaði
2. at seta 7 mió kr av til hægri normering á dagstovna- og frítíðarskúlaøkinum fyri fíggjarárið 2022.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Málið umrøtt.

# 241/21 Havnin sum súkklubýur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.03.2019 | 58/19 | 19/01370-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 06.05.2019 | 18/19 | 19/01370-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 07.05.2019 | 25/19 | 19/01370-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 06.11.2019 | 308/19 | 19/01370-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.11.2019 | 200/19 | 19/01370-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.01.2020 | 20/20 | 19/01370-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 22/20 | 19/01370-1 |
| 8 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 14/20 | 19/01370-1 |
| 9 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 241/21 | 19/01370-1 |

**Upprunin til málið:**
Marin Katrina Frýdal, forkvinna í byggi- og býarskipanarnevndini.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Fólkheilsa, umhvørvi, flytføri og fíggjarlig menning – súkkling er ein liður, ella eitt amboð, ið stuðlar undir hesum. Lykilin til eitt gott samfelag er í einum sterkum flytføri, har bilar ikki longur dálka luftina og taka so nógv pláss, sum teir gera nú á døgum. Økta framtíðar ferðslan skal loysast við súkkling, gongd og almennari ferðslu.

Vilja vit súkkling, tosa so ikki bara um súkkling, sigur Gil Penelosa. Tí tað snýr seg um fólkaheilsu, umhvørvi, flytføri og fíggjarliga menning. Súkkling er bara eitt av fleiri amboðum, sum arbeiðir fyri hesum og er ikki eitt endaúrslit í sjálvum sær. Gil Penelosa er stovnari og leiðari fyri almannagagnliga felagsskapinum 8 80 Cities í Toronto í Canada. Hugsanin er, at um ein megnar at skapa ein bý, har gott er at liva hjá bæði 8 og 80 ára gomlum, so er tað ein býur, sum er góður fyri øll.

Tórshavnar kommuna skal miðvíst og yvirskipað leggja til rættis, so Havnin verður ein góður súkklubýur. Strembað eigur at verða eftir, at Havnin gerst ein av heimsins bestu súkklubýum. Havnin er ein eyðsæddur súkklubýur, fjarstøðan er stutt og veðrið er milt. Hóast regn og vind, eru sera góð klæðir til endamálið, og súkklurnar eru sera væl útgjørdar til nógvu brekkurnar við nógvum kervum. Harumframt eru frálíkar el-súkklur eisini komnar á marknaðin. Tað skal vera lætt at velja súkkluna, ið er ein týdningarmikil partur av grøna skiftinum. At skilja súkkluferðslu frá bilferðslu er ein liður í hesi stremban.

Málið skal verða, at súkkling skal fella sum eitt trygt og natúrligt val hjá teimum flestu.

Nógvar gøtur eru gjørdar síðstu árini, sum eisini eru sera væl egnaðar at súkkla á, eins og breiðar gongubreytir nú verða strikaðar eftir heimildini, kommunan loksins hevur fingið; *Kunngerð nr. 138, Um súkklandi á gongubreytum, frá 19. oktober 2017*, soleiðis at bæði gongufólk og súkklandi kunnu nýta gongubreytirnar.

Skal Havnin skara framúr, sum ein veruligur súkklubýur, har súkkling er ein valmøguleiki hjá øllum, skal tað verða trygt, lætt og skjótt at súkkla. Lykilin er útbygging av eini samanhangandi súkkluleið, har ikki er neyðugt at stíga fótin niður á fast og har súkkling í mestan mun er atskild frá bilferðsluni.
Neyðugt er at gera bæði smá og stór átøk. Langtíðarætlanir verða lagdar í kommunu-/miðbýarætlanir, byggisamtyktir og í øllum skipanararbeiði.

**Uppskot til átøk at gera beinanvegin - *skjótt syftir seiðir*:**
1. Skráar verða gjørdir á øllum mótum, har gongubreytir/súkklubreytir enda á vanligum vegi o.tíl.
2. Súkkluparkering í miðbýnum, t.v.s. súkkluhús við streymi til el-súkklur, pumpu, skiftilykil o.ø. hentleikum - súkklur skulu standa trygt og turt.

3. Súkklur við í bussarnar.
4. Eggja til súkkluvinarlig arbeiðspláss – heilsufremjandi – lønandi – umdømi.
5. Eitt gott samanhangandi, lagaligt og væl útbygt ferðslutrygt súkklunet.
6. Kunning um súkkluleiðir við m.a. at gera betri kort til heimasíðuna, ið vísir hvar súkkluleiðirnar eru í býnum og millum Havnina og bygdirnar.
7. Áherðslu á heilsuliga týdningin á gerandisliga súkkling fyri øll.

**Uppskot um langtíðarætlað átøk:**

1. Súkkling við í kommunu-/miðbýarætlanir, byggisamtyktir v.m.
2. Allir nýbygningar skulu hava súkkluskúrar og atknýttar súkkluleiðir, sí j. nr. 2005-1437 og 2005-1436.
3. Við allar skúlar, dagstovnar og kommunal arbeiðspláss verða gjørd súkkluhús við hentleikum nevnd omanfyri.
4. Í útjaðaranum verða skipað súkkluparkering eins og í miðbýnum, t.v.s. súkkluhús við streymi til el-súkklur, pumpu, skiftilykil o.ø. hentleikum - súkklur skulu standa trygt og turt. Soleiðis at fólk, ið ferðast til og frá arbeiði, antin við Bygdaleiðum ella Bussleiðini, kunnu súkkla síðsta teinin.
5. Skipað fyri tiltøkum, sum kunnu vekja áhugan fyri at súkkla.

Ein súkklubýur er ein býur við meira plássi, minni larmi, reinari luft, glaðum og nøgdum íbúgvum. Súkkling er ikki eitt mál í sjálvum sær, men er hinvegin ein munagóður miðil til at skapa ein betri bý at liva í við plássi til fjølbroytni og menning.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Í sambandi við striking av gongubreytum: *Kunngerð nr. 138, Um súkklandi á gongubreytum, frá 19. oktober 2017.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Hetta er eitt sera breitt og umfatandi mál/átak, og eigur hetta at verða samskipað millum deildir og fyrisitingar á bestan hátt.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ætlanirnar hjá Teknisku deild og Umhvørvisdeildini at strika gongubreytir (Rakstrar mál).

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
-
**Umhvørvisárin**
-
**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-
**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | x | x | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | x | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at ein arbeiðsbólkur verður settur við umboðum frá Býarskipanardeildini, Teknisku deild og Umhvørvisdeildini at nágreina ítøkiligu átøkini, sum verða, í omanfyri nevnda teksti, lýst sum *Skjótt syftir seiðir*, at arbeiðisbólkurin tryggjar sær luttøku frá øðrum fyrisitingum, sum kunnu verða rakt av ella sum onkursvegna hava ein áhuga í verkætlanini, og at arbeiðsbólkurin vendir aftur í nevndina við eini ætlan fyri hvussu átøkini skulu raðfestast, fíggjarligu avleiðingunum av átøkunum og eini tíðarætlan fyri nær átøkini kunnu verða framd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 06. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 07. mai 2019:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, atkvøða blankt.

**Ískoyti:**

**Súkkling sum ítrótt og frítíðarvirksemi**
Í Tórshavnar kommunu eru trý súkklufeløg t.e. Tórshavnar Súkklufelag, Føroya Triathlonfelag og Fjallasúkklufelagið, ið eru skipaði undir Sersambandinum fyri Súkkling og triathlon, ið er limur í ÍSF

Í Tórshavnar Súkklufelag eru umleið 20 virknir limir. Í Føroya Triathlonfelag eru umleið 20 virknir limir og í Fjallasúkklufelagnum eru umleið 20 virknir limir. Onki súkklufelag er í løtuni virkið uttanfyri høvuðsstaðin.

Nakað av samskifti hevur verið við feløgini, ið m.a. ynskja sær høli til goymslu og felagsvirksemi. Harumframt hava feløgini verið partur av konseptmenningartilgongdini viðv. frítíðardepli á Glyvursnesi (Mál 18/03472 Forkanningar viðv. staðseting av ymsum frítíðarvirksemi í grótbrotinum á Glyvursnesi), umframt hugskot til menning av innandura súkkluforðabreyt til at venja motorikk v.m. Eisini er súkkling partur av tilgongdini í máli 19/00757 Ítróttapolitikkur fyri Tórshavnar kommunu. Umframt verkætlanin í máli 15/03842 Fjallasúkklufelagið: Umsókn um lendi til fjallasúkklurás.

Ætlanin er at halda fram við samskiftinum við feløgini um menning av virksemi og fyrireika møgulig mál til nevndarviðgerð.

**Spurnakanning um súkkling v.m.**
Umsitingin hevur júst fingið gjørt eina spurnakanning viðv. súkkling v.m. í kommununi. Hjálagda kanning sýnir at eitt stórt potentiali er í at fáa fleiri fólk at súkkla meiri, eisini sum ítrótt og frítíðarítrótt og at menna karmarnar fyri tí. Á fundinum kemur umsitingin at gjøgnumganga úrslitini í kanningini.

**Skjøl:**
*Úrslit frá súkklukanning*

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðari á Býarskipanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða kanningina við atliti til at umsitingin kemur við neyvari tilmælum í vetur.

**Mentamálanevndin 06. november 2019:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. november 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**

Á løgukarminum fyri 2020 er játtað 1.000. tkr á konto 6275 Fríðkan av kommununi, til at seta í gongd átøk í mun til ætlanina «Havnin sum súkklubýur», merking, broytingar í vegakervi og súkklutiltøk.

Arbeiðsbólkurin við umboðum úr býarskipanardeildini, teknisku deild og umhvørvisdeildini hava gjørt uppskot til ymisk samansett átøk at seta í verk í 2020. **Sí skjal 19/01370-22 Súkkluárið 2020.**

Átøkini snúgva seg um betringar fyri súkkling í vegakervinum, betri umstøður fyri súkkluparkering og tiltøk av ymiskum slag, sum varpa ljós á súkkling og burðardygga ferðslu, ið hava góða ávirkan á heilsu, trivnað og umhvørvi.
Átøkini verða gjørd í samstarvi við avvarðandi myndugleikar, felagsskapir, áhugabólkar og virki, sum kunnu luttaka í menningini av Havnini sum súkklubýur.

Átøkini í yvirlitinum súkkluárið 2020 setur ferð á tilgongdina at menna Havnina og leggur eisini lunnar undir framhaldandi arbeiði, hvussu súkkling og burðardygg ferðsla skal raðfestast í kommununi komandi árini.

**Skjøl:**
*Súkkluárið 2020,* journal nr. 19/01370-22

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til

- at játta 1.000. tkr. av konto 6275, *Fríðkan av kommununi (súkklugøtur og skýli)*, L00001, Løgukarmur fyri árið,
- til nýggja verkætlan "Havnin sum súkklubýur", ið fevnir um at fremja átøkini sum lýst í yvirlitinum Súkkluárið 2020, umframt at geva arbeiðsbólkinum heimild til at seta átøkini í verk.
  At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Elsa Berg biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

Í januar 2020 tók eitt samt býráð undir við at Tórshavnar kommuna skal miðvíst og yvirskipað leggja til rættis, so Havnin verður ein góður súkklubýur.
Í fíggjarætlanini fyri 2021 er 1000 t.kr. settar av til súkklugøtur og skýli og onnur átøk í mun til ætlanina Havnin sum súkklubýur undir konto 6275 fríðkan av kommununi.

Annika Olsen, Gunvør Balle og Elsa Berg mæla til at játta 1000 t.kr. av konto 6275 fríðkan av kommununi til verkætlanina Havnin sum súkklubýur, ið fevnir um at fremja átøk, sum eru til frama fyri Havnina sum súkklubý, umframt at umsitingin fær heimild at seta átøkini í verk.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Málið umrøtt.

# 242/21 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 34/21 | 21/00010-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 68/21 | 21/00010-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 68/21 | 21/00010-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 103/21 | 21/00010-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 96/21 | 21/00010-1 |
| 6 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 130/21 | 21/00010-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 19.05.2021 | 131/21 | 21/00010-1 |
| 8 Býráðsfundur | 27.05.2021 | 157/21 | 21/00010-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 166/21 | 21/00010-1 |
| 10 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 203/21 | 21/00010-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 230/21 | 21/00010-1 |
| 12 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 242/21 | 21/00010-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið. Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. september 2021 | Blað nr.: 961<br><br>Formansins merki: |

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>30. september 2021 | Blað nr.: 962 |
| | | Formansins merki: |

**Fíggjarnevndin 19. mai 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 27. mai 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni, juli og august verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Framlagt og góðkent.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Bjørg Dam | Elsa Berg | Jón Kragesteen |
| Gunvør Balle | Annika Olsen | Birgir Nielsen |
| | Ruth Vang | |